| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. juni 2021 | Blað nr.: 632<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 23. juni 2021 **Kl**. 17:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:** 163/21-204/21

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Ruth Vang

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Barbara Vang

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
| --- | --- | --- | --- |
| 163/21 | 21/00012-1 | Mál beind í nevndir 2021 | 636 |
| 164/21 | 21/02574-1 | Leigusáttmáli Smyril Line | 638 |
| 165/21 | 21/00358-8 | Trafostøð á Norðadalsskarði. Leigusáttmáli við Búnaðarstovuna. | 640 |
| 166/21 | 20/04664-7 | Søla av lendi burtur av matr.nr. 1083a. Lendið verður selt og lagt afturat grannaognunum. | 642 |
| 167/21 | 21/02079-1 | Vinnuferðavinnu avtala | 646 |
| 168/21 | 20/04156-1 | Val av 5 limum í musikkskúlanevndina | 649 |
| 169/21 | 17/01361-1 | Listaverkstøð í Finsen | 650 |
| 170/21 | 17/01362-1 | Virknishøll í Finsen | 664 |
| 171/21 | 20/00868-1 | Skipan av Miðstovninum (Realskúlin Kongagøta og frk. Cohr) | 675 |
| 172/21 | 21/01008-1 | Uppraðfesting av eldraøkinum | 681 |
| 173/21 | 14/00218-2 | Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan | 683 |
| 174/21 | 21/01794-1 | Yvirtøka av ognini hjá FC Hoyvík á Gundadalsvegnum 8 | 696 |
| 175/21 | 16/01316-10 | Vegna nevndina í Bridgehúsinum Pól E. Egholm : Umbøn um fund viðvíkjandi Brigdehúsinum í Gundadali | 699 |
| 176/21 | 19/04413-1 | Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu: Støðan og framtíðar løgutørvur | 706 |
| 177/21 | 18/03863-5 | Uppskot um avtalu millum Kommunufelagið og Nám um undirvísingartilfar | 723 |
| 178/21 | 20/04036-1 | Frítíðartilboð til 3. flokk í Badmintonhøllini | 728 |
| 179/21 | 20/00856-2 | Umhvørvisárin frá graslíkisvøllum | 731 |
| 180/21 | 21/01777-1 | Útstykking oman fyri Argjahamar | 735 |
| 181/21 | 21/02231-2 | Umsókn um stuðul til víðkan og dagføring av kappingarøkinum hjá Føroyskum Íslandsrossafelag undir Kráarheyggi í Havnardali | 738 |
| 182/21 | 20/03654-1 | Útbjóðing av útstykking við Miðhorn í Tórshavn | 742 |
| 183/21 | 21/02442-1 | Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri partin av Karlamagnusarbreyt ímillum Rólantsgøtu og Ólivantsgøtu | 749 |
| 184/21 | 21/02624-2 | Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging | 751 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 185/21 | 21/01523-4 | Umsókn um keyp av lendi av matr. nr. 1100, Tórshavn til fríøki til íbúðarøkið á Fløtum | 753 |
| 186/21 | 21/02406-2 | Umsókn um keyp av øki burturav matr. nr. 1076a, Stiðjagøta at leggja saman við 1076m, Stiðjagøta 3 | 756 |
| 187/21 | 21/02118-1 | Dagføring av Norðara Ringvegi við Norðurlandahúsið | 758 |
| 188/21 | 21/02196-2 | Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK | 760 |
| 189/21 | 21/02232-6 | Parkeringsøki á Smærugøtu Áheitan á TK at keypa ognina matr. nr. 1467e, fyri at betra um ferðslu- og parkeringsviðurskiftini við Býlingshúsið undir Brúnni | 763 |
| 190/21 | 19/00603-2 | Umsókn um yvirtøku av vegi, matr. nr. 1456, Sóljugøta, Tórshavn | 767 |
| 191/21 | 17/00267-2 | Støðutakan um leingjan av sáttmálanum við Sp/f Gundurs Bussar um framhaldandi koyring av bussleiðini | 769 |
| 192/21 | 21/02467-1 | Bussleiðin - undangóðkenning / prækvalifikation av bjóðarum til komandi útbjóðing og gerð av útboðstilfari til rakstur av komandi bussleið | 773 |
| 193/21 | 21/00676-7 | Vegagerð á ídnaðarøkinum við Kemilux matr. nr. 1083r, Tórshavn | 775 |
| 194/21 | 19/02587-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt á Lambatrøðni, matr. nr. 157a, Argir | 777 |
| 195/21 | 20/04637-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri neyst, matr. nr. 208, Kollafjørður | 781 |
| 196/21 | 21/01736-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt Millum Horna, matr. nr. 1121a, 1121g, 1121h, 1121i og 1121k, Tórshavn | 783 |
| 197/21 | 21/01920-3 | Umsókn um at broyta matr. nr. 1351, Villingardalsvegur, Tórshavn til eitt A1 økið | 785 |
| 198/21 | 21/02314-2 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 1083a, 1083ae og 1087b, Tórshavn. Frá 4. grundumráði til B3 øki | 787 |
| 199/21 | 21/02438-1 | Broyting av byggisamtyktini fyri Nólsoy, matr. nr. 159e. Frá D øki til A øki | 789 |
| 200/21 | 21/01258-2 | Broyting av byggisamtykt fyri Velbastað, matr. nr. 51a, í sambandi við sethúsaútstykking | 791 |
| 201/21 | 21/02554-2 | Umsókn um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri matr. nr. 410a, 411d, 413a, 413b, Tórshavn | 793 |
| 202/21 | 21/01845-1 | Framflytingar fyri roknskaparárið 2020 | 795 |
| 203/21 | 21/00010-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2021 | 798 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 204/21 | 21/00586-3 | Áheitan um yvirtøku av vegi matr. nr. 658d, yviri við Strond 53, Tórshavn | 801 |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. juni 2021 | Blað nr.: 636<br><br>Formansins merki: |

**Til viðgerðar**

## 163/21 Mál beind í nevndir 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.01.2021 | 38/21 | 21/00012-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 48/21 | 21/00012-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 74/21 | 21/00012-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 138/21 | 21/00012-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 163/21 | 21/00012-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. juni 2021 | Blað nr.: 637<br>Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 28. januar 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 164/21 Leigusáttmáli Smyril Line

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 22.06.2021 | 28/21 | 21/02574-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 170/21 | 21/02574-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 164/21 | 21/02574-1 |

**Upprunin til málið**
At skipa havnarøkið og at betra um umstøðurnar hjá ferðafólki og frakt á Eystara havnarøki, nú tað nærkast at nýggja havnarlagið verður tikið í brúk.

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar havn er eigari av verandi farstøð og tilhoyrandi trapputorni.

Tá gamla Norrøna byrjaði siglingina upp á Tórshavn fyrst í 80-árunum, vóru tillagingar gjørdar á farstøðina, sum Strandferðslan brúkti til Smyril.

Tá nýggja Norrøna kom í 2003, bleiv trapputornið bygt afturat gomlu farstøðini, men umstøðurnar til bilar og ferðafólk vóru at kalla tær somu.

Í sambandi við, at verandi Norrøna kom í 2003, bygdi Smyril Line afturat einum pakkhúsi hjá Tórshavnar havn

Síðani Norrøna byrjaði sigling, er ferðafólkatalið og fraktnøgdirnar nógv vaksnar, uttan at umstøðurnar á landi hava fylgt við.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tórshavnar havn hevur tørv á einum nýggjum terminali til ferðafólk, og Smyril Line hevur tørv á nýggjum pakkhúsi við tilhoyrandi skrivstovum.

Partarnir eru samdir um, at ein góð loysn er at gera ein felags bygning, sum rúmar goymslu- og skrivstovuhølum til Smyril Line, og ferðafólkaterminal til Tórshavnar havn.

Áðrenn bygt verður, skulu partarnir vera samdir um verkætlanina.

Endaligi kostnaðurin verður fastlagdur, tá tilboðini upp á byggingina eru komin inn.

Uppskot er gjørt til avtalu og sáttmála j. nr.

Væntandi verður meginparturin av keypinum fíggjaður við lántøku.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. juni 2021 | Blað nr.: 639<br>Formansins merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin og kommunustjórin mæla til at taka undir við avtalu og sáttmála j.nr. 21/02574-2 og 21/02574-5.

**Havnanevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 165/21 Trafostøð á Norðadalsskarði. Leigusáttmáli við Búnaðarstovuna.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 138/21 | 21/00358-8 |
| 2 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 165/21 | 21/00358-8 |

**Upprunin til málið.**
SEV hevur søkt um byggiloyvi til bygging av eini Trafostøð á Norðadalsskarði.

**Lýsing av málinum.**

Sambært Grein 10. Stk. 1 í viðtøkunum fyri SEV. Framgongur:
Hvør limakommuna letur innanfyri kommunumark felagnum ókeypis til handa ta vídd, ið tørvar til háspennings- og lágspenningsleiðingar, transformarastøðir og til vegir til støðirnar.

Í hesum føri er talan um lendi sum liggur á festijørð, umsitin av Búnaðarstovuni.

Tískil er neyðugt at kommunan fyrst leigar neyðugt lendi frá Búnaðarstovuni.

Kommunan hevur heitt á Búnaðarstovuna um at fáa leigusáttmála uppá lendið, og liggur umbønin hjá festara til ummælis.

Kostnaðurin fyri at leiga lendi er.

| | | |
|---|---|---|
| Stovnan av leigusáttmála | kr. | 1.000,- |
| Tinglýsing. | kr. | 1.000,- |
| Kostnaður í alt | kr. | 2.000,- |

Umframt eitt árligt leigugjald á kr. 500, sum verður goldið eftir rokning í desember á hvørjum ári.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. juni 2021 | Blað nr.: 641 | Formansins merki: |

| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
(stutt frágreiðing um fíggjarlig viðurskiftið)

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk 7.500 | Dkk |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk 2.500 | Dkk |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato 01.07.21/31.12.29 | Dato |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk | | | | | | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at gera ein leigusáttmála við Búnaðarstovuna um leigu av lendi til eina trafostøð á Norðadalsskarði. Kostnaður í 2021 kr. 2.500,- og síðani kr. 500 kr. pr. ár so leingi sum leigusáttmálin eg í gildi.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 166/21 Søla av lendi burtur av matr.nr. 1083a. Lendið verður selt og lagt afturat grannaognunum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 22.06.2021 | 46/21 | 20/04664-7 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 139/21 | 20/04664-7 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 171/21 | 20/04664-7 |
| 4 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 166/21 | 20/04664-7 |

**Upprunin til málið**
3 umsøkjarar søkja um at keypa burturav matr nr 1083a, úti í Vika.

**Lýsing av málinum**
Umsókn er komin frá trimum grannum til ognirnar matr. nr .1083a og matr. nr. 1083ae og matr. nr 1087b, av tí at umsøkjarar ynskja at víðka um virksemið.
Ognirnar eru millum vinnuøkið í Vika og vegin "við Sandá".
Umsitingin hevur havt fund við umsøkjararnar, fyri at finna eina felags loysn, so allir fáa part av økinum.

**Umsøkjari 1 og 2:** 1083p søkja um 1455 $m^2$ og 1083q søkja um 1601 $m^2$ í einari felags umsókn um keyp av 1083a, 1083ae og 1087b, fyri at fáa byggistig og nettonýtslustig at hóska til tað tey ynskja at byggja.

Í sambandi við økta virksemið, hava tey tørv á at byggja eina høll í tilbygning til verandi høll. Stødd á leið 400 $m^2$ gólvvídd og umleið 8 m høg. Hæddin er neyðug fyri at umvæla og hava eftirlit við stóru bjargingarbátunum. Sí skjal 20/04664-4 Umsókn frá Føniks_gummibátatænastan

**Umsøkjari 3:** 1083ad hevur sent umsókn um keyp ella leigu av 2000m2 av 1087b og 1083a.
Umsøkjari ynskir at byggja eina høll at útleiga, til verkstað og kontór. Ferðslan verður munandi størri, men væntar umsøkjari ikki at virksemið hjá grannaognunum verður órógvað av hesum.
Umsøkjari legði dent á týdningin at kunna gera portur niðan móti NomaTek, tí at vindurin úr Havnardali er so tráur, at portur kann ikki gerast tann vegin.

Umsøkjari ger vart við vantandi parkeringsmøguleikar á økinum, og at ætlanin vil bøta um hesar trupulleikar.
Sí skjal 21/00413-1 umsókn til Tórshavnar kommunu, att. Heðin Mortensen

**Lógir, ásetingar o.a.**
Høvuðsreglan viðvíkjandi sølu av kommunalari fastogn er, at føst ogn hjá kommununi ikki má seljast, uttan so, at ognin hevur verið boðin út alment, sbrt. § 44, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 2000 um kommunustýri.

Í kunngerð nr. 122 frá 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn, eru undantøk til høvuðsregluna. Sambært viðmerking frá kommunala eftirlitinum í øðrum máli framgongur, at við heimild í § 2. stk.2, í somu kunngerð kann tó verða vikið frá kravinum um alment útboð, tá tað annars eru serlig viðurskifti, ið tala fyri, at fastognin kann verða seld uttan alment útboð. Til hetta krevst góðkenning frá landsstýrismanninum. Góðkenningin er einans ætlað at vera nýtt í serligum føri, har tað má metast, at kravið um alment útboð vil forða søluni óneyðugt, og at alment útboð ikki hevur við sær tilboð um hægri prís.

Sølan av økinum sum søkt verður um, lýkur ikki undantøkini í kunngerð um alment útboð av fastari ogn, og er tí neyðugt at søkja um loyvi frá landsstýrismanninum til søluna.

Økið, sum talan er um at selja, liggur millum matriklarnar hjá umsøkjarum, og ber til at skipa økið sum eitt vinnugrundstykki, men er ein avbjóðing at tað tá verður neyðugt at uppdatera vegin Við Sandá, og verður tá mett, at talan verður um eina dýra loysn.

Umsøkjarar mangla pláss á egnum økjum, og ber til at leggja miðøkið afturat grannagrundstykkjunum, og verður tá talan um somu innkoyringar til grundstykkini sum eru í dag.

Tað fyriliggur ein ognarmeting frá meklarafelagnum BetriHeim. Niðurstøðan hjá meklarara er, at talan er um eitt óplanerað jarðarstykki við Sandá, sum liggur í 4. Grund umráði, sum skal leggjast í vinnuøki – í byggisamtykt B3. Tá ið stykkini eru løgd í B3 øki, metir meklarin fermetraprísin at verða 750,00 kr./$m^2$.

Umsókn um loyvi til at selja økið til umsøkjara, uttan at økið verður bjóða alment til sølu, verður send kommunala eftirlitinum.
Byggisamtyktarliga liggur økið talan er um, í 4. Grundumráði, men uttanfyri fríðingarlinjuna fyri Sandá.
Neyðugt er at broyta byggisamtyktina, so økið verður umfatað av byggisamtyktar ásetingini fyri vinnuøkið B3.

Tá almenna byggisamtyktin varð endurskoðað, varð ásetingin fyri vinnuøkið B3 broytt, soleiðis at meira kann byggjast á økið.

*Áðrenn broyting:*
Byggistig 0,5
Rúmmát má ikki fara uppum 2 $m^3$, fyri hvønn $m^2$ av stykkinum
Hús skulu ikki vera hægri enn 9 m

*Eftir broyting:*
Byggistig 0,5
Rúmmát má ikki fara uppum 3 $m^3$, fyri hvønn $m^2$ av stykkinum
Hús skulu ikki vera hægri enn 10 m

Broytingin hevur ligið til almenna hoyring, og liggur til endaliga góðkenning hjá UVMR.

Hendan broyting í byggisamtyktini hevur tað við sær, at umsøkjarar hava ikki tørv á eins stórum øki og tey søktu um, men ætlanin skal tó tillagast endaliga økinum.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
*Umsøkjari 1 matr nr 1083p og 2 matr nr 1083q*
Teirra ognir liggja uppat vegnum Mykinesgøta. Ognin tey vilja keypa afturat, liggur í forleingilsi av teirra ogn, soleiðis at vegaatkoman verður tann sama sum í dag.
Umsøkjari 1 hevur trupult við at fáa atkomu til stykkið, ið verður lagt aftura ognini, og ynskir at keypa part av ognini hjá umsøkjara 3, fyri at fáa nøktandi umstøður. Hetta er ein treyt fyri at skipanin á økinum skal ganga upp.
Sí skjal *20/04664-8 20210419_tillagað uppskot smb. ynski frá umsøkjarum.*

*Umsøkjari 3 matr nr 1083ad*
Økið liggur uppat vegnum við Sandá.
Vegaatkoman til 1083ad er ikki vegaatkoma til tunga ferðslu, og hevur kommunan ikki ætlanir um at gera íløgu í vegin. Tí er ikki hóskandi at økja um virksemið til 1083ad.
1083ad er ímóti einari farleið, har nógv fólk fara út í náttúruna. Bæði til gøtuna framvið Sandá, og varðagøtuna til Kirkjubø.
Økið skal skipast, soleiðis at ein innkoyring er á stykkið, betonggarður við girðing skal gerast móti vegnum "við Sandá", og fer Tórshavnar kommuna at planta og fríðka geiran millum vegin "við Sandá" og girðingina.
Hóast tað at talan er um eitt vinnuøki, skal tað vera snøgt at síggja til.
Økið má skipast væl, og óruddið má burtur ella skermast betri.

**Samanumtøka:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til skipan av økinum, sum umsøkjararnir hava góðkent.
Av tí at økið markar til grøn trivnaðarøki, er týdningarmikið, at ognirnar verða skipaðar soleiðis at tær taka seg væl út.
Stórur hæddarmunur er á økinum, og skal betonggarður stoypast sum avmarkar ymisku matriklarnar, soleiðis at lendið verður skipað og gjørt liðugt beinanveg.
Økið verður skipað smb. skjali 20/04664-8 20210419_tillagað uppskot smb. ynski frá umsøkjarum, soleiðis at:
Umsøkjari 1 keypir 688 $m^2$ frá Tórshavnar kommunu
Umsøkjari 2 keypir 788 $m^2$ frá Tórshavnar kommunu
Umsøkjari 3 keypir 892 $m^2$ frá Tórshavnar kommunu
Umsøkjari 1 keypir 123 $m^2$ frá umsøkjara 3, av matrikul 1083ad

Umsøkjari 1, 2 og 3 gjalda umsitingarliga kostnaðin, ið stendst av málsviðgerðini í sambandi við sundurbýti. Herundir eisini matrikuleru avgreiðsluna og tinglýsing.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
20/03680 Umsókn um keyp av byggilendi at leggja afturat matr. nr. 1083q, Mykinesgøta 8, Tórshavn
21/00413 Nýggj umsókn um keyp/ella leigu av matr. nr. 1087b í sambandi við bygging av høll á matr. nr. 1083ad, Tórshavn

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ein geiri millum privatu ognirnar í grannalagnum og vinnuøki skal haldast fríur til møguligar tekniskar skipanir, reinsianlegg, komandi gøtu og osfr. Sí skjal 20/04664-8 20210419_tillagað uppskot smb ynski frá umsøkjarum

**Skjøl:**
20/04664-4 FX-Skann(1) Undirskrivað umsókn
20/04664-4 Tórshavnar býráð, umsókn um grundstykki KORTSKJAL
20/04664-8 20210419_tillagað uppskot smb. ynski frá umsøkjarum
21/00413-1 umsókn til Tórshavnar kommunu, att Heðin Mortensen
20/04664-10 Virðismeting matr.nr. 1083a, 1087b og 1083ae, Tórshavn.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini, kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla býráðnum til, umvegis teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina, at økið verður skipað smb. skjali, *20/04664-8 20210419_tillagað uppskot smb. ynski frá umsøkjarum,* og omanfyrinevndu treytum, at byggisamtyktin verður broytt, so økið verður lagt í B3 Vinnuøki, og at selja umsøkjarum lendi fyri 750 kr.$m^2$. Sølan er treytað av loyvi frá kommunala eftirlitinum.

**Tekniska nevnd 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

## 167/21 Vinnuferðavinnu avtala

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 10.06.2021 | 26/21 | 21/02079-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 143/21 | 21/02079-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 167/21 | 21/02079-1 |

**Upprunin til málið**

Í 2019 gjørdu Tórshavnar kommuna, Visit Tórshavn og Visit Faroe Islands av at fara í eitt skipað samstarv við tí endamáli at økja um vinnuferðavinnu í Føroyum og í Tórshavn. Í hesum sambandi gjørdu partarnir eina samstarvsavtalu um vinnuferðavinnu. Avtalan gongur út 1. januar 2022 og støða skal takast til um nýggj avtala skal gerast.

**Lýsing av málinum**
Ferðavinnupolitikkurin hjá Tórshavnar kommunu (2017) fevnir um eitt átak um vinnuferðavinnu - sonevnda MICE málbólkin. Hesin málbólkur verður mettur at verða sera umráðandi fyri Føroyar og serliga Tórshavnar kommunu, har flestu møguleikar innan gisting, hølir og vistveiting eru Vinnuferðavinna er føroyska heitið fyri MICE-ferðavinnu:

M stendur fyri Meetings – fundir
I stendur fyri: Incentives ella virkisferðir, sum fyritøkur lata starvsfólkum ella samstarvsfeløgum
C stendur fyri Conferences ella ráðstevnur
E stendur fyri. Events ella størri tiltøk, t.d. innan ítrótt, tónleik ella øðrum

Vinnuferðavinna skapar lív í býnum uttan fyri háárstíð, og tað stuðlar undir verandi ferðavinnutilboð, matstovu- og gistingarvinnu, samstundis sum tað eggjar til nýhugsan, íverksetan og vørumenning, sum gagnar bæði ferðafólkum og borgarum.

Ferðandi krevja tilsvarandi, at góðskan og tænastustøðið í vinnuni er høgt. Her er týdningarmikið, at kommunan er við, millum annað í sambandi við fyriskipan av móttøkum. Endamálið hjá kommununi er at menna eina burðadygga ferðavinnu; at raðfesta vinnuferðavinnu sum eitt natúrligt lið í hesi ætlan, har fokus er á at fáa “tey røttu” ferðafólkini at vitja.

Tað ræður um at verða sjónligur á marknaðinum, og tískil er marknaðarføringin sera týdningarmikil. Visit Faroe Islands arbeiðir í løtuni við einum branding átaki, sum hevur til endamáls at fáa vøkstur á hesa vinnu.

Vinnuferðavinnan er fyri alt landið, men tað er fyrst og fremst í Tórshavn, at vinnuferðavinnutiltøk verða hildin, tí býurin hevur nógvar og góðar gistingarmøguleikar og rímilig ráðstevnuhølir v.m.

Ùtbyggingin og uppraðfestingin av gistingarhúsum seinastu árini gera, at møguleikarnir fyri vinnuferðavinnu eru blivnir munandi betri og væntast kann, at vinnuferðavinnan í Tórshavn fer at blíva enn størri, tá gongd aftur kemur á ferðavinnuna kring heimin.

Verandi samstarvsavtala hevur virkað væl og eru partarnir sum heild nøgdir við samstarvið. Royndirnar higartil vísa, at tað er stórur áhugi fyri at koma til føroyska høvuðsstaðin at hava fundir, á virkisferðir, ráðstevnur, og størri ítróttar- og tónleikatiltøk hava eisini verið seinastu árini.

Í 2019 vóru 25 vinnuferðatiltøk í Tórshavn og tá eru virkisferðirnar ikki taldar við.

Útlitini vóru eisini góð fyri vinnuferðavinnuna í 2020. Tíverri hevur Korona havt stóra avleiðingar fyri vinnuferðavinnutiltøkini og tí blivu einans 3 av teim 25 vinnuferðavinnutiltøkunum, sum skuldi verða í Føroyum, avgreidd. Restin vórðu talgild, útsett ella avlýst. Nógv er útsett til 2022.

Vinnuferðavinnudeildin, sum er mannað við tveimum starvsfólkum, sum eru sett og lønt av ávikavist Visit Faroe Islands og Visit Tórshavn, húsast á Visit Faroe Islands. Orsøkin til tess, var at fáa samstarvið at rigga og fyri at sýnast sum ein professionel eind úteftir og tí, at marknaðarumhvørvið og starvsfólk, sum hevði drúgvar royndi innan vinnuferðavinnu, longur var á Visit Faroe Islands.

Partarnir eru samdir um, at hetta er ein góð loysn og at tað riggar væl. Tí mæla tey til sama leist sum higartil.

Viðhefta uppskot til samstarvsavtalu er sum heild tann sama sum áður. Tað er tó lagt upp til eina fýra ára avtalu í mun til trý ár. Vinnuferðavinnuskrivstovan hevur víst á, at tað er umráðandi, at tey kunnu bjóða Tórshavn út sum vinnuferðavinnubý nøkur ár fram tí fyritøkur og felagsskapir sum oftast fyrireika tiltøk fleiri ár frammanundan tiltakið verður hildið.  Harumframt er eisini lagt upp til, at ein strategi skal gerast við málum og lutmálum fram til 2030. Verandi samstarvsavtala leggur upp til eina strategi fram til 2025. Vinnuferðavinnudeildin hevur arbeitt við at gera eina strategi, men orsakað av korona, hevur arbeiðið ligið stilt, tí ferðavinnan kring heimin hevur og er framvegis í eini bíðistøðu. Mett verður, at tað er skilabest at gera eina strategi við málum og lutmálum fram til 2030 .

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávísøkir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:**  **Ja ☐**  **Nei ☐**

Samlaði fíggjarkarmurin fyri samstarvsavtaluni hevur verið 4 mió. kr.

Visit Faroe Islands hevur rindað 2 mió.kr. og hevur váttað at halda áfram við avtaluni og játtanini treytað av, at játtan er til tess á fíggjarlógini.

Tórshavnar kommuna hevur sett 2 mió.kr. av til vinnuferðavinnuavtaluna

Tær 2 mió.kr. eru býttar soleiðis:

Kr. 800.000 starvsfólk
Kr. 400.000 marknaðarføring
Kr. 300.000 til stuðul einstaklingar/feløg, reglugerð er samtykt
Kr. 500.000 til móttøkur (kr. 200 fyri hvønn luttakara)

Mett verður, at játtanin er hóskandi, tá ferðavinnan aftur fer at koma fyri seg og mett verður, at tað er ein góð íløga fyri bæði Tórshavnar kommunu og Visit Faroe Islands.

Hóast útlitini í ferðavinnuni eru heldur døpur í løtuni, verður mett, at tað er ráðiligt og neyðugt, at Tórshavnar kommuna brynjar seg til eina framtíð, tá ferðafólkini koma aftur og at kommunan viðvirkar til framhaldandi menning av ferðavinnuni. Kanningar vísa, at málbólkurin í vinnuferðavinnuni leggur tríggjar ferðir so nógv eftir seg peningaliga sum eitt vanligt ferðafólk.

Tí verður mælt til, at kommunan framhaldandi satsar upp á vinnuferðavinnu og setur pening av til tess. Tað tekur tíð at fáa fleiri og størri vinnuferðavinnutiltøk til Tórshavn. Tað er av stórum týdningi at hugsa um, at talan er um eina íløgu, sum verður gjørd í ferðavinnuna nú og at størri avrikini fara at koma seinni.

Í uppskotinum er tilskilað, at nýggj avtala skal gerast um fíggjarkarmurin hjá antin Tórshavnar kommunu, Visit Faroe Islands ella Visit Tórshavn broytist munandi.

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni og kommunustjórin mæla vinnunevndini til at taka undir við uppskotinum um samstarvsavtalu millum Tórshavnar kommunu, Visit Tórshavn og Visit Faroe Islands galdandi fyri 2022-2026 og játtanin verður tann sama sum higartil.

**Vinnunevndin 10. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Smtykt at taka undir við Vinnunevndini.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 168/21 Val av 5 limum í musikkskúlanevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.01.2021 | 15/21 | 20/04156-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 168/21 | 20/04156-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. reglugerð frá 30. september 2009 um Tórshavnar Musikkskúla, velur býráðið fimm nevndarlimir í eina musikkskúlanevnd, ið hevur til endamáls at fremja áhugamál skúlans. Eisini arbeiðir nevndin fyri góðum korum hjá musikkskúlanum, miðar eftir at vekja ans fyri tónleiki og arbeiðir sum heild fyri áhugamálum musikkskúlans. Nevndin eigur saman við musikkskúlanum at eggja til eitt ríkt og fjøltáttað tónleikalív.

Í nevndini sita: Rói B. Poulsen, Uni Árting, Malan Eyðunsdóttir, Malan Thomsen, Jens Marni Hansen.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir.

**Býráðsfundur 14. januar 2021:** Vald vórðu Halla Samuelsen, Høgni Midjord í Stovuni, Petur Frank Holm, Høgni Reistrup og Malan Eyðunsdóttir.

**Ískoyti:**
Høgni Midjord hevur boðað frá at hann tekur seg úr nevndini og tí skal annar limur veljast.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja ein lim í musikkskúlanevndina.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Vald varð Sára Gullfoss.

## 169/21 Listaverkstøð í Finsen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 106/17 | 17/01361-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 173/17 | 17/01361-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 279/17 | 17/01361-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 324/17 | 17/01361-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 294/17 | 17/01361-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 6/18 | 17/01361-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 53/18 | 17/01361-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 107/18 | 17/01361-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 69/18 | 17/01361-1 |
| 10 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 146/18 | 17/01361-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 23.04.2018 | 152/18 | 17/01361-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 137/18 | 17/01361-1 |
| 13 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 120/18 | 17/01361-1 |
| 14 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 164/18 | 17/01361-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 234/18 | 17/01361-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 213/18 | 17/01361-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 4/19 | 17/01361-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 13.02.2019 | 39/19 | 17/01361-1 |
| 19 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 94/19 | 17/01361-1 |
| 20 Mentamálanevndin | 03.04.2019 | 118/19 | 17/01361-1 |
| 21 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 208/19 | 17/01361-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 191/19 | 17/01361-1 |
| 23 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 139/19 | 17/01361-1 |
| 24 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 319/19 | 17/01361-1 |
| 25 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 69/20 | 17/01361-1 |
| 26 Mentamálanevndin | 15.04.2020 | 116/20 | 17/01361-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 99/20 | 17/01361-1 |
| 28 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 209/20 | 17/01361-1 |
| 29 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 284/20 | 17/01361-1 |
| 30 Mentamálanevndin | 26.10.2020 | 292/20 | 17/01361-1 |
| 31 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 273/20 | 17/01361-1 |
| 32 Mentamálanevndin | 12.05.2021 | 127/21 | 17/01361-1 |
| 33 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 108/21 | 17/01361-1 |
| 34 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 141/21 | 17/01361-1 |
| 35 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 169/21 | 17/01361-1 |

**Málslýsing:**
Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu er m.a. orðað viðv. skapandi list:

**"Skapandi list, mentan og siðsøga í kommununi**
Íløgur í mentan og list, eru íløgur í okkara egna samleika. At kenna og vera partur av søguni, er ein virðismikil førningur og tí eiga søvn at verða sjónligir partar av høvuðsstaðnum.
...
Listahús eigur at útvegast, har listafólk í kveikjandi umhvørvi kunnu fáa frið at skapa. "

**Myndlistaverkstað í Finsen**
Slíkt verkstað kundi verið hugsað í ovaru høllini í Finsen (fyrrv. fimleikahallunum í fyrrv. kommunuskúlanum). (sí hjálagdar myndir og tekning).
Høllin er partur av høvuðsumvælingin av Finsen til lestrarbústaðir hvat viðvíkur útveggum, vindeygum og taki, men er annars ogn hjá kommununi. Høllin fer at fáa hita frá Finsen.

Ynski er hjá myndlistafólki um at fáa betri møguleikar fyri verkstøðum. Ein fyrimynd er t.d. listaverkstað í Tróndheimi. Sí www.lkv.no

Høllin kundi verið avsett til verkstað hjá myndlistafólki og umsitin av myndlistafelagnum sbrt. nærri avtalu við kommununa viðv. upptøku, skipan, gjaldi v.m. Hugsanin er at rindast skal leiga fyri hølini og at tey so vítt til ber hvíla í sær sjálvum fíggjarliga.

Tað er hugsandi at har kundi verið einir 10-12 básar til listafólk.

Samskift hevur verið við teknisku fyrisiting/Húsaumsitingina um standin av høllini v.m. Ætlanin er at halda fram við greiningunum og fáa endaliga avkláring í mai 2017. Hugsanin er at minimalt skal gerast við hølini.

Ætlandi verður farið í samskifti við felagið hjá Myndlistafólki at gera uppskot til avtalu um, hvussu virksemi kann skipast har.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða nærri frá fyribils metingum viðv. uppstartskostnaðum og rakstri av hølunum, umframt tíðarætlan.

Henda verkætlan vil innibera at verkætlanin um innandura spæliland í hallunum í Finsen (mál 16/02253) verður slept í hesum umfari.

Býarskipanardeildin vísir á, at í heildarætlanini fyri Finsen hevur málið verið at ymisku hølini, sum eru afturat sjálvum lestrarbústøðunum skulu vera útatvend og bjóða býnum og borgarum inn o.s.fr. Ovara høllin er serstøk m.a. við góðum ljósi og útsýni til garðin í Finsen. Ein vandi við at gera myndlistaverkstað er, at virksemi verður ov innatvent og ikki uppnær endamálinum m.a. um at fáa lív í umhvørvi kring Finsen.

Tí er neyðugt, um avgjørt verður at fara víðari við hesi verkætlan, at umsitingin í dialoginum við listafólkini fær greinað, hvørt virksemi kann skipast soleiðis, at tað kann innganga í visjónina um útatvent virksemi, sjónliggera list, framsýningar o.a.
Hartil er hóskandi at verkætlanin verður gjørt tíðaravmarkað og eftirmett t.d. innan 1 ár.

**Grafiska listaverkstaðið í Finsen (listgrafo)**
Er longu lutvíst staðsett og íverksett í hæddini undir auluni.  Er ætlað til verkstað hjá listafólki innan grafikk (sí mynd og tekning). Hølini tilhoyra Bústaðir, men eru ætlaði til mentanarligt endamál,  har tað verður rindað fyri rakstur og bygningsviðlíkahald, men ikki beinleiðis leiga.

Ætlanin er at gera avtalu við felagið fyri listagrafikarar. Hugsanin er áhugaði søkja um upptøku til at brúka hølini hjá felagnum sbrt. upptøkureglugerð sbrt. avtalu við kommununa um upptøku, skipan og gjald. Hugsanin er at rindast skal fyri hølini.
Samskift hevur verið við teknisku fyrisiting/Húsaumsitingina um standin av hølunum v.m. Ætlanin er at halda fram við greiningunum og fáa endaliga avkláring í mai 2017. Áðrenn verkætlan kann fremjast er

neyðugt at endalig avtala kemur við Bústaðir um bygningsviðlíkahald o.a.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða nærri frá fyribils metingum viðv. uppstartskostnaðum og rakstri av hølunum, umframt tíðarætlan.

Eins og fyri møguliga myndlistaverkstaðið, er hóskandi at skipa verkætlanina sum eina tíðaravmarkaða roynd og við eftirmeting.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a) at viðgera um farast skal víðari við fyrireiking av verkætlan um listagrafiskan verkstað og herundir samráðingar við avvarðandi felag um treytir v.m. fyri virkseminum
b) at viðgera um farast skal víðari við fyrireiking av verkætlan um myndlistaverkstað og herundir samráðingar við avvarðandi felag um treytir v.m. fyri virkseminum.

**Mentamálanevndin 3. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum a og b.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið á fundi við umboð fyri Føroysk myndlistafólk og ListGraFo. Hesi hava latið inn uppskot/frágreiðing um, hvussu tey kundu hugsað sær at virka í hølunum í Finsen. Sí hjáløgdu skjøl.

Ein avbjóðing, sum serliga tykist gera seg galdandi fyri listgrafiska verkstaðin, er húsaleigan. Enn er ikki endaliga greitt, hvør fermetrakostnaðurin verður fyri raksturin av í listgrafisku hølunum og myndlistaverkstaðnum, men fyri tað fyrra helst nakrar túsund kr. um mánaðin og tað seinna nakað hægri.

Í tí sambandi hevur samband eisini verið við Tórshavnar Kvøldskúla um til ber at kombinera

skeiðvirksemi hjá skúlanum við virksemið hjá listgrafiska felagnum. Skúlin er sum útgangsstøði jaligur um hetta, og letur tað upp fyri virksemi, ið kann vera ymiskar tíðir á degnum gjøgnum alla vikuna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til, at umsitingin kemur við endaligum tilmæli til fundin í september.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti 8. november 2017:**
Viðv. listgrafiska verkstaðnum

Samskifti hevur verið við felagið Listgrafo og Kvøldskúlan um møguleikarnar. Felagið ynskir at hava hølini burturav og sigur seg vera til reiðar at rinda fyri kostnaðin av hølunum. Endaligi kostnaðurin er treytaður av brúksavtaluni millum Bústaðir og kommununa. Hesin kemur til viðgerðar í fíggjarnevndini 15. november 2017. Hølini vera ætlandi tøk seinni í november. Ávíst ivamál er um tørv á útsúgving til arbeiðið við vandamiklum løgi. Hetta er ikki kostnaðarmett.

Fyrivarni hjá umsitingini fyri hesi loysnini er mest um nýtslan av hesum serstaka høli verður nóg nógv til at felagið burturav skal hava tey.

Viðv. Myndlistaverkstaðnum

Samskifti hevur verið við Føroysk myndlistafólk um møguleikarnar. Umrøtt hevur verið antin at skipa tað sum verkstøð fyri tey sum eru at rokna sum yrkislistafólk. Hin møguleikin er at skipa virksemi meiri sum ein verkstað fyri yngri listafólk, ið ikki eru at rokna sum yrkislistafólk ella eina samanseting av báðum. Um fyrra loysnin verður valt metir umsitingin at tað er best um felagið sjálvt gerð avtalu við kommununa um virksemi og tekur sær av umsitingini av hølunum, upptøku v.m. Sum er eru hølini ikki klár at taka í nýtslu. Ymiskar ábøtur eru neyðugar. Herundir serliga viðv. brunaviðurskiftum, umframt aðrar ábøtur innan HVS, el v.m. Mett verður hóskandi at fáa ráðgeva at gera eina lýsing av viðurskiftunum. Umsitingin greiðir nærri frá hesum á fundinum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin kemur við tilmæli til komandi fund.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti**

**Viðv. Listgrafiska verkstaðnum**
Samráðingarnar við Bústaðir um brúksavtalu fyri Listatornið í Finsen eru lidnar og kemur málið ætlandi fyri í fíggjarnevndini í desember. Í rundum tølum fevnir fyrrv. Evningsstovan, um umleið 1/3 av fermetrunum í Listatorninum og skal felagið tá rinda umleið 5.000 kr. / mánaðin íroknað el&hita fyri hølini.

Samstundis verður mett, at tað hevði verið ynskiligt, um listgrafiska undirvísingin hjá Kvøldskúlanum var í somu hølum. Umsitingin og Kvøldskúlin meta at tað hevði verið ein fyrimunur og hevði kunna økt um nýtslustigið, umframt at Kvøldskúlin so kann nýta verandi listgrafiska hølið til onnur undirvísingarendamál. Eisini verður mett, at ein møgulig avtala eigur at vera tíðaravmarkað t.d. til 2 ár ella at hava møguleika fyri uppsøgn við rímiligum skotbráði.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til og gera tilmæli til fíggjarnevndina um:
a). hvørt Listgrafo skal fáa í boði leigusáttmála

b). hvørt Listgrafo og listgrafiska virksemi hjá Kvøldskúlanum eigur at vera í felag í hølunum

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Samtykt at taka undir við loysn b og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva fyrireikað arbeiðsætlan og kostnaðarætlan fyri Myndlistaverkstaðið í Finsen. Sí hjálagt kostnaðarmeting v.m. Talan er um metingar, ið skulu takast við ávísum fyrivarni. Eisini hevur verið samskift við Byggi- og umhvørvisdeildina viðv. fyritreytum og krøvum um í mun reglurnar í byggikunngerðini fyri Føroyar.

Samanlagt er samlaða metingin fyri hondverkaraútreiðslur (HVÚ) 524,7 tkr., umframt ráðgeving (ca. 6% av HVÚ) og ókent (ca. 15% av HVÚ) og MVG (6,25% av øllum postum). Møguliga kunnu einstakir postar takast út.

Støða er ikki tikin til fígging av verkætlanini.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla mentamálanevndini til at viðgera metingina og taka støðu til um um farast skal víðari við ætlanini.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur spurt ráðgevan um hvat kostnaðurin vildi verið um ovara høllin verður umvæld, men ikki niðara. T.v.s. hvat krevst av umvælingum v.m. í trappuøkinum upp til ovaru høllina. Metingin er at 496 tkr. koma aftur í hondverkaraútreiðslum, umframt kostnaðurin til ráðgeving, ókent og mvg. T.v.s. uml. 631 tkr. Sí hjálagt tilfar.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin lata hervið nevndini hesar upplýsingar til umrøðu við atliti til møguligt tilmæli á komandi fundi.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Umrøtt.

Ískoyti
Vísandi til samtyktina í mentamálanevndini 29. november 2017 hevur samskifti verið við Listgrafo um samhýsing í hølunum í Finsen saman við Kvøldskúlanum. Sí hjálagt uppskot til avtalu.

Fyri at fáa hølini klár til endamálið hjá Listgrafo og Kvøldskúlanum er neyðugt við ymiskum ábótum o.a. Hetta er mett til umleið 100 tkr. og verður ætlandi framt innan raksturin hjá Kvøldskúlanum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka undir við uppskotinum til avtalu og beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Ískoyti**
Málið er nú gjøgnumgingið av nýggjum saman við Húsaumsitingini, umframt at ráðgevin hevur samskift við byggivaldið um fyritreytirnar í verkætlanini. Byggivaldið boðar frá, at arbeiðast kann víðari við verkætlanini, tó so, at endaligt byggiloyvi skal fáast til vega, áðrenn farið verður í gongd.

Um ynski er at fara í gongd við at gera myndlistaverkstað í ovaru høllini, eru hondverkaraútreiðslurnar (HVÚ) mettar til 524,7 tkr. umframt ráðgeving (ca. 6% av HVÚ), ókent (ca. 15% av HVÚ) og kommunalt MVG (6,25% av øllum postum). Um farið verður undir arbeiðið í ovaru høllini og ikki samstundis undir arbeiðið í niðaru høllini, er neyðugt at gera trappuuppgongdina millum báðar hallirnar. Metingin fyri tað arbeiðið er 496 tkr., umframt somu postar til ráðgeving, ókent og kommunalt mvg. Samanlagt gevur tað umleið 1,3 mkr.

Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión. Arbeiðið kann hóskandi verða boðið út í mai/juni til at verða útint tíðliga í heyst.

Við atliti til at fáa góðar prísir verður mett best, um arbeiðið í ovaru høllini var gjørt samstundis sum arbeiðið í niðaru høllini t.e. virknishøllini í Finsen – sí mál 17/01362, men er tað ikki alneyðug trey og krevur meirfígging uppá uml. 1,5 mkr.

Á løgukonto 5775 eru tøkar 921 tkr. fluttar frá verkætlan L57027 frá 2017 – sí mál 16/03404. Restin av fíggingini til verkætlanina, uml. 400 tkr., verður skotið upp at fíggjað av løgukonto 5775, smærri ítróttaanlegg, har 1,5 mkr. eru tøkar.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðari á Húsaumsitingini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara undir útboð av arbeiðinum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 23. apríl 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Heðin Mortensen og Halla Samuelsen atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini og játta kr. 921 tkr., ið eru tøkar fluttar frá verkætlani L57027 frá 2017 umframt 400 tkr. av løgukonto 5775, smærri ítróttaranlegg, sum eykajáttan til arbeiðið. Málið beint í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum og mæla til at fara aftur til upprunaætlanina at nýta hølini til alment innandura spæliplláss.

**Ískoyti:**
Í skrivið dagfest 17. mai 2018 hava býráðslimir fyri Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin ynski um at fáa málið um hølisviðurskifti hjá Listgrafo á skrá til fyrst komandi býráðsfund.

**Viðv.sáttmála við Listagrafo um leigumál í Finsen, sum er góðkendur í bæði mentamálanevnd og fíggjarnevnd**.

Undirritaða fer vegna Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin í Tórshavnar Býráði at biðja um at fáa eitt mál á skrá á næsta býráðsfundi. Tað snýr seg um leigusáttmálan, sum er gjørdur við felagsskapin Listagrafo um leigumál í Finsen.

Og sum eisini fevnir um, at Kvøldskúlin skal arbeiða har ávís avtalaði tíðspunkt. Hesin sáttmálin er sum skilst góðkendur tann 24. Apríl í ár.

Sum skilst hava tey nú fingið boð um, at tey ikki sleppa inn har kortini.

Hesum kunnu vit í andstøðuni ikki taka undir við. Tí hetta er ein tilgongd, sum hevur staðið uppá í nógv ár. Og tey hava bíðað í tolni eftir avtaluni, sum er staðfest í einum av bæði Mentamálanevndini og fíggjarnevndini góðkendum sáttmála – og sum listabólkurin eisini hevur góðtikið.

Soleiðis kann mann ikki fara við fólki, felagsskapum og skúlum – og tað kunnu vit í andstøðuni ikki góðtaka.

Tað verður víst til, at Skúlin á Fløtum skal disponera yvir hølunum. Vit hava sum andstøða ferð eftir ferð víst á, at sjálvandi skulu vit gera alt vit eru ment til tess at Skúlin á Fløtum kann húsast á so fáum matriklum sum møguligt, meðan bygt verður. Og júst tú skutu vit upp, at Skúlin á Fløtum fekk Gamla realskúla at húsast í, inntil byggjaríið verður liðugt. Tá ber so til at gera Gamla realskúla um til ein dagstovn. Tørvurin á dagstovnaplássum eigur at verða loystur á annan hátt beint nú – til dømis við at brúka allan brúna Skúla til endamálið.

Vit fara tí at krevja málið á næsta býráðsfund, soleiðis at vit kunnu samtykkja, at Býráðið heldur gjørdar avtalur og sáttmálar við Listabólkin Listagrafo og við Kvøldskúlan.

Vinarliga
Vegna Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin í Tórshavnar Býráði
Helena Dam á Neystabø
Heðin Mortensen
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bjørghild Djurhuus og
Annfinn Brekkstein

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Síðani viðgerðina seinast hevur samskifti verið millum Tórshavnar kommunu og Listgrafo um viðurskiftini og hvør onnur møgulig hølisloysn kundi verið hóskandi til virksemi felagsins. Felagið metir, at niðara høllin í Finsen og hjárúmið norðanfyri eru meiri áhugaverd enn ovara høllin og hjárúmini har. Felagið ynskir ein leigusáttmála um hølini skjótast tilber. Í máli 17/01362 Virknishøll í Finsen er innleiðandi viðgjørt at gera eina virknishøll í niðaru høllini í Finsen.

Í sambandi við fyrireiking av málunum eru ávegis tekniskar greiningar og kostnaðarmetingar gjørdar av ráðgeva og Húsaumsiting fyri bæði niðaru høllina sum virknishøll og í sambandi við hetta málið um listaverkstøð. Mett verður, at tað lutfalsliga skjótt ber til at fáa greinað viðurskiftini viðv. við atliti til at broyta endamál og ístaðin gera listaverkstøði í niðaru høllini ístaðin teirri ovaru høllini.

Í næstum kann farast í samráðingar við Listgrafo um innrætting og krøv til hølini, soleiðis at neyðug teknisk

fyrireiking og byggimálsviðgerð kann fremjast, sum so síðani kann vera grundarlag fyri einum leigusáttmála.

Harumframt kann eisini eftirfylgjandi farast í samráðingar við Myndlistafelagið um møguleikan fyri myndlistaverkstaði í parti av niðaru høllini í Finsen.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til:

a) um farast skal í samráðingar við Listgrafo við tí endamáli at gera leigusáttmála og fyrireika listgrafiskan verkstað í parti av niðaru høllini í Finsen,

b). um farast skal í samráðingar við Myndlistafelagið um at gera leigusáttmála og fyrireika myndlistaverkstað í parti av niðaru høllini í Finsen.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir a) og b).

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, mæla til at halda fast í uppskot í skrivi, dagfest 17. mai 2018, sum gongur út uppá at Býráðið heldur gjørdar avtalur og sáttmálar við Listabólkin Listagrafo og við Kvøldskúlan .

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn tekur undir við Mentamálanevndini.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur undir við minnilutanum í Mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Helenu Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam:

Mælt verður til at halda fast í uppskoti í skrivi 17. mai 2018, sum gongur út uppá, at býráðið heldur gjørdar avtalur og sáttmálar við Listabólkin, Listagrafo og við Kvøldskúlan.

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti:

Fyri atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

Síðani varð atkvøtt um samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndini 20. juni 2018, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**
Listaverkstøð
Umsitingin hevur verið í samskifti við Listgrafo um málið. Felagið er nú sinnað til at viðgera møguleikan fyri at gera listaverkstøð í ovaru høllini og ynskir at fara í samráðingar um tað.

Ovara høllin er nakað størri enn niðara av tí at fleiri hjárúm eru. Tí er møguliga møguligt at kombinera listagrafisk virksemi við annað listaverkstaðarvirksemi. Hetta verður ætlandi kannað nærri í komandi tilgongdini.

Betri møguleikar fyri framsýning/gallarívirksemi fyri yrkislist í býnum
Listgrafo hevði upprunaliga ætlanir um at hava samansett verkstað og framsýningarhøli, men av tí at talan nú er um ovaru høllina setur felagið fram ynski um at kommunan betrar um møguleikarnar hjá yrkislistafólki til at framsýna og eisini selja sína list. Til komandi fund kemur tilmæli um, hvussu hetta kann fremjast, bæði uppá stytri og longri sikt og soleiðis styrkja um møguleikarnar fyri at yrkislistafólk kunnu virka og annars geva borgarum og vitjani høvi til at síggja nútíðarlist í góðum umstøðum.

Henda ætlanin hongur í stóran mun saman við ætlanunum um virknishøll í hinari høllini í Finsen, sí tilmæli um tað. Neyðugt verður við eyka fígging til endamálið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini til at gera uppskot til leiguavtalu við Listgrafo um leigumál um listaverkstøð í meginpartinum av ovaru høllini, møguliga samansett við annað listavirksemi.
b). at heimila umsitingini at fara undir útboð av umvælingararbeiðinum av ovaru høllini.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Samtykt at taka undir við b.

**Ískoyti**
Umsitingin er í holt við tilgongdina at bjóða umvælingina av ovaru høllini út. Hetta við endamálinum at hava listaverkstøð har.

Listgrafo hevur 1. februar 2019 fráboðað, at tey ynskja niðaru høllina til listaverkstøð.

Mett verður ikki hóskandi at býta virksemi um millum ovaru og niðaru høllina í Finsen. Fyrst og fremst vegna atkomuviðurskiftini, ið mugu vera sera høgligt til virknishøllina um hon skal kunnu brúkast til skúla, dagstovnar, frítíðarskúlar og virkni hjá borgarum v.m. Umframt at endaliga byggiloyvið til ovaru høllina vil hava avmarkingar viðv. tali av fólki í høllini, ið kann vera torført at hondhevja við eini virknishølll í teirri ovaru høllini.

Helst er betri at kanna víðari um onnur staðseting kann finnast til listgrafiskt virksemi. Verkætlanin viðv. listaverkstøðum verður síðani fyrireikað víðari, men til annað listaverkstaðarendamál enn listgrafiskt virksemi.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at halda fast við samtyktina um at listaverkstøð í ovaru høllini og at farið verður undir víðari kanningar um listagrafiskavirksemi hjá Listgrafo kann hýsast aðrastaðni.

**Mentamálanevndin 13. februar 2019:** Samtykt at halda fast við samtyktina um listaverkstøð í ovaru høllini í Finsen.

**Ískoyti**
Viðv. útboði av umvælingararbeiðinum
Tilgongdin er ávegis og væntast klárt til næsta fund. Sí eisini mál 17/01362 Virknishøll í Finsen.

Viðv. listverkstaði í ovaru høllini í Finsen
Listgrafo hevur nú boðað frá, at tey taka av møguleikanum fyri at brúka ovaru høllina í Finsen og at tey ynskja samráðingar um avtalu uppá rímiligar treytir. Umsitingin metir, at tað er hóskandi at virksemi verður kombinerað við listgrafisk virksemi hjá Tórshavnar Kvøldskúla. Hetta verður fyri tað mesta avmarkað til stutt skeið og burdi væl kunna virka saman við virkseminum annars har. Eisini verður mett hóskandi at partur av hølunum verður gjørt tøkt til annað listarligt virksemi og at farið verður í dialog við Myndlistafelagið um menning av tí konseptinum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara í samráðingar:
a). við Listgrafo um brúksavtalu um listagrafiskan verkstað í ovaru høllini og
b). við Myndlistafelagið um listaverkstøð í ovaru høllini.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið á fundi við Listgrafo og Myndlistafelagið um listaverkstøð í ovaru høllini í Finsen.

**Viðv. Listgrafo**
Felagið vísir á ymiskar vansar viðv. hølunum og vísir harumframt á, at vánirnar fyri kunna koma inn í hølini er væl út í 2019. Tí ynskir felagið heldur sum fremsta ynskir at bíða eftir at sleppa inn í hølið tey upprunaliga høvdu fingið uppskot til leigusáttmála um – nevniliga evningstovnuna undir Auluni í Finsen. Tey hølini eru í løtuni ein 3. fl. hjá Skúlanum á Fløtum og verða tøk aftur á sumri 2020. Onnur alternativ vildu verið í kjallarahæddini í Skansastovu, men er har avbjóðingin at Tøkum lætt hevur brúksavtalu um hølini einaferð um vikuna, umframt at felagið eisini nevnir høli í norðara bygninginum á Bacalao.

**Viðv. Myndlistafelagnum**
Dialogurin er nógv tengdur at viðurskiftunum hjá Listgrafo, ið fevnir um fleiri av somu fólkunum. Felagið arbeiðir samstundis saman við LISA viðv. møguleika fyri at fáa listaligt virksemi í Hoydølum, umframt at felagið nevnir møguleika fyri listaverkstøðum í norðara bygninginum á Bacalao. Felagið ynskir fegin at halda fram við dialoginum í næstum.

**Viðv. útboði av umvælingararbeiðinum av ovaru høllini**
Umsitingin greiðir frá kostnaðarmetingunum v.m.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja at lata Listgrafo sama leigusáttmála um evningstovnuna, sum felagið hevði í boði 2017, men galdandi frá sumri 2020, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 03. apríl 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Víst verður til ískoyti í máli 17/01362 Virknishøll í Finsen.

**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Ein meiniluti Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

Ein minniluti Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Ein meiriluti, annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í Mentalamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við málinum og mælir til at halda fast við upprunaligu ætlanina at brúka báðar hallirnar til innandura spælipláss.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Trónda Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helenu Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinni Brekkstein um, at hallirnar í Finsen verða brúktar til innandura spælipláss sum uppruna ætlanin var, og at peningurin verður játtaður til tað endamálið, ið fall við 6 atkvøðum fyri, 7 atkvøðum ímóti og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen, og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, sum varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen, og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**
**Skipan av listaverkstaðnum**
Arbeiðið við at umvæla ovaru høllina í Finsen gongur sína gongd og verður ætlandi liðugt í mars 2020. Umsitingin hevur havt fund við Føroysk Myndlistafólk um, hvussu tey meta verkstaðið skal skipast. Felagið hevur áður sýnt áhuga at standa fyri virkseminum, men metir, at um talan skal vera um eitt konsept fyri bæði yrkislistafólki og onnur, so meta tey tað betri at virksemi er skipað undir kommununi, men at tey vilja viðvirka til at menna konseptið og síggja eisini áhugaverdar møguleikar í at yrkislistafólk og onnur t.d. lesandi og spírar húsast í somu hølum. Fyri at fáa eitt slíkt konsept at virka, er hóskandi at royna seg stigvíst fram og gera hóskandi tillagingar so hvørt

**Rakstur**
Hølini í ovaru høllini, íroknað hjárúm eru umleið 350m² og verður roknað við at árligu útreiðslurnar til el, hita, samskipan og ávísa reingerð eru uml. 150 tkr./árið. Hetta inniber at hølini helst skulu hava eina nøkulunda tilsvarandi inntøkur, umframt at roknast má við ávísum útreiðslum til at byrja virksemi. Mett verður at umleið 10 básar kunnu vera í listaverkstaðnum.

Innan mentamálaøkið er rakstrarøkið nevnt Mentanarhølir í miðbýnum. Mett verður hóskandi at hetta økið fær listaverkstøðini at umsita.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at fyrireika endaligt konsept við reglugerð, gjaldskrá v.m. fyri einum listaverkstaði, ið bæði bjóðar fram at hýsa yrkislistafólki og øðrum listafólki

b). at listaverkstaðið verður skipað undir Mentanarhølum í miðbýnum

og at venda aftur til nevndina í 2020 við málinum til endaliga støðutakan.

**Mentamálanevndin 27. november 2019:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, atkvøða blankt.

**Ískoyti:**
Umvælingararbeiðið í hallunum í Finsen gongur sína gongd, og ovara høllin verður væntandi klár at taka í nýtslu í apríl/mai 2020.

Mentanarhølir í miðbýnum og umsitingin eru í holt við at fyrireika nýtslutøkuna og herundir gera uppskot til, hvussu hølini vera skipaði og innrættaði. Sí hjálagt uppskot til reglugerð. Hugsanin er, at reglugerðin verður send til ummælis hjá Føroyskum myndlistafólkum og øðrum viðkomandi pørtum. Til at gera hóskandi uppbýti í básar v.m. í listaverkstaðnum, umframt ymiskar útreiðslur ísv. uppstart av hølunum er neyðugt við uml. 110 tkr.

Hugsanin er, at inntøkurnar frá brúksleigumálunum fara til rakstur av tilboðnum (t.e. el&hita, reingerð og umsiting o.a.)

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:
a). at senda hjálagda uppskot til reglugerð til ummælis.
b). at játta 110 tkr. av kontu 5366 Stuðul annars til kontu 5312 Mentanarhølir í miðbýnum.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Uppskotið til reglugerð hevur verið til hoyringar hjá Føroyskum myndlistafólkum og LISA, ið eisini var biðið um at senda til viðkomandi limafeløg.

TK hevur fingið hesar viðmerkingar frá Føroyskum myndlistafólkum:
*“Vit hava bert eina viðmerking, tað er til orðið listasøgufrøðing í §3, stk. 2.*
*Kanska tað er betur at tað stendur listakønur í staðin, so ber til at eitt listafólk kann sita har, og ikki einans "akademikari".”*

Umsitingin metir at henda viðmerking kann takast til eftirtektar.

Meting:
Við støði í tí er gjørd dagføring í reglugerðini, sí dagført uppskot hjálagt.

Nýtslutøkan av hølunum verður nú fyrireikað, og í endanum av apríl verður ætlandi lýst við møguleikanum at søkja um at leiga bás í hølunum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja dagførdu reglugerðina.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2020**: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Minnilutin (Javnaðarflokkurin í Tórshavnar Býráði) krevur, at málið um leigusáttmálan við ListGrafo um Evnishølini í Finsen kemur til viðgerðar á næsta Býráðsfundi tann 24. September við møguleika fyri at atkvøða, um at leigusáttmáli verður gjørdur við ListGrafo um evnishølini í Finsen. Ein natúrlig avleiðing av hesum er, at nýggj høli verða útvegað til Talvsambandið.

**Lýsing av málinum um Listafólkafelagsskapin ListGraFo og Tórshavnar Kommunu.**
Á seinasta regluliga býráðsfundi í juli mánaði umrøddu vit málið um hølisviðurskiftini hjá felagsskapinum Føroyskir Listgrafikarar, ListGraFo, sum í mong ár hevur bíðað eftir, at avtala, sum varð gjørd um gomlu evnisstovuna í Kommunuskúlanum (nú Finsen), skuldi verða sett í verk.

Longu í 2015 varð avtala gjørd við ListGrafo um, at tey skuldu sleppa inn í hesi høli við øllum teirra sera tungu og virðismiklu útgerð, av tí at tey máttu fara út hølunum í Kongagøtu, tá húsið varð selt.
Hølini í Kommunuskúlanum/nú Finsen vórðu innrættað til endamálið. Neyðugir hentleikar eru har, og ikki minst umstøður til at seta stór og sera tung amboð upp. Hølini egna seg í allar máta væl til endamálið, eins og stóri sýnisgluggin tryggjar at listaverkini kunnu koma almennninginum til gleði og gagn. Nú ið listafólkaklivar eru skipaðir í fimleikahøllini í Finsen, er tað uppaftur meira sjálvsagt at grafiski verkstaðurin verður júst har.

Í 2016 gjørdi býráðsmeirilutin av, at hølini skuldu brúkast til fyribils skúlastovu til tey yngru skúlabørnini, meðan Skúlin á Fløtum verður bygdur. Vit royndu at fáa í lag, at listafólkafelagsskapurin kundi sleppa inn beinan vegin, og at onnur loys varð funnin til fyribils skúlastovu. Men tað fekk ikki undirtøku í meirilutanum, og vit viðurkendu eisini, at tað hevði týdning, at næmingarnir í Skúlanum á Fløtum fingu hóskandi undirvísingarhøli.

Tað var týðiliga og greitt avtalað, at tá ið Skúlin flytir inn á Fløtum, skuldi listafólkafelagsskapurin so aftur sleppa inn í evningsstovuna. Og í 2018 varð uppskot til leigusáttmála viðgjørt og góðkent í bæði mentamálanevd og fíggjarnevnd. Og felagsskapurin Listgrafo boðaði frá, at eisini tey góðtóku uppskotið til leigusáttmála. Men knappliga broyttist støðan. Og býraðsmeirilutin vildi eftir øllum at døma ikki standa við leigusáttmálan longur.

Maskinur og útgerð teirra er í stórum vanda fyri at forfarast í vánaligum umstøðum í bingjum uppi á Sandvíkarhjalla. Og tað má sigast at hesin felagsskapur av framstandandi og dugnaligum listafólkum hevur verið tolin og bíðað nú í nógv nógv ár, tí júst hesi høli eru tey best egnaðu í allar mátar.

Nú í 2020, nakrar mánaðir áðrenn skúlin flytir út á Fløtir, hevur meirilutin í Býráðnum avgjørt, at listafólkafelagsskapurin kortini ikki sleppur inn í evningsstovuna, sum tað hevur verið meiningin í nógv ár. Nú er tað Tavfelagið sum skal leiga hesi høli – og harafturat til ein nógv nógv lægri leigukostnað, enn Mentamálaumsiting Býráðsins kravdi frá listafólkabólkinum Listgrafo.

Vit í Javnaðarflokkinum ivast nógv í, um tað er farið rætt fram, tá ið avtala um leigusáttmála verður undirskrivað, hóast vit á Býráðsfundi hava kravt málið fyri næsta býráðsfund, og vit mótmæla teirri viðferð, sum Listafólkabólkurin ListGrafo hevur fingið frá býráðssamgonguni.

Tey eru nú enn einaferð heimleys, vandi er fyri at útgerðin forferst, og tey verða send runt í býnum at hyggja at hølum, sum øll vita, at tey kortini ikki fáa hendur á. Sjálvsagt skulu vit eisini hýsa Talvfelagnum, og eingin ivi er um, at har eru hópin av møguleikum til tess. Men nú verða hesir báðir felagsskapir spældir út móti hvørjum øðrum, sum hvørgin teirra ynskir. Ein loysn skal finnast á báðum.

Men vit mótmæla mannagongd og viðferð, sum kommunan hevur víst ListGrafo, og krevja málið fyri Býráðsfund tann 24. September 2020, við møguleika fyri at atkvøða um Býráðið er sinnað at halda gjørdar avtalur viðListGrafo, og at finna aðra loysn á leigumáli við Talvsambandið.
Vegna
Javnaðarflokkin í Tórshavnar Býráði

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Í máli 19/01969 Tøkir skúlabygningar 2019-2020 samtykti mentamálanevndin 9. september 2020 "At fáa greinað um tað ber til at sameina virksemi hjá Gigni og Listgrafo í Gula skúla og fyritreytirnar fyri tí."

Umsitingin viðgerð málið og fer ráðgevi væntandi undir greiningar um mánaðarskiftið og er ætlanin at ein meting verður tøk í nov.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
Helena Dam á Neystabø hevur biðið um at fáa til viðgerðar í mentamálanevndini at geva ListGrafo innivist í evningshølinum í Finsen.

**Mentamálanevndin 26. oktober 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, taka ikki undir við at geva ListGrafo innivist í evningsstovuni, tí at kommunan hevur gjørt leiguavtalu við Havnar Telvingarfelag í sama hølið.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Heðin Mortensen, beinir málið í býráðið við áheitan um at gera avtalu við ListGrafo um innivist í evningsstovuni í Finsen.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Atkvøtt varð um uppskot frá Heðin Mortensen um at beina málið aftur í Mentamálanevndina, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Víst verður til tekst og tilmæli í máli 17/01362 Virknishøll í Finsen.

**Mentamálanevndin 12. mai 2021:** Víst verður til samtykt í máli 17/01362.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 170/21 Virknishøll í Finsen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 107/17 | 17/01362-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 174/17 | 17/01362-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 5/18 | 17/01362-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 357/18 | 17/01362-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 352/18 | 17/01362-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 5/19 | 17/01362-1 |
| 7 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 313/18 | 17/01362-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 84/19 | 17/01362-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 03.04.2019 | 117/19 | 17/01362-1 |
| 10 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 150/19 | 17/01362-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 186/19 | 17/01362-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 207/19 | 17/01362-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 192/19 | 17/01362-1 |
| 14 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 140/19 | 17/01362-1 |
| 15 Býráðsfundur | 04.07.2019 | 173/19 | 17/01362-1 |
| 16 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 318/19 | 17/01362-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 4/20 | 17/01362-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 44/20 | 17/01362-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 40/20 | 17/01362-1 |
| 20 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 36/20 | 17/01362-1 |
| 21 Mentamálanevndin | 15.04.2020 | 118/20 | 17/01362-1 |
| 22 Mentamálanevndin | 22.06.2020 | 190/20 | 17/01362-1 |
| 23 Býráðsfundur | 11.06.2020 | 118/20 | 17/01362-1 |
| 24 Mentamálanevndin | 12.05.2021 | 126/21 | 17/01362-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 113/21 | 17/01362-1 |
| 26 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 142/21 | 17/01362-1 |
| 27 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 170/21 | 17/01362-1 |

**Málslýsing:**
Í samgonguskjalinum er m.a. ásett: “**Framsøknan ítróttarpolitikk -** Ítróttur og rørsla hava stóran týdning fyri trivnaðin í kommununi. Møguleikarnir fyri ítrótti verða áhaldandi útbygdir bæði fyri breiddina og úrvalsítrótt.“

Nú Finsen í næstum verður liðugt, er hugsan frammi um at lata niðaru fimleikahøllina í Finsen (fyrrv. kommunuskúlanum) til virknis- rørsluendamál. Sí hjálagdar myndir og tekning av hølunum.

Høllin er partur av høvuðsumvælingin av Finsen til lestrarbústaðir hvat viðvíkur útveggum, vindeygum og taki, men er annars ogn hjá kommununi. Høllin fær hita frá Finsen. Samráðingar eru í gongd við Bústaðir um bygningsviðlíkahald uttan, hita o.a.

Skotið verður upp at høllin verður í dagtíð tøk hjá skúlanum og frítíðarskúlanum hjá Eindini í Kongagøtu hjá Skúlanum á Fløtum og frítíðarskúlanum í Sankta Frans skúla, umframt dagstovnum í økinum. Høllin kundi eisini í dag verið tøk hjá eldraøkinum at brúkt til virknistiltøk hjá Heilsuhúsinum. Eftir uml. kl. 16 ella 17 kundi høllin verið tøk at leiga hjá borgarum, fyritøkum o.s.fr., ímóti gjaldi at kunna brúka høllina til alskyns spæl, ítrótt, rørslu o.a., t.d. til fótbólt, kurvabólt, flogbólt, fimleik og aðra likamsvenjing.

Í sunnara enda av høllini er eitt goymslurúm, sum kann rúma ymiskum reiðskapi, tólum o.ø. Í norðara enda eru eisini rúm. Høllin kemur at vera hædd um hædd við virksemi á ovaru hæddini og er málið at hesi kunna og megna at virka lið um lið.

Sbrt. núverandi praksis vildu skúlarnir og frítíðarskúlarnir ikki rindað fyri nýtslu, meðan aðrir brúkarabólkar/eindir vera at rinda ásett tímagjald sbrt. galdandi gjaldsskrá hjá Ítróttaanleggum. Bílegging v.m. vildi farið fram á www.hallirvallir.fo. Hugsanin er at høllin sum útgangsstøði ikki verður disponerað til fast virksemi hjá t.d. hondbólts-, flogbólts- og fimleikafeløgunum.

Samskift hevur verið við teknisku fyrisiting/Húsaumsitingina um standin av hølunum v.m. Ætlanin er at halda fram við greiningunum og fáa endaliga avkláring í mai 2017. Sannlíkt er at ávísir kostnaðir eru av at fáa høllina brúkiliga.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða nærri frá fyribils metingum viðv. uppstartskostnaðum og rakstri av hølunum, umframt WC-bygninginum, ið er partur av hallunum. Málið er at raksturin í stóran mun kann verða fíggjaður av leiguinntøkum frá brúkarum.

Henda verkætlan vil innibera at verkætlanin um innandura spæliland í hallunum í Finsen (mál 16/02253) verður slept í hesum umfari.

Við hesi verkætlan ber til at fáa eitt viðkomandi virknishøli miðskeiðis í býnum, tøk til grannalagi, tey lesandi í Finsen, býin sum heild og soleiðis eitt nú stuðla undir visjónina um tann virkna og vakna høvuðsstaðin.

Um neyðugu fyritreytirnar eru til staðar er sannlíkt, at høllin kundi latið upp í heyst.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini at viðgera og samtykkja, um farast skal víðari við fyrireiking av verkætlan um virknishøll í Finsen

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Samtykt at farast skal víðari við fyrireiking av verkætlanini. Nevndin mælir til at kanna í hvønn mun til ber at hava atgongd til frítt spæl ávísa tíð í vikuni.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mikudagin.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Útsett.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva fyrireika arbeiðsætlan og kostnaðarætlan fyri virknishøllina. Sí hjálagt kostnaðarmeting, umframt skitsur. Talan er um metingar, ið skulu takast við ávísum fyrivarni. Eisini hevur verið samskift við Byggi- og umhvørvisdeildina viðv. fyritreytum og krøvum um í mun reglurnar í byggikunngerðini fyri Føroyar.

Samanlagt er samlaða metingin fyri hondverkaraútreiðslur (HVÚ) 1.458 tkr., umframt ráðgeving (ca. 6% av HVÚ) og ókent (ca. 15% av HVÚ) og MVG (6,25% av øllum postum). Hugsanin er at starvsfólk hjá Ítróttaanleggum kunnu gera nakað av arbeiðinum og sostatt spara nakað í metingini, umframt at møguliga eru einstakir postar sum kunnu takast út.

Málið hongur lutvíst saman við máli 16/03404, ið eisini er á skrá á fundinum og har tilmæli er at flyta uml. 941 tkr. frá aðrari verkætlan til hesa. Tískil vantar nakað av fígging til at kunna fremja verkætlanina.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at viðgera metingina við atliti til at umsitingin kemur við endaligum tilmæli um verkætlanina og fíggingina til komandi fund.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Sbrt. avtaluni við Bústaðir um Finsen skal TK taka sær av lonini har hallirnar eru.

Tilmæli um hallirnar er enn í gerð og er væntandi til komandi fund, bæði viðv. virknishøll og listaverkstøðum.

Samstundis rykkir Bústaðir eftir, at ljós kemur í serliga skrellirúmið, vesirúmið og almenna garðin og metir hetta ikki kann bíða. Eisini er støðan at hallirnar standa kaldar og eru ikki íbudnar hita í verandi støðu. Í áður gjørdari meting, er HVS -(útskifta radioatorar, montering o.a). arbeiðið mett til 50 tkr.

Íbinding hjá SEV, talva, montering, o.a. er mett til 94 tkr. til samans. Við tí fæst ljós í bygningin, skrellirúmið, vesirúmið og almenna garðin. Afturat upphædddunum skal roknast umleið 10% til eftirlit o.a., 10% til ókent, umframt kommunalt MVG. Tilsamans mett til 182 tkr. Húsaumsitingin og verkætlanardeildin samstarva um verkætlanina og at fáa arbeiðstakarar at útinna arbeiðið.

Á framflutta løgukarminum L00002 eru 1.051 tkr. tøkar til verkætlanina í hallunum í Finsen.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á verkætlanardeildini, deildarleiðarin á Húsaumsitingini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fremja el&hvs arbeiði í Finsen og at flyta 1.051 tkr. á nýggja løgukontu til hallirnar í Finsen. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtyk at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Vísandi til mál 17/01362 Listaverkstøð í Finsen er aftur aktuelt at viðgera ætlanina um virknishøll í niðaru høllini í Finsen.

Fleiri fyrispurningar hava verið um innandura spæliland í Finsen, sum mentamálanevndin 11. apríl 2018 eisini viðgjørdi. Mett verður framvegis, at tær ætlanirnar ikki eru hóskandi til givnu karmarnar. Hinvegin kundi verið áhugavert at latið uttanhýsis veitara staðið fyri at gjørt nakrar royndir við tilboði um spæl og leik útvaldar dagar, men har uppsetingin er meiri avmarkað og letur seg samanseta við, at høllin annars eisini virkar sum virknishøll fyri skúla, frítíðarskúla og borgarar annars.

Til verkætlanirnar í hallunum í Finsen eru pt. tøkar: 1.051 tkr. Hetta røkkur neyvan til verkætlanirnar og verður helst neyðugt við eyka fígging til endamálið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:

a). at heimila umsitingini at fara undir útboð av umvælingararbeiðinum av niðaru høllini.

b). at heimila umsitingini at fara undir at gera útbjóðingartilfar til at reka virksemi við spæli og leiki í niðaru høllini í Finsen aftrat almennari nýtslu sum lýst omanfyri.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
**Viðv. útboði av umvælingararbeiðinum**
Tilgongdin er ávegis og væntast klár til næsta fund.

**Viðv. gerð av útboðstilfari til at reka virksemi við spæli og leiki í niðaru høllini**
Sí hjálagt uppskot til lýsing og rakstraravtalu til eina royndarverkætlan.
Á fundinum verða uppskotini gjøgnumgingin.

Hugsanin er at fara undir eina tilgongd, har áhugaði kunnu senda inn uppskot til konsept og virksemi og út frá tí verða 2-3 vald út til eitt endaumfar til at fáa møguliga avtalu við kommununa. Í hesum konseptinum liggur, at TK útvegar nærri tilskilað leikur, amboð v.m.

Ráðgeving frá fakpersóni til fyrireikingarnar
Hugsanin er at gera avtalu við ein fakpersón við vitan innan rørslu, børn og tøkni/innrætting til at ráðgeva TK viðv. málinum og at gera undankanningar viðv. hvat kundi verið hóskandi at fingið til vega. Hetta verður gjørt innan raksturin á kontu 1312 trivnaðarfyrisitingin.

Til komandi fund er ætlanin at hava eina nærri meting um væntaðan kostnað av tilboðnum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið til royndarverkætlan við atliti til at umsitingin kemur við endaligum tilmæli um útbjóðing til komandi fund.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Umrøtt. Samtykt at umsitingini arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti**
Útboðstilfarið uppá høvuðsarbeiðstøkuna viðv. umvæling av niðaru høllini (og ovaru) fór út í farnu viku til tvey byggifeløg. Tilmæli um val av  veitara verður ætlandi klárt til fundin 8. mai 2019.

Á fundinum í mentamálanevndini verður kostnaðarmeting løgd fram. Á kontu L57030 eru tøkar umleið 900 tkr., sum mett verður ikki røkkur til alt arbeiðið.

**Tilmæli**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 03. apríl 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**
Umsitingin kunnar um innkomnu tilboðini.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva gjørt liðugt projekt fyri verkætlanina í niðaru høllini og ovaru høllini (sí eisini mál 17/01361 listaverkstøð í Finsen – samtykt 13. januar 2019).

Ráðgevin hevur síðani heintað inn undirhondstilboð frá Sp/f ÁTS og Sp/f JJ Byggitænastan. Sí hjálagt skjal við neyvari upplýsingum um tilboðsupphæddir og viðurskiftini annars.

Ráðgevin hevur síðani eftirkannað tilboðini og samskift við tilboðsgevararnar og mælir til at gera arbeiðstøkusáttmála við Sp/f JJ Byggitænastuna.

Av tí at útlit ikki eru fyri fígging í hesum umfari til bæði ovaru og niðaru høllirnar, verður mett best at gera sáttmála um niðaru høllina fyrst og at málið um ovaru høllina verður tikið uppaftur í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2020 og langtíðarløguætlanina.

Sí hjálagt uppskot til arbeiðstøkusáttmála fyri niðaru høllina á tkr. 1.960.479.

Hartil koma koma útreiðslur til reinsing av veggum við turrísi, ráðgeving&eftirlit, ókent og kommunalt MVG mett til tils. 627 tkr.

Samanlagt eru útreiðslurnar mettar til 2.588 tkr.

Á projektkontu L57030 Hallirnar í Finsen eru tøkar umleið 900 tkr. tá frároknað útreiðslur til el-íbinding o.a., ið var samtykt í fjør. Tískil er fíggjartørvurin til at gera niðaru høllina umleið 1.687 tkr. Í máli 18/02446 Ljósviðurskifti við Tórsbreyt verður mælt til at flyta 400 tkr. av projektkontu L57029 Smærri ítróttaanlegg til projektkontu L57030 Hallirnar í Finsen. Til resttørvin á 1.287 tkr. verður mælt til at flyta ta upphæddina av løgukontu 6175 Umsiting og rakstur av fastari ogn (íløgur).

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at gera arbeiðstøkusáttmála við Sp/f JJ Byggitænastuna á tkr. 1.960.479 um umvælingar av niðaru høllini í Finsen og útinna verkætlanina innan ein samlaðan kostnaðarkarm á 2.577 tkr.

b). at samtykkja at heita á fíggjarnevndina um at samtykkja at flyta 1.287 tkr. av løgukontu 6275 Fríðkan av kommununi (íløgur) til projektkontu L57030 Hallirnar í Finsen.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva gjørt liðugt projekt fyri verkætlanina í niðaru høllini (virknishøll) og ovaru høllini (mál 17/01361 Listaverkstøð í Finsen).

Ráðgevin hevur síðani heintað inn undirhondstilboð frá Sp/f ÁTS og Sp/f JJ Byggitænastan. Sí hjálagt skjal við neyvari upplýsingum um tilboðsupphæddir og viðurskiftini annars.

Ráðgevin hevur síðani eftirkannað tilboðini og samskift við tilboðsgevararnar um tilboðini og mælir til at gera arbeiðstøkusáttmála við Sp/f ÁTS, um báðar hallirnar á 2.781.823 kr.

Hartil koma útreiðslur til reinsing av veggjum við turrísi, ráðgeving&eftirlit, ókent og kommunalt MVG mett til tils. kr. 897.000.

Samanlagt eru útreiðslurnar mettar til kr. 3.700.000.

Á løgukontu L57030 Hallirnar í Finsen eru tøkar umleið kr. 900.000 tá frároknað útreiðslur til el-íbinding o.a., ið var samtykt í fjør. Restfíggjartørvur er sostatt kr. 2.800.000, ið kann fáast til vega við at flyta kr. 400.000 av løgukontu 57029 smærri ítróttaranlegg ætlað betran av ljósviðurskiftum á Tórsbreyt, og kr. 2.400.000 av løgukontu 6175 Umsiting og rakstur av fastari ogn til løgukontu L57030 Hallirnar í Finsen.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at gera arbeiðstøkusáttmála við Sp/f ÁTS á 2.781.823 um umvælingar av hallunum í Finsen og útinna verkætlanina innan ein samlaðan kostnaðarkarm uppá kr. 3.700.000,

b). at samtykkja at heita á fíggjarnevndina um at flyta kr. 400.000 av løgukontu 57029 smærri ítróttaranlegg og kr. 2.400.000 av løgukontu 6175 Umsiting og rakstur av fastari ogn til løgukontu L57030 Hallirnar í Finsen.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Ein meiriluti Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Ein meiriluti, annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í Mentalamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við málinum og mælir til at halda fast við upprunaligu ætlanina at brúka báðar hallirnar til innandura spælipláss.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen, og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

Minnilutin viðmerkir, at hann ikki tekur undir við málinum og vísir ístaðin til uppruna ætlanina um at brúka hallirnar til innandura spælipláss.

**Býráðsfundur 04. juli 2019:** Samtykt við aðru viðgerð við 7 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jógvan Arge, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

Minnilutin viðmerkir eisini við aðru viðgerð, at hann ikki tekur undir við málinum og vísir í staðin til uppruna viðgerðina.

**Ískoyti**:
Arbeiðið við at umvæla ovaru høllina í Finsen gongur sína gongd og verður ætlandi liðugt í mars 2020.

Nevndin samtykki 13. mars 2019 at umsitingin skuldi arbeiða víðari við gerð av útboðstilfari til at reka virksemi við spæli og leiki í niðaru høllini í Finsen sum eina royndarverkætlan.

Komandi víðkaða dagstovnavirksemi í økinum fer ætlandi at útvega nakað av amboðum og útgerð, ið verða tøk í hølunum, umframt at Margarinfabrikkin eisini kemur at hava ávíst ungdómsvirksemi har. Tískil verður mett hóskandi at fara undir útboðið og vita hvat kemur inn av hugskotum og ætlanum. Sí hjálagt útboðstilfar v.m.

Helst verður neyðugt at útvega ávíst amboð og útgerð afturat – fyribils mett til eini 100 tkr., ið verður fíggjað av konto 5363 Stuðul til ítrótt í 2020. Somuleiðis er ætlanin at royndarverkætlan við spælitilboði verður fíggjað av somu konto.

<u>Býtið av tíðunum í høllini</u>
Hugsanin er at tíðirnar verða luttaðar soleiðis at rúm verður fyri fjølbroyttum virksemi, bæði vanliga borgaranum, eldraøkinum, ungdómsvirksemi og spælilandi, herundir spæliland serliga leygardagar, sunnudagar og aðrar frídagar.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at fara undir útboð av at reka spælitilboð í Virknishøllini í Finsen og at venda aftur til nevndina við einum tilmæli um royndarverkætlan og samstarvsfelaga.

**Mentamálanevndin 27. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Freistin at boða frá áhuga at veita spælitilboð í Finsen var úti 13. januar 2020, og 7 fólk/feløg hava víst áhuga, sí nærri i mál nr. 19/04952 útboð um spælitilboð í Finsen.
Tey, sum hava víst áhuga, eru:
Gunnhild Alstrup, Hans Korsgaard / Innspark, Sigfríður á Plógv / Tatanka, Kirstin, Esbern á Geilini, Andreas Winkler og Unn Thomsen.

Tað eru ikki øll av teimum innkomnu tilboðunum, ið eru so ítøkilig, her er ein stuttur samandráttur:
Hans Korsgaard / Innspark ger t.d. greitt í síni fráboðan, at hann kann vera partur av samstarvi sum veitari av útgerð o.a., men kann ikki taka sær av at reka tilboðið. Tilboðið er tískil ikki relevant at arbeiða víðari við í hesum umfari.

Sigfríður á Plógv / Tatanka hava í 20 ár arbeitt innan hettar økið og hava eitt lítið innanduraspæliland á Tórsgøtu 11, men tað hølið er ov lítið. Tatanka hevur alla útgerðina sum skal til longu nú, tvs. tað hevði ikki verið neyðugt at keypa serliga nógv afturat.

Esbern á Geilini / Tabletop Føroyar hevur uppskot um at gera hølini í Finsen til karmar fyri borðspølum. Fyri m.a. at tryggja borðspælarum eitt høli, geva nýggjum spælarum ein pall at royna seg á og fáa miðsavna teir vítt spjaddu bólkarnar, ið longu spæla borðspøl. Alt hetta birtir undir ta uppgongdina, sum er í borðspølum í Føroyum. Tilboðið skal vera til yngri sum eldri, roynd sum óroynd, og skal vísa ta gleðina og góðu samveruna borðspøl kunnu geva. Málbólkurin er 12 ár og eldri. Afturvendandi tiltøk verða hildin til familjur við børnum millum 6-12 ár. Hetta er samstundis eitt tilboð til rørslutarnað. Borðspøl eru so mikið fjølbroytt, at tey væl kunnu røkka øllum teimum sjey intelligensunum hjá Howard Gardner, talan kann eisini vera um rolluspøl. Tørvur er ikki á øllum 185m2 í høllini. Tað er ein møguleiki at hava ein skilavegg sum koyrir høllina í tvey, so tað er møguligt at hava eina aðra tænastu (ella aktivitet) í høllini samstundis ella aðrar tíðir. Ætlanin er at hava opið hesar tíðir: Yrkadagar kl. 17-21, vikuskifti kl. 15-21. Áhugi er at hava opið longri í vikuskiftum.

Unn Thomsen, barnaergoterapeut. Áhugin fyri spælilandi byrjaði í 2007, tá Unn búði í Beograd. Har var spæliland á hvørjum horni og fór dagliga við soninum til ymisk spælilond. Hon setti sær fyri at gera eitt spæliland, tá hon kom aftur til Føroyar og gjørdi tí eitt research har hon skrivaði saman við fleiri fyritøkum, sum bygdu hesi spælilondini og fekk tilboð uppá ymisk konsept, og skrivaði niður, alt tað sum hon helt riggaði serliga væl í hesum ymsu spælilondunum.

Gunnhild Alstrup og Andreas Winkler hava víst áhuga fyri útboðnum uttan at geva ítøkilig uppskot – men ynskja samstarv og fund við kommununa. Sambært uppskot til rakstraravtalu og teimum spurningum, ið eru svaraðir (er hjálagt), meta nøkur av teimum áhugaðu ikki at teirra tankar til at menna eitt spæliland samsvara við tær treytir, ið verða settar. M.a. í mun til, at høllin skal brúkast til annað virksemi eisini. Samanumtikið verður tí mett frægast at fara í ein dialog við fleiri av tilboðsgevarunum og fáa avklárað fleiri av staklutunum og møguleikunum og á tann hátt geva fleiri høvi til at lata inn meiri fullfíggjaði uppskot.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka undir við, at umsitingin fer í víðari dialog við Gunnhild Alstrup, Sigfríð á Plógv / Tatanka, Kirstin E., Esbern á Geilini, Andreas Winkler og Unn Thomsen, sum hava áhuga og uppskot um spæli- og virknistilboð í Finsen, og koma aftur í nevnd við einum endaligum tilmæli um samstarvsfelaga.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at verkætlanin er væl áleiðis at vera útint er umsitingin komin eftir, at tað er rættast at taka nøkur viðurskifti upp til viðgerðar. Her er talan um viðurskifti, ið tað væntandi ikki er rúm fyri hesum í avsettu puljuni til ókent.

Talan er um fylgjandi viðurskifti:

- Gólvhiti í durarnar: Havandi í huga stóra talið av brúkarum í øllum aldri, ið koma at brúka høllina, verður mett betri hóskandi at fáa lagt gólvhita í durarnar.

- Køkshentleikar: Tá spælitilboð skal vera í høllini, umframt brúk hjá barnagarðum v.m. er praktiskt at kunna gera kaffi og annað einfalt og verður tí mett hóskandi at gera ein einfaldan hentleika til tað. Ætlanin krevur eisini tillagingar viðv. gólvi og leiðingum..

- Vindfang við inngongir: Fyri at fyribyrja at regn setur inn í durarnar verður mett hóskandi at gera tvey slík eftir fyrimynd í teimum sum eru í Finsen.

Metti kostnaðurin fyri hesi átøkini eru 250 tkr.

Fígging
Á kontu 5365 verður væntandi minninýtsla í 2019 á uml. 350 tkr. og verður tí mett ráðiligt at fíggja hesi betranarátøkini av hesi kontu.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:
a). at gera betranarátøk sum nevnd omanfyri innanfyri fíggjarkarm á 250 tkr.
b). at fíggja møgulig betranarátøk av løgukarminum og at flyta 250 tkr. av konto 5365 Stuðul til ítrótt á projektkontu L57030 Hallirnar í Finsen og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina sum eykajáttan.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur verið í víðari dialog við Gunnhild Alstrup, Sigfríð á Plógv / Tatanka, Kirstin Ellingsgaard og Esbern á Geilini. Andreas Winkler og Unn Thomsen vóru ikki áhugaði at vera partur av víðari tilgongdini at reka tilboðið. Aftaná fundirnir við hesi fýra, eru tað tvey innkomin uppskot, ið vit meta eru í samsvar við ætlanirnar um royndar-verkætlanina við einum spæli- og virknistilboði í høllini í Finsen. Hesi eru:

<u>Gunnhild Alstrup</u>: Gunnhild hevur útbúgving innan innrætting við atlit til ávísar málbólkar, sum hon í hesum føri brúkar til innrætting av spæli- og virknistilboði til børn. Tilboðið verður skipa fyri børn í barnagarðsaldri, tvs. uml. 3-6 ár, og ætlanin er at deila høllina í tvey (við gardinum ella líknandi), soleiðis at ymiskt spæl er hvørjumegin. Útgerðin og leikurnar í uppskotinum hava til endamáls at stimulera sansir, balansu og motorikk hjá børnum. T.d. klintristeinar, rutsjibana, balansusteinar, eina stóra bleyta madrassu, eina lítla trampolin og annað, sum eisini kann brúkast at gera forðabreytir/bana við. Eisini vera bóltar at spæla við. Sí annars hjálagda útgreinaða uppskot frá Gunnhild Alstrup, eisini við atlit til fíggjarætlan.

<u>Sigfríður / Tatanka:</u> Hevur fleiri ára royndir innan útgerð og spæl til børn og ung. Tatanka er veitari av m.a. hoppiborgum og trampolinum, sum er ætlanin skal mynda spæli- og virknistilboðið í Finsen

sambært hansara uppskoti. Talan verður um 2-3 hoppiborgir og onkra trampolin, har børnini eru íbundin tá tey hoppa. Uppskotið hjá Sigfríður leggur upp til, at børn og familjur kunnu koma í høllina at spæla og brúka orku. Tilboðið skal skipast soleiðis, at yngri og eldri børn hava hvør sítt umhvørvið at spæla í, og er ætlað aldursbólkinum 1-10 ár. Sí annars hjálagda útgreinaða uppskot frá Sigfríður á Plógv, eisini við atlit til fíggjarætlan.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til, at umsitingin heldur fram við samráðingunum við báðar tilboðsgevararnar og kemur við einum endaligum tilmæli til komandi fund.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2020**: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 11. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt víðari samskifti við áhugaðu umsøkjararnar og hevur havt realitetssamráðingar við fylgjandi einstaklingar/feløg: Gunnhild Alstrup og Sigfríð á Plógv frá Tatanka.

Sambært uppskoti til rakstraravtalu var § 3. Royndartíðarskeiðið eitt 4-5 mánaðar tíðarskeið, sum sambært innkomnu uppskotunum til fíggjarætlan vísti seg ikki at kunna rúmast innan tøka játtan. Hjálagt eru tillagaði uppskot til rakstraravtalu við Gunnhild og við Tatanka, ið leggja upp til eina royndarverkætlan á 3 mánaðar, frá miðjan juli til miðjan oktober. Upplatingartíðirnar eru leygardag og sunnudag, millum 10-14 tímar um vikuna.

Avtalurnar hava ein nettotørv á kr. 180.000,- til útvegan av amboðum og útgerð, løn o.a. Sambært tøkari játtan er rakstraravtalan tillagað so mikið, at eini veitarin hevur boðað frá, at viðkomandi ikki góðtekur tillagaðu avtaluna og fer ikki at taka av einum møguligum samstarvi um hesa ítøkiligu royndarverkætlan.

Viðvíkjandi almennu tilráðingunum um fyribyrging av smittuspjaðing í sambandi við corona er somuleiðis óvist, um tað er ráðiligt at seta eina slíka royndarverkætlan í verk í summar. Bíðað verður eftir ítøkiligum tilmæli viðv. spælitilboðnum frá corona-ráðgevingini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, hvørt íverksetan av spælitilboðnum skal bíða til í august ella september.

**Mentamálanevndin 22. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Verkætlanin í Virknishøllini og í Listahøllini (verkstaðnum)(mál 17/01361) verður eftirmett undir einum.

Avhending av høvuðsarbeiðstøkuni í høllunum í Finsen var í juli 2020.

Umsitingin hevur eftirmett verkætlanina og metir at sum heild er arbeiðið væl frágingið og sbrt. ætlan. Arbeiðstakarin hevði ávísar avbjóðingar við at fáa útint sín leiklut sum høvuðsarbeiðstakari og var tað m.a. viðvirkandi til at verkætlanin var avhendað seinni enn ætlað.

Nú verkætlanirnar vera lokaðar kann staðfestast eitt úrslit á 37.613 kr. í minninýtslu/yvirskoti. Tó er ætlanin í vár at fáa gjørt gólvið í goymslurúminum av nýggjum við belægningi, ið hóskar seg betri til ymisku amboðini v.m., ið skulu vera har og aðrar betranir í rúminum. Mælt verður tí til at flyta yvirskotið á kontu 6110 hjá Húsaumsitingini til at avgreiða tað við hóskandi høvi í vár.

Onnur viðurskifti
Í sambandi við verkætlanina vóru ymiskar tillagingar og frával gjørd m.a. minni skiftirúmshentleikar í Virknishøllini. Mett verður hóskandi at fá raðfest og framt hesi verkløgini við annað komandi høvi.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin í húsaumsitingini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at loka verkætlanirnar í Virknishøllini og Listahøllini við einum úrslitið á 37.613 kr. og at flyta upphæddina á kontu 6110 Umsiting og røkt av bygningum (Húsaumsitingin).

Málið verður beint í fíggjarnevndina og síðani býráðið til kunningar.

**Mentamálanevndin 12. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini við teirri broyting, at kr. 37.613 verða fluttar á kto nr 5717 ítróttaranlegg og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 171/21 Skipan av Miðstovninum (Realskúlin Kongagøta og frk. Cohr)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 63/20 | 20/00868-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 02.12.2020 | 315/20 | 20/00868-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 329/20 | 20/00868-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 298/20 | 20/00868-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 11/21 | 20/00868-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 19/21 | 20/00868-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 14.04.2021 | 70/21 | 20/00868-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 09.06.2021 | 153/21 | 20/00868-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 147/21 | 20/00868-1 |
| 10 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 171/21 | 20/00868-1 |

**Upprunin til málið:**
Samtykt hin 30. oktober 2019 í máli 19/01969 Tøkir skúlabygningar um at Realskúlin, Skúlin í Kongagøtu og húsini hjá Frk. Cohr verður dagstovnur sum samanhangandi tilboð.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Gjørt er uppskot til skipan av stovninum, harundir viðvíkjandi plásskapasiteti. Gjørt er eisini uppskot til tillaging av bygninginum í Kongagøtu til dagstovnavirksemi og kostnaðarmeting tí viðvíkjandi.

Skotið verður upp, at stovnsheitið verður Miðstovnurin, sum longu verður brúkt á staðnum.

Í viðgerðina er eisini tikin við vøggustovuvirksemið, sum Miðstovnurin hevur í Hornabø. Harumframt hevur eisini verið viðgjørt hølistørvur til børn við serligum tørvi, sum í dag heldur til í leigumáli á Frælsinum.

Hølisstøðan hjá Stella Maris Vøggustovu hevur eisini verið viðgjørd sum partur áv hesum máli, sí tilmæli í máli 19/01795.

Høvuðsbygningarnir eru Realskúlin og Kongagøta við hvør sínum fimm stovum. Til ber at skipa virksemið alt eftir tørvi (hóskandi *flowi*). Samlaði plásskapasiteturin í báðum bygningunum verður uml. 50-53 vøggustovubørn og 100-110 barnagarðsstovubørn.

Húsini hjá Frk. Cohr gevur Miðstovninum umstøður til børn við serligum avbjóðingum, har møguleiki er at fara burtur frá eftir tørvi, umframt til annað atknýtt virksemi hjá stovninum. Garðsøkið verður skipað eftir aldri á børnunum.

Miðstovnurin hevur vøggustovu í Hornabø. Nú Miðstovnurin verður víðkaður, er fyri virksemið skilabest er at flyta alt virksemið á eitt stað.

Bygningurin í Hornabø verður hinvegin mettur væl egnaður at hýsa tilboðnum til børn við serligum tørvi, sum í dag eru á Frælsinum. Í hesum sambandi verður mælt til at siga upp leigusáttmála við UMMR og flyta tilboðið í Hornabøm, tá bygingurin verður tøkur.

Gjørt er uppskot til tillagingar av bygninginum í Kongagøtu, sí skjal. Gjørd er eisini kostnaðarmeting av hesum íroknað garðsøkið, sí skjal. Hesi verða løgd fram á fundinum.

Íløgujáttan er ikki tøk til endamálið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
19/01795 Høvuðsumvæling Stella Maris Vøggustova
18/02825 Leigumál á Frælsinum

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Byggingin, tá allur bygningurin er tikin í nýtslu, er ætlað at økja plásskapasitetin, sum hevur við sær øktan rakstur samsvarandi barnatalinum. Væntað verður, at aftrat teimum 5 mió í íløgujáttan 2021 skulu aðrar umleið kr. 2 mió til at fáa allan bygningin kláran.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Dkk | Dkk 5.000.000 |
| Kostnaður í hesum árinum | Dkk | Dkk |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Dato | Dato 2021 |
| Avleiðingar á rakstur | | Dkk |

**Játtan:**

| Upphædd íalt | Á | | | Av | | | Lokað verkætlan | Eykajáttan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Deild | Verkætlan | | Deild | Verkætlan | | | |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dkk | 3175 | Nýggj projektkonta | | 3175 | L00001 Løgukarmur | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarastjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at umrøða málið og fíggjartørvin.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Víst verður til málslýsingina omanfyri og íløgujáttan í fíggjarætlanini 2021 kr. 5 mió á løgukontu 3175 Barnaansing til Miðstovnin.

Skúlavirksemið í skúlanum í Kongagøtu er flutt út á Fløtir, og alstórur tørvur er at fáa bygningin gjørdan kláran til dagsstovnavirksemið hjá Miðstovninum (fevnandi um Realskúlan, skúlan í Kongagøtu og Frk. Cohr-húsini), sum áður er samtykt.

Partur av hesum er at flyta dagstovnavirksemi úr øðrum hølum. Frítíðartilboðið á Frælsinum 30 til børn við serligum avbjóðingum skal flyta til Hornabø í seinasta lagi um ársskiftið, tá leigumálið við UMMR gongur út. UMMR hevur gjørt nýggja leiguavtalu við ÍSF um hølini. Vøggustovuvirksemið, sum er í Hornabø í dag, skal flyta í Miðstovnin.

Í løtuni eru frammanundan ov nógv børn í Realskúlanum, tí ætlanin at gera skúlan í Kongagøtu um til dagstovnavirksemið hevur drigið út. Neyðugt er at gera bráðfeingis tillagingar í Frk. Cohr-húsinum (smáar tillagingar) og í skúlanum í Kongagøtu (meira umfevnandi).

Aftrat hesum er alneyðugt at lata upp fleiri vøggustovupláss í BARN skipanini. Framrokning av plásstørvi vísir, at í januar 2021 og frameftir vanta í minsta lagi 47 vøggustovupláss. Verða ikki fleiri vøggustovupláss útvegað, verður bíðitíðin hjá foreldrum at fáa pláss til børnini enn drúgvari. Harumframt tekur Stella Maris Vøggustova ikki fleiri børn inn.

Játtanin er tí eisini ætlað til at lata tvær vøggustovur (uml. 18-20 pláss tilsamans) upp aftrat í Miðstovninum sum skjótast tíðarætlan fyri tillagingarnar er greið.

Hesar kr. 5 mió røkka til ein part av ætlaðu bygningstillagingunum, men nóg mikið til at fáa virksemið í parti av bygninginum í gongd og góðkent. Umframt okkurt smávegis arbeiði í Frk. Cohr-húsinum er tað serliga ovara hæddin í Kongagøtu, har innrættast skal nýggj vøggustova við skiftiumstøðum, verjur móti trappum, nýggjan felags køk, vesini tillagast til vøggustovur við skifti møguleikum og smáum kummum, garderobur o.a. skal setast upp, og málaraarbeiði skal gerast.

Neyðugt er at fáa arbeiðið í gongd beinanvegin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at heimila umsitingini at fyrireika og gera avtalur um ymsu arbeiðini á Miðstovninum, og í hesum sambandi at játta kr. 5 mió á kontu 3175 Barnaansing til løgukontu við heitinum Miðstovnurin.

**Mentamálanevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle, tekur undir við tilmælinum við tí ískoyti, at arbeiðið skal bjóðast út og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, mæla til at bjóða arbeiðið út og leggja málið fyri aftur til støðutakan tá tilboð eru innkomin.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 atkvøður ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Fyrisitingin boðaði nevndini í tposti 25. januar 2021 frá bráðfeingis hølistørvi til dagstovnin Miðstovnin, sum loystur verður við at stutttíðarleiga høli frá Bústøðum í Finsen, og sum nú verður formliga lagt fyri nevndina, sí avtaluuppskot.

Talan er um loysn í uml. 6 mánaðir, ið kostar kr. 20.000 mánaðarliga umframt el/hita, sí sáttmála, har til ber at leingja leigumáli stutt tíðarskeið eftir tørvi.

Arbeiðið at gera skúlan í Kongagøtu til dagstovnavirksemi verður í fyrsta lagi liðugt í summar, møguliga nakað út á heystið. Í løtuni verður útboð fyrireikað. Tá tíðarætlanin er greið ber til at bjóða nýggj pláss í BARN.

Støðan hevur avleiðingar bæði fyri Miðstovnin og serfrítíðarskúlan á Frælsinum, hvørs leigumál á Frælsinum gekk út á nýggjárinum, og har ÍSF sum nýggjur leiðari ikki er sloppin inn vegna virksemið hjá kommununi í bygninginum.

Beint nú eru 32 vøggustovubørn og 43 barnagarðsbørn í realskúlanum. Hetta er alt ov nógv í mun til støddina á bygninginum. Ætlanin var, at barnagarðsbørnini longu vóru flutt í Kongagøtu, og við hølunum í Finsen ber til at flyta flestu barnagarðsbørnini úr realskúlanum, sum sostatt gevur ta luft, ið skal til fyri at realskúlin kann hava eitt vanligt barnatal.

Hølini krevja ávís arbeiði at gera klár til dagstovnavirksemi m.a. garderobur, vask, ljóðplátur og hegn millum bygningarnar. Arbeiðið er sett í gongd. Ætlanin er at fíggja hesar tillagingar og rakstur av hølunum við verandi játtanum konta 3215 Barnaansing aðrar útreiðslur.

Útbjóðing av arbeiðinum í Gula skúla er undir fyrireiking og ætlast lagt fyri nevndina á fundinum í mars.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildina mæla til at samtykkja leiguavtaluna við Bústaðir fíggjað av kontu 3215 Barnaansing aðrar útreiðslur og beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen, tekur undir við mentamálanevndini.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Víst verður til býráðssamtykt 17. desember 2020, har umsitingini er heimilað at bjóða út arbeiðið at gera bygningin í Kongagøtu um til dagstovn og gera avtalur um ymsu arbeiðini.

Síðan tá er leigumál gjørt viðvíkjandi hølum í Finsen sum bráðfeingis loysn viðvíkjandi plássum. Eisini er verkætlanin nágreinað og kostnaðarmett, sí hjálagdu tekningar og kostnaðarmeting.

Heimildin at gera avtalur fevnir um tøku játtanina kr. 5 mió. Sbrt. kostnaðarmetingini verður hetta tepurt. Tá tilboðini koma inn, má metast um møguliga meirfígging ella tillaging av verkætlanini.

Kostnaðarmetingin fevnir eisini um útiøkið og spælipláss, sum í ávísan mun eisini hevur samband við Grasagarð, Frk. Cohr garðin og Finsen. Við atliti at tøku játtanini verður tó mett neyðugt at raðfesta arbeiðið við bygninginum fyrst, men soleiðis, at girðingar og trygd kring økið verður gjørd til tess at dagstovnaplássini kunnu fáast í brúk skjótast.

Harumframt skal upplýsast, at sjálv Kongagøtan í næstum verður grivin upp í sambandi við fjarhitaleiðing, og at tað í mun til útiøkið og spælipláss til Miðstovnin er skilabest at bíða eftir, at tað arbeiðið er liðugt. Tíðarætlan í hesum sambandi er ógreið í løtuni. Aftrat skulu skúrarnir í Frk. Cohr-garðinum av økinum fyri at geva pláss til spælipláss og útileikur. Arbeiðið við útiøkinum verður tí at taka upp seinni og játtan útvegast til tað.

Arbeiðið verður boðið út til tveir arbeiðstakarar sum undirhondsboð.

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 14. apríl 2021:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Lisitatión var 7. mai 2021. Úrslitið varð hetta:

- Búsetur kr. 6.805.598
- North kr. 8.365.894

Eingin teirra hevur fyrivarni.

Samlaða kostnaðarmetingin, sí hjálagt, við innbúgvi, ráðgeving, spælipláss/spæliútgerð, mvg, óvæntað v.m. er kr. 11.482.137,45 – tá er roknað við kr. 2 mió til spæliplássið/spæliútgerð, sum mett verður er alneyðugt at hava við, so at námsfrøðiliga virksemið inni og úti kann virka nøktandi.

Byggiarbeiðið verður sambært ætlanini liðugt miðjan mars 2022. Leigumálið um fyribilshøli til stovnin í Finsen má leingjast samsvarandi byggitíðini, tvs. til og við mars 2022. Útreiðslan er tikin við í kostnaðarmetingina omanfyri.

Tøk løgufígging til hesa verkætlanina L31012 Umbygging í Kongagøtu (Miðstovnurin) er kr. 5 mió, fíggjartørvur er sostatt kr. 6,5 mió.

Á grein 3 í fíggjarætlanini eru tvær aðrar íløgujáttanir til ávikavist Dagstovnin á Argjum kr. 1 mió og Frítíðarskúlan í Kollafirði kr. 2 mió. Báðar verkætlanir eru í fyrireiking.

Skotið verður tí upp, at restfíggingin til umbyggingina av Miðstovninum við spæliplássi kr. 6,5 mió verður játtað til endamálið í íløguætlanini fyri 2022.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á húsaumsitingini mæla til:
- at gera arbeiðstøkusáttmála við Búsetur,
- at restfígging kr, 6,5 mió verður játtað til endamálið av íløguætlanini 2022,
- at leingja leiguavtalu við Bústaðir um høli í Finsen til og við mars 2022, og
  at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 09. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 172/21 Uppraðfesting av eldraøkinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 08.06.2021 | 18/21 | 21/01008-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 149/21 | 21/01008-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 172/21 | 21/01008-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Samgongan hevur sett sær fyri at eldraøkið skal uppraðfestast. Serliga er talan um at skapa meira innhald í dagligdagin hjá eldru borgarunum sum búgva á bústovnum hjá kommununi. Somuleiðis er ynski um at lyfta røktarøkið soleiðis at starvsfólkaorkan verður hægri raðfest.

Talan er um at seta tvey starvsfólk burturav hvørs uppgáva verður at skipa og stuðla undir aktivitetir sum stimbra og skapa innihald í dagligdagin hjá búfólkunum. Ein partur av arbeiðinum verður eisini at samskipa tað sjálvbodna virksemi sum í dag og í framtíðini er á eldraøkinum. Hugsanin er, at umframt aktivitet í dagligdegnum, at vera við til at skipa størri tiltøk sum útferðir, jólahald, fastalávintshald osv.

Tvey ársverk av hesum slag eru mett at kosta 1. mió. kr.

Røktarøkið krevur stóra starvsfólkaorku. Arbeiðsbyrðan kann vera tung og tí er neyðugt at hava góða normering á økinum. Hetta er galdandi bæði inni á bústovnunum og í heimatænastuni. Góð normering á økinum skapar betri arbeiðsumstøður og er við til at fasthalda starvsfólk umframt at góð normering dregur fleiri starvsfólk til økið, tí arbeiðsbyrðan gerst lættari.

Tað er ymiskt hvar og nær tørvurin á hægri normering er neyðugur, tí hetta í stóran mun er tengt at arbeiðsbyrðuni. Á onkrum stað er tørvur á fleiri tímum um dagin, onkustaðni um kvøldið og aðrastaðni um náttina. Tó er eingin ivi um, at tað serliga eru tær deildirnar við størst røktartyngd sum tørva hægri normering.

Mett verður at ein hækkan av játtanini til røktarøkið á 4 mio. kr. svarandi til áleið 8 ársverk, gera stóran mun í dagligdegnum, til gagns fyri bæði borgaran og starvsfólkini.

Til ber at seta hetta í verk við at oyramerkja 5 mió. kr. av minninýtsluni hjá Heilsu- og umsorganartænastuni í 2020.

Við framflytingini verður sostatt tøkur peningur til at seta uppraðfestingina í verk í ár, men nýggjur peningur má setast á fíggjarætlanini fyri 2022. Fyri at uppraðfesta virksemi skal halda fram í 2022 mugu 5 mió. kr. játtast á fíggjarætlanini 2022.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

| | **Býráðsfundur**<br>23. juni 2021 | Blað nr.: 682<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fíggjarfulltrúin mæla heilsu- og eldranevndini til at taka undir við, at 1 mió. kr. verður játta til 2 starvsfólk at arbeiða við aktivitetum til búfólk á eldraøkini. Somuleiðis at játta 4 mió. kr. til økta normering á røktarøkinum soleiðis at starvsfólkaorkan økist. At fíggja tær tilsaman 5 mió. kr. av framfluttum peningi, 3 mió. kr. av konto 2722 tilboð og 2 mió kr. av konto 2721 røktartænastur, og at leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 08. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt**.**

# 173/21 Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 132/16 | 14/00218-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 31.08.2016 | 210/16 | 14/00218-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 280/16 | 14/00218-2 |
| 4 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 237/16 | 14/00218-2 |
| 5 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 243/16 | 14/00218-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 02.11.2016 | 296/16 | 14/00218-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 33/17 | 14/00218-2 |
| 8 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 72/17 | 14/00218-2 |
| 9 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 113/17 | 14/00218-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 220/17 | 14/00218-2 |
| 11 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 231/17 | 14/00218-2 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 141/18 | 14/00218-2 |
| 13 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 196/18 | 14/00218-2 |
| 14 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 117/18 | 14/00218-2 |
| 15 Mentamálanevndin | 27.08.2018 | 248/18 | 14/00218-2 |
| 16 Mentamálanevndin | 13.02.2019 | 49/19 | 14/00218-2 |
| 17 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 74/19 | 14/00218-2 |
| 18 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 62/19 | 14/00218-2 |
| 19 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 321/19 | 14/00218-2 |
| 20 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 87/20 | 14/00218-2 |
| 21 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 80/20 | 14/00218-2 |
| 22 Býráðsfundur | 06.04.2020 | 56/20 | 14/00218-2 |
| 23 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 99/20 | 14/00218-2 |
| 24 Mentamálanevndin | 02.12.2020 | 326/20 | 14/00218-2 |
| 25 Mentamálanevndin | 12.05.2021 | 120/21 | 14/00218-2 |
| 26 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 111/21 | 14/00218-2 |
| 27 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 161/21 | 14/00218-2 |
| 28 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 173/21 | 14/00218-2 |

**Málslýsing:**

**Mál nr. 14/00218 – Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan**

Á kontu 5475 Býarbókasavnið (íløgur) fyri 2016 eru játtaðar 3.000 tkr.

Í 2014 varð fyrireikingararbeiði gjørt viðvíkjandi út- og umbygging av Býarbókasavninum (BBS). Sí hjálagt skjal 1 og skjal 2 við uppskoti til verkætlan, ið Sp/f Árni Winther Arkitektar stóðu fyri. Sí eisini hjáløgdu ársfrágreiðing og mál- og avriksavtalu hjá BBS – skjal 3 og 4.

**Ætlan og kostnaðarmeting**
Heildarætlanin varð tá mett til 37 mió. kr. íroknað innbúgv v.m. Umsitingin og BBS meta, at uppskotið sum heild er gott og kann vera grundarlagið fyri víðari viðgerð.

**Stuðul frá landinum sbrt. § 15, stk. 2 og 3 í bókasavnslógini**
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samskifti við Mentamálaráðið og Landsbókasavnið viðvíkjandi stuðli. Lógin ásetur, at landið veitir upp til 50% í studningi til bygging, um- ella uppíbygging. Neyðugt er, at landsstýrismaðurin í mentamálum góðkennir verkætlanina eftir tilmæli frá Landsbókasavninum og sum skilst eisini Landsverki. Við atliti til at fáa greiði á fíggingini er neyðugt sum skjótast at fáa sent prinsipiella umsókn til Mentamálaráðið og Landsbókasavnið, soleiðis at landið kann fyrireika játtan til endamálið í 2017-2019/20. Um støði verður tikið í § 15, stk. 3, er býtið millum kommununa og landið umleið 18,5 mió. kr. í part, og um landið rindar yvir 4 ár, so umleið 4,6 mió. kr. um árið árini 2017-2020. Við fyrivarni fyri at landið góðkennir allar útreiðslurnar!

**Bygging í stigum og aðrar fyritreytir**
Av tí at BBS framhaldandi skal virka so ótarnað sum gjørligt og við atliti til, at umbyggingin órógvar starvsfólk og viðskiftafólk sum minst, er ætlanin at fremja verkætlanina í stigum. Ein týðandi fyritreyt fyri tí er, at greiði verður á, um og nær KT-deildin og fíggjardeildin flyta úr bygninginum, tí tað vil geva betri pláss til umbyggingina.

Byggistigini eru hugsað at kunna verða framd soleiðis:

| Ár/ stig | Ætlan | Viðmerkingar |
|---|---|---|
| **2016/17** | • Kjallari innrættast og takast í nýtslu sum opin goymsla (Bøkur flytast av goymslu á 4. hædd + Eysturskúlanum til kjallaran).<br>• Byrja at umvæla tekju, útveggir og takpall sambært ætlan.<br>• Starvsfólk flyta niður á 2. hædd út móti Sverrisgøtu/Káta Horni, har fyribils skrivstovukjarna kann vera, meðan arbeiðið fer fram.<br>• Núverandi skrivstovuhølir kunnu takast upp í útlánið á 2. hædd og geva rúm fyri bókum frá Sverrisgøtu.<br>• Byrja at umvæla og innrætta 4. hædd til barna- og ungdómsdeild. | *Lyfta og trappuuppgongd skulu umvælast eisini.*<br><br>*Kunnu bøkur úr útláninum evt flytast niður á 1. hædd, meðan arbeiðið fer fram?* |
| **2017/18** | • Framhaldandi umvæling og innrætting av 4. hædd (+ evt hølini hjá Fíggjardeild).<br>• Tá 4. hædd er liðug, ber til at flyta alt virksemið frá Barnabókasavninum av 3. hædd upp á 4. hædd.<br>• Byrja at umvæla 3. hædd sambært ætlan (+ KT-deild).<br>• | *Kjallari, 1. hædd, partur av 2. hædd og 3. hædd fullvirkin, meðan arbeiðið fer fram.* |
| **2018/19** | • Framhaldandi umvæling av 3. hædd.<br>• Tá 3. hædd er liðugt umvæld, ber til at flyta útlánið av 2. hædd upp á 3. hædd.<br>• Umvæling og innrætting av 2. hædd. + 1 nýggja lyftu og trappuuppgongd. | *4. hædd tikin í nýtslu sum barna- og ungdómsdeild, skert ella einki virksemi í útláninum á 2. hædd.*<br><br>*Skrivstovukjarna út móti Sverrisgøtu má flytast, meðan arbeiðið fer fram. Hvar? Evt. partur av 3. hædd.* |
| **2019/20** | • Umvæling og innrætting av restini av kjallara.<br>• 1. hædd liðugt umvælast og innrættast.<br>• **1. apríl 2019 fyllir BBS 50 ár.** | |

**Yvirskipað um Býarbókasavnið**
Býarbókasavnið hevur seinastu árini verið í positivari menning. Bókasavnið er ein av mest vitjaðu mentanarstovnunum í kommununi og er eisini størsta fólkabókasavn í landinum. Seinasta brúkarakanning vísir, at 65% av borgarunum í kommununi hava seinasta árið verið á gátt.[1] Hetta er væl meir enn í grannalondum okkara, har miðaltalið liggur um 50%. Eisini síggja vit ein risa vøkstur av vitjandi seinastu 5-6 árini, har talið er vaksið frá 80.000 vitjandi til at tátta í tey 140.000 í 2015. Hetta er ein vøkstur uppá 16% í 2015. Nøgdsemið er stórt millum brúkararnar, og starvsfólkið støðast og trívist væl á arbeiðsplássinum.

Positiva gongdin er ikki uttan orsøk. Hon er neyvt tengd at eini miðvísari menning av bókasavninum sum ein meiri sjónligur og atkomiligur viðspælari í miðbýarøkinum, eitt alsamt meiri nútímansgjørt bókasavn við betri og fleiri tilboðum og tænastum á høgum stigi.

Gongdin kann í stuttum lýsast soleiðis:

Í 2009 keypti Tórshavnar kommuna bygningin á Niels Finsensgøtu 7.[2] Samstundis varð eisini farið undir at endurnýggja og nútímansgera niðastu hædd. Í 2012 stóð veghæddin klár at taka í nýtslu. Í 2012/2013 fekk bókasavnið nýggja leiðslu, har størri dentur varð lagdur á ein meiri málrættaðan bókasavnsprofil. Millum annað fór man burtur frá “ad hoc”- leiðsluhátti til ein meiri stategiskan leiðsluhátt. Bygnaðarbroytingar vórðu framdar. Farið varð burtur frá tí flata bygnaðinum, og í staðin varð farið yvir til ein bygnað við fleiri ábyrgdarøkjum, sum eisini arbeiða uppá tvørs í toymum. Í 2014 varð eisini varaleiðari settur. Í 2015 varð avgreiðslusamskipari settur. Í 2015 fær Tórshavnar kommuna nýggjan mentamálaleiðara, har samstarvið og dialogurin millum stovn og kommunufyristing verður styrktur. Millum annað verður ein mál- og avrikssáttmáli gjørdur og undirskrivaður, har sett verður út í kortið, hvørji mál og avrik bókasavnið næsta árið skal seta sær fyri at fremja og miða ímóti.

Eitt av fremstu málum og eisini størsta avbjóðingin fyri áhaldandi menning og trivnaði á bókasavninum eru hølisviðurskiftini, sum í verandi líki forða fyri áhaldandi menning.

**Framtíðarkósin**
Umframt lógarásettu karmarnar, sum ásetur bókasøvnum at fremja upplýsing, lærdóm og mentanarligt virksemi, so hava nútímans fólkabókasøvn fingið ein broyttan leiklut í mun til áður. Bókasøvn eru ikki longur friðarligar bókagoymslur, men eru vorðin livandi og dynamisk støð, sum laga seg eftir økta og broytta bókasavnstørvinum í nútíðarsamfelagnum. Eitt stað, sum spælir ein aktivan leiklut í lokaløkinum, sum tað í størri mun enn áður er við til at revitalisera og menna. Fyrilestrar, kjak, rúm fyri læring og fordjúpilsi og nógv onnur tiltøk, sum ikki einans snúgva seg um bókaútlán, knýta seg at modernaðum bókasavnsvirksemi.

Hendan gongd hevur eisini merkt virksemið á Býarbóksavninum seinastu árini. Í dag er Býarbókasavnið eitt meiri opið og sjónligt stað, sum eftir førimuni markerar seg úteftir við regluligum tiltøkum, við at vera sjónligt í miðlunum, við eini aktivari heimasíðu og við luttøku í sosialu miðlunum. 1. januar 2015 økti bókasavnið munandi um upplatingartíðirnar. Í dag hevur bókasavnið sostatt opið hvønn dag – eisini sunnudag og gerandisdagar til seint út á kvøldið. Nógv fleiri fólk leita sær á bókasavnið og brúka tænasturnar á staðnum uttan neyðturviliga at fara avstað aftur við eini bók undir arminum.

Hetta setur onnur krøv til hølisviðurskiftini, sum komast skal nærri inná niðanfyri.

**Býarbókasavnið, verandi viðurskifti**
Í mong ár hava hølisviðurskiftini á Býarbókasavninum ikki verið nøktandi til virksemið tess. Bygningurin er 50 ára gamal, og lítið er gjørt við hann hesa tíðina. Umframt at hølini eru niðurslitin, hevur bókasavnið

[1] Kanningin varð gjørd 15.03.16. Kanningina gjørdi spyr.fo v/Allani Dalsgarð.
[2] Bókasavnið hevur, síðani tað læt upp í 1969, leigað í alsamt størri pørtum av bygninginum.

eisini verið plágað av lekum og blámusoppi, til ampa fyri starvs- og viðskiftafólk. Plásstrot er, bæði til bøkur, viðskiftafólk og starvsfólk.

Bókasavnið eigur umleið 75.000 bøkur o.a. tilfar. Umleið 6.000 bøkur standa á eksternari goymslu vegna plásstrot.

**Bókasavnið $m^2$:**
4. hædd 170 $m^2$ - av hesum: 14 $m^2$ skrivstovur - 40 $m^2$ bókagoymsla
3. hædd 257 $m^2$ - av hesum: 49 $m^2$ skrivstovur (38 $m^2$ avbyrgt øki vegna leka) - 15 $m^2$ bókagoymsla
2. hædd 466 $m^2$ - av hesum: 43 $m^2$ skrivstovur - 14 $m^2$ bókagoymsla
1. hædd 268 $m^2$ - av hesum: 100 $m^2$ lesistova
0. hædd uml. 20 $m^2$.
Tils. 1.161 $m^2$ - av hesum: 106 $m^2$ skrivstovur - 69 $m^2$ bókagoymsla - 100 $m^2$ lesistova

**0. hædd / Kjallarahæddin**
Niðasta hæddin hevur staðið óvirkin, men í skrivandi løtu er partur av kjallaranum væl á veg til at verða innrættaður til eina opna goymslu. Restin av kjallaranum er goymsluhøli hjá kommunalu húsaumsitingini og kaféini. Undir trappunum í kjallaranum finst avísgoymsla, umframt goymsla av ljóðútgerð.

**1. hædd / veghæddin**
Nýumvæld 2009-2011.
Høvuðsinngongd, kafé, avís- og tíðarritsdeild, avgreiðsla, sjálvavgreiðsla (afturbering og avheinting av bókum v.m.), internetteldur, framsýningarhøli, vesir. Lyfta finst á 1. hædd, sum gongur upp til 4. hædd.

**2. hædd**
Útlánið, ungdómsdeild, skrivstovur, kopirúm, teldurúm, goymslurúm.

**3. hædd**
Barnabókasavnið, barnavesir, lítil inngongd, trappuppgongd við lyftu, skrivstovuhøli (harav er innara hølið avbyrgt vegna lekar og blámusopp), lítið goymslurúm.

**4. hædd**
Skrivstova hjá býarbókavørði, fundarhøli (fyrrverandi íbúð v/ køki, baðirúmi, gongd), lítil køkur, bókagoymsla, gongd, vesi, goymsla til vaskiútgerð og annað. Ein óbrúktur takpallur.

**Komandi hølisviðurskifti**
Verandi hølir, og standurin á teimum, avmarka sum er virksemið. Umvæld og dagførd hølisviðurskrifti fara at bera í sær eitt fjølbroyttari og betri nútímansbókasavn.

Við støði í ynskjum og í samsvari við mál og visjón Býarbókasavnsins gjørdi Sp/f Árni Winther Arkitektar eitt skitsuuppskotslíknandi uppskot í 2014. Uppskotið hevur verið væl móttikið av bæði leiðslu og starvsfólki á Býarbókasavninum, eins væl og umsitingini. Uppskotið gongur eisini teimum ynskjum og treytum á møti, sum eru neyðugar til eitt vælvirkandi bókasavn. Millum annað er hædd tikin fyri broytta bókasavnsleiklutinum við m.a.

- betri lesi- og lestrarumstøðum, sum stuðla upp undir reflektión og djúphugsan
- fundar- og aktivitetsrúm, sum er multifuntionelt og fleksibult
- størri rúmd til børn og ung, eins væl og rørslutarnað
- betri goymsluviðurskifti til bøkur v.m.
- tiltaks- og fyrilestrarhøli, ið kunnu hýsa fleiri tiltøkum
- skrivstovur í eini samlaðari kjarnu, sum stuðlar upp undir arbeiðsgongdirnar

Í stuttum áttu verandi hølisviðurskifti at sæð soleiðis út:

**0. hædd / Kjallarahæddin**
Bókagoymsla og fyrilestra-/tiltakssalur. Kann eisini nýtast uttan fyri vanliga upplatingartíð.

**1. hædd / veghæddin**
Í stóran mun óbroytt, burtursæð frá rúmligari lyftu og nýggjari trappuuppgongd frá kjallara.

**2. hædd**
Bøkur o.a. tilfar til vaksin. Lesistova, lesiklivar, samrøðu- og serrúm. Starvsfólkaskrivstovur og fundarhøli kring ein felags kjarna. Lesiklivar kunnu nýtast uttan fyri vanliga upplatingartíð.

**3. hædd**
Bøkur o.a. tilfar til vaksin. Rúm fyri bókaframsýningum, teldum, kopiering, lesi- og sitiplássum.

**4. hædd**
Barna- og ungdómsdeild. Hølini kunnu deilast upp í eindir og skulu sostatt kunna hýsa fjølbroytta virkseminum á barna- og ungdómsbókasavninum, t.e. stovnsvitjanum, mammubólkum, barnafamiljum, lektiukafe, teldu- og miðlasavn, multirúm til spøl, rørslu, tiltøk og framførslur. Í tilknýti til hetta skal takpallurin eisini takast í nýtslu.
Í uppskotinum er roknað við, at hølini út móti Sverrisgøtu, har Fíggjardeildin og KT-deildin í dag halda til, verða tikin við upp í Býarbókasavnið.

**Býarbókasavnið og miðbýurin – nakrir tankar**
Seinastu árini hevur rákið verið, at bókasøvn verða hugsað inn í og brúkt sum ein týðandi liður í strategiskari býarplanlegging. Bókasavnið er ofta kjarna og miðdepil í at endurmenna og skapa lív í býarrúminum.
Býarbókasavnið liggur í hjartanum í Havnini. Verandi gomlu bygningar seta sínar avmarkingar, men veita eisini serligar møguleikar til at skapa eitt vælvirkandi og innbjóðandi býarumhvørvi. Í gørðum og smogum aftanfyri kunnu skapast nøkur nýggj og spennandi býarrúm.

Við gongugøtuni beint uttanfyri, men eisini við møguligum inngongdum/ gjøgnumgongdum umvegis Vaglið, Tórsgøtu og Sverrisgøtu, eru eisini nakrir serligir møguleikar at skapa eitt meiri livandi býarrúm og at aktivera hesi økir, sum í løtuni ikki verða brúkt. Eitt nú kundu smogur og bakgarðar verið brúktir sum sambindingarlið millum aðrar mentanarstovnar í miðbýnum: Perluna, Reinsaríið, Margarinfabrikkina, Tjóðpallin og Vaglið.

Til ber at hugsa sær, at mørkini millum bókasavn og býarrúm gjørdust meiri flótandi, at man t.d. samantvinnar innara bókasavnið við ytra býarrúmið, eitt nú við partvíst yvirdekkaðum smogum, bakgørðum, sum kunnu nýtast; ikki bert til at ganga ígjøgnum, men eisini til annað uttanduravirksemi. Sostatt kundi bókasavnið verið við til at skapa eina synergi millum ymsu stovnarnar í miðbýnum, sum kann styrkja um býin sum læringar-, mentanar- og upplivingarrúm.

**Býarbókasavnið sum høvuðs- ella meginbókasavn – nakrir ávegis tankar**
Tosað hevur verið leysliga um, at Býarbókasavnið møguliga í framtíðini kundi blivið eitt høvuðs- ella meginbókasavn fyri allar Føroyar. Í dag er hetta ein deild undir Føroya Landsbókasavni, nevnd Bókastovan, sum er ásett í Bókasavnslógini Kapittul VIII, § 21 og 22.

Stutt um høvuðsbókasavnsvirksemið:

- at samskipa keypið av føroyskum bókum og øðrum tilfari til skúla- og fólkabókasøvn.
- at skráseta, binda inn og greiða hetta tilfarið til bókasøvnini
- at fremja upplýsandi tiltøk um bókasavnstilfar.
- at skipa fyri eftirútbúgving og skeiðsvirksemi fyri starsvfólki á bókasøvnunum.
- at skipa fyri býti av bókasavnsgjaldinum (t.e gjald til føroyskar rithøvundar og týðarar, hvørs bøkur eru til taks á bókasøvnunum).

Til hetta virksemi krevjast hølir og starvsfólk.

Í skrivandi løtu er málið ógvuliga hypotetiskt, og tískil ber illa til at koma við ítøkiligum tonkum og viðmerkingum. Fyrst og fremst krevst ein broyting í verandi bókasavnslóg.
Í øllum førum ber til at staðfesta, at um so var, at Býarbókasavnið skuldi fingið eina slíka funktión afturat, hevði ein ný- og umbygging brynjað bókasavnið enn betur til at taka ímóti hesi avbjóðing. Umbyggingin skal vera framskygd og stuðla undir eina langtíðarætlan fyri Býarbókasavnið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til fyriliggjandi prinsippuppskot við atliti til, at umsókn kann í mai/juni verða latin Mentamálaráðnum og Landsbókasavninum um fígging sbrt. § 15, stk. 3 í bókasavnslógini árini 2017-2020. Samstundis fer umsitingin til fundin í oktober at fyrireika neyvari ráðlegging av verkætlan og tíðarætlan við atliti til at kunna fremja verkætlanina í stigum, herundir gerð av fasadum komandi vetur.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Í juni lat umsitingin umsókn til Landsbókasavnið og Mentamálaráðið sum samtykt á fundi í mentamálanevndini 4. mai 2016. Í skrivi frá Landsbókasavninum hevur umsitingin fingið at vita at Landsbókasavnið hevur latið tilmæli til Mentamálaráðið. Biðið er um partsinnlit í tilmæli, men er svar ikki komið enn.

Í samskifti við teknisku fyrisiting, ið virkar sum byggiharri í byggiverkætlanum hjá Tórshavnar kommunu er avgjørt at tað hevði verið ein fyrimunur fyri víðari tilgongdina at ein samlað byggiskrá fyrilág, ið nakað neyvari enn verandi

tilfar nágreinar hølistørv og skrá og í hvønn mun annað virksemi við fyrimuni kann hugsast at verða hýst saman við Býarbókasavninum.

Hóskandi er at seta eina verkætlanrnevnd við umboðum fyri trivnaðarfyrisiting, teknisku fyrisiting og Býarbókasavnið. Nevndin skal verða liðug við sítt arbeiðið innan 1. november 2016.

Ein fyritreyt fyri at umbyggingin og heildarætlanin fyri Býarbókasavnið kann fremjast er at KT-deildin og Fíggjardeildin hjá Tórshavnar kommunu flytir úr bókasavnsbygninginum á Káta Horninum. Ein ætlan fyriliggur at innrætta 2. hædd í Niels Finsensgøtu 17 til at hýsa hesum báðum deildunum. Verkætlanin er mett til kr. 1.262.194, men fígging er ikki tøk.

Á løgukarminum fyri 2016 eru játtaðar kr. 3.000.000 til Býarbókasavnið. Uppskot er tí, at játtan til innrætting hjá miðfyrisitingini í Niels Finsensgøtu 17 verður fingin til vega av játtanini til Býarbókasavnið treytað av, at Býarbókasavnið kann flyta inn í hølini á Káta Horninum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:
a) at samtykkja arbeiðssetningin og geva umsitingini heimild til at útvega byggiskrá, og .
b) at flyta kr. 1.262.194 av løgukarminum fyri 2016 ætlað Býarbókasavninum til kontu 6109 Húsaumsitingin, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 31. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Umsitingin kemur á fundinum at geva status viðv. umsóknini til mentamálaráðið vm.

**Mentamálanevndin 2. november 2016:** Kunnað varð um status.

**Ískoyti:**
Tilboðini uppá umbygging av 2. hædd í Niels Finsensgøtu 17 eru 736.000 kr. hægri enn upprunaliga mett. Áðrenn arbeiði kann byrja, skal neyðug játtan vera tøk.

**Tilmæli**
Miðfyrisitingarstjórin og trivnaðarstjórin mæla til at játta 736.000 kr. til umbyggingina á konto 6109 umsiting og røkt av bygningum. Fíggja av kontum við avlop í 2016. 200 tkr. Av 1311 Miðfyrisiting, 436 tkr. av 5310 Mentanartiltøk og 100 tkr. av Vinnutiltøk.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**

Síðani samtyktina hjá mentamálanevndini 4. mai 2016 og umsóknina sbrt. § 15, stk. 3, ið var latin mentamálaráðnum í juni 2016, hevur umsitingin regluliga spurt um málið hjá Mentamálaráðnum (MMR) og eitt tíðarskeið í ár Løgmansskrivstovuna (málsøkið var í uml. 2 mánaðir har) eftir svari uppá umsóknina.

7. september 2017 kemur soljóðandi fráboðan frá MMR:

"Viðvíkjandi umvæling/umbygging av Býarbókaaavninum í Havn.

Til endamálið er sett av á løgujáttanini árini framyvir, soleiðis:

2018: 1.5 mió. kr.
2019: 3.5 mió kr.
2020: 3.5 mió kr.

Hetta er tað, ið arbeitt verður við, sum landsins partur av útreiðslunum.

Endaliga verður hetta ikki samtykt fyrr enn løgtingsfíggjarlógin fyri 2018 er samtykt."

Nærri greiningar vera annars ikki givnar.

Tað er at fegnast um at MMR kemur við slíkari tilsøgn, tó at henda upphædd er ikki er heilt í samsvar við tað upphædd søkt er um sbrt. § 15, stk. 3 í bókasavnslógini. Umsóknin til MMR var á uml. 17,5. mio.kr. yvir 4 ár.

Byggiskráin fyri verkætlanin er enn í gerð og hevur lutvíst verið bíðað eftir at fáa betri greiði á, hvat fíggjarligt útgangsstøði verður fyri verkætlanina. Ætlandi verður byggiskráin liðug í november og klár til nevndarviðgerð tá.

Ein fyritreyt fyri verkætlanini er at KT-deildin og Fíggjardeildin flyta úr bókasavnsbygninginum. Tann verkætlanini er í gongd og verður ætlandi liðug um fáar vikur.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða fráboðanina frá MMR við atliti til at umsitingin kemur við nærri tilráðing til komandi fund.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at taka við tilsøgnini frá MMR, men samstundis taka upp samskiftið við MMR um møguliga játtan árini 2021 og frameftir, soleiðis at komið verður uppá fullu upphæddina søkt er um.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Í 2016 varð samtykt ein heildarætlan fyri umbyggingina av býarbókasavninum. Í einum ískoyti frá 2017 er skrivað, at ein fyritreyt fyri ætlanini er, at KT-deildin og Fíggjardeildin flyta út av 3. og 4. hædd á Káta Horninum. KT-deildin og Fíggjardeildin eru nú flutt úr hølunum, men fyrisitingin hevur brúk fyri at hava skrivstovur á 4. hædd.
Deils er ætlanin at siga upp leigumálið í Niels Finsens gøtu 31, sum er hølini, ið húsa umsitingini hjá Heilsu- og Umsorganarstænastuni, soleiðis at fyrisitingin kann flyta tættari uppat restini av fyrisitingini í kommununi. Hetta hevur við sær eina sparing í leiguútreiðslum uppá kr. 265.200 um árið.

Harumframt skal pláss gerast til ein stjóra aftuat í ráðhúsinum, og hetta merkir, at staðsetingar av fólki í pørtum av fyrisitingini mugu umskipast.

**Tilmæli:** Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at samtykja, at heildarætlanini fyri umbyggingina av Býarbókasavninum ikki fevnir um 4. hædd á Káta Horninum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Tikið av skrá**.**

**Ískoyti**:
Skriv er komið frá starvsfólkunum á Býarbókasavninum í sambandi við framtíðarætlanir fyri Býarbókasavnið (sí hjálagt).

Arbeiðið við at gera byggiskrá sum samtykt á býráðsfundi 12. september 2016.

Arbeiðið við byggiskránni hevur ligið stilt síðani á sumri 2017, men er júst tikið uppaftur og er væntandi at eitt uppskot verður klárt til viðgerð í nevndini seinni í juni 2018 og sum síðani kann latast starvsfólkunum o.ø. til hoyringar. Endaliga byggiskráin verður síðani ætlandi løgd fyri nevndir og býráð til viðgerðar í august. Játtanin til verkætlanina er umleið 1 mio.kr. í 2018, umframt tilsøgnin um stuðul frá mentamálaráðnum á 1,5 mio.kr.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Samtykt at taka kunningina til eftirtektar, og at 4. hædd á Káta horninum skal vera partur av byggiskránni sum upprunaliga ætlað í heildarætlanini.

**Ískoyti**:
Uppskot til byggiskrá fyri verkætlanina er til endaliga hoyring hjá Býarbókasavninum og starvsfólkunum har - sí hjálagt uppskot.

Til fundin 11. september 2018 verður ætlandi endaliga byggiskráin latin til viðgerðar hjá nevndum og býráð.

Umsitingin gjøgnumgongur á fundinum høvuðspunktini í uppskotinum og týðandi spurningar sum støða skal takast til.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin kunnað um byggiskránna.

**Mentamálanevndin 27. august 2018:** Kunnað varð um byggiskránna.

**Ískoyti**
Umsitingin hevði 1. februar 2019 havt fund við Mentamálaráðið og Landsbókasavnið um støðuna í málinum.

Útmeldingin og niðurstøðan frá stjórnarráðnum er fylgjandi:
- Talið 8 mio.kr í § 15, stk. 3 stuðli er áleið tað sum lagt verður upp til.
- Grundleggjandi bygningsrøkt og ábøtur á tað metir ráðið ikki kemur undir § 15, stk. 3.
- Ráðið tekur undir við at gjørd verður eitt nýggja stigvís ætlan, ið síðani aftur skal góðkennast av Landsbókasavninum og sendast Landsverki sum bygningsráðgeva hjá mentamálaráðnum til metingar.
- at ráðið metir (við støði í meting hjá Landsverki) at metingin um verkætlanina er óv lág.

Í samtyktu løgtingsfíggjarlógini fyri 2019 stendur "Eingin játtan er til endamálið í 2019, men 1,5 mió. kr. verða eftir ætlan játtaðar í 2020, 1,5 mió. kr. í 2021 og 3,5 mió. kr. í 2022."

Á fundinum var spurt um hvørt játtanin sum var fyri 2018 á 1,5 mio.kr. kundi flytast til 2019 so gongd kann koma á nakrar umbyggingar v.m. Ráðið skuldi kannað málið og ísofall leggja tað fyri í eykafíggjarlógini á várið 2019.

Við hesum tykist verða rættiliga greitt hvørja støðu verandi landsstýrið hevur til málið. Tískil er helst ikki annað at gera enn at fara undir at tillaga verkætlanina soleiðis at hon kann fremjast stigvíst og innanfyri teir givnu fíggjarkarmarnar komandi árini. Umsitingin og Býarbókasavnið meta at ein stigvíst ætlan er tað mest ynskiliga, bæði soleiðis at bókasavnið kann vera ein virkin stovnur hesi árini, umframt at fíggjartørvurin kann vera sámuligur og lagdur yvir nøkur ár.

Til fundin 13. mars er ætlanin at hava eina lidna byggiskrá klára íroknað eina stigvíst ætlan fyri umbyggingini og umvælingunum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at gera nýggja tíðarætlan fyri gerð av byggiskrá og stigvísari ætlan. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Landsbókasavnið hevur fingið uppskot til byggiskrá til hoyringar (sí hjálagt uppskot). Uppskotið leggur upp til eina framhaldandi stigvísa umbygging og umvæling í einum 5 stigum.

Ein høvuðsavbjóðing í málinum er vandin fyri at málið melur í klingur. TK er í vanda fyri ikki at fáa gjørt sína ætlan lidna (tíansheldur fara undir projektering v.m.) fyrrenn TK hevur nøkulunda vissu fyri hvat landið vil stuðla við.

Nú er lagt upp til at gera eina ætlan stigvísa ætlan har TK søkir um fígging til hvørt einstakt stig, men við heildini í huga, so tað verður lættari fyri TK og UMMR at viðgera einstøku stigini og fyritreytirnar fyri tí.

Fyri at hetta skal vera praktist gjøgnumførligt - havandi í huga politiska viðgerð í kommununi, í UMMR og løgtinginum, er neyðugt at landið setur av ávísa upphæddir yvir t.d. 5 ár, ið landið í mesta lagi vil lata til verkætlanina og tryggja sær at játtanin hevur átekning, ið ger tað møguligt at flyta játtan tvørturum ár.

Uppleggið frá TK er at brúka uml. 1 mio.kr. netto til verkætlanina (670 tkr. eru tøkar á løgujáttan, umframt møguliga smærri upphædd frá Húsaumsitingini) í 2020 og síðani umleið 3 mio.kr. um árið frá 2021, tí vildi eitt uppskot verið, at landið setti av 1 mio.kr av í 2020 og síðani umleið 3 mio.kr. um árið hareftir upp til ávísa upphædd.

Møguligt útgjald frá landinum til verkætlanina vil so til hvørt byggistig verða treytað av, at Landsbókasavn, Landsverk og UMMR góðkenna byggistigið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at:

- útgangsstøði fyri samráðingunum við Landsbókasavnið og Uttanríkis- og mentamálaráðið, er ein stigvíst ætlan fyri árini 2020-2024, har TK játtar umleið 3 mio.kr. um árið frá 2021-24 í løgujáttan og landið minst tilsvarandi.

- umsitingin fær gjørt endaliga byggiskrá, íroknað tíðarætlan til støðutakan í nevndum og býráð í 2020.

Mentamálanevndin 27. november 2019: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Enn er ikki avklárað viðv. lógarásetta stuðlinum frá landinum í heildarætlanini fyri Býarbókasavnið, men hetta verður væntandi greitt fyri summarið og áðrenn løguætlanin fyri 2021 hjá Tórshavnar kommunu verður samtykt í nov. 2020.

Fyri at fáa stigvísa gongd á, verður mett hóskandi at fáa gjørt eina minni verkætlan á 2. hædd á Býarbókasavninum, har tað pt. er eitt øki, ið hevur verið óbrúkt í mong ár vegna upprunaliga soppatrupulleikar o.a. Húsaumsitingin metir, at hesi høli kunnu fáast í hóskandi stand aftur fyri uml. 700 tkr. Ætlanin hjá Býarbókasavninum er at gera hølini til eina ungdómsdeild, ið serliga skal gera tað áhugavert fyri ungdómin at leita sær á gátt bæði fyri at læna viðkomandi bøkur og fyri at uppihalda sær. Hetta er eisini í tráð við galdandi mál og avriksavtalu hjá Býarbókasavninum. Á projektkonto 54001 Býarbókasavnið eru tøkar 908 tkr.
Skotið verður upp, at Húsaumsitingin fær heimild til at gera hóskandi avtalur um fakarbeiðstøkur (timbur, HVS, el v.m.) til at fáa hølini egnaði til ungdómsbókasavn og innan fyri ein kostnaðarkarm á 700 tkr. Arbeiðini verða boðin út sum undirhondsboð til minst 2 feløg. Projekteringin verður gjørd av Húsaumsitingini og uttanhýsis ráðgevum, sum umstøðurnar nú tilskila. Harumframt verður skotið upp, at Býarbókasavnið útvegar hóskandi innbúgv fyri 128 tkr.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at geva umsitingini heimild til at gera arbeiðstøkuavtalur um gerð av ungdómsdeild á Býarbókasavninum fyri upp til 700 tkr., umframt at útvega innbúgv fyri 128 tkr. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. apríl 2020:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá einum samlaðum býráðið um, at arbeiðið skal bjóðast út millum fleiri enn tveir arbeiðstakarar, ið varð einmælt samtykt.

Síðani varð atkvøtt um málið soleiðis broytt, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í viðgerðini seinast var viðmerkt at tað á projektkonto 54001 Býarbókasavnið eru tøkar 908 tkr. Tað er ikki heilt røtt upphædd. Á projektkontuni eru 670 tkr., meðan 238 tkr. eru á framflutta løgukarminum L00002. Neyðugt er sbrt. játtanarskipanini at játta hesa upphædd á projektkontuna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at samtykkja at flyta 238 tkr. av framflutta løgukarminum L00002 til projektkontu L54001 Býarbókasavnið. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtykt í mentamálanevndini 27. november 2019.

11. november 2020 svar Uttanríkis- og mentamálaráðið: "Sum tað sær út nú, er bygging av fólkabókasøvnum ikki raðfest í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg fyri 2021.

Landsstýrismaðurin fekk í september handað álit um dagføring av bókasavnslógini. Í áliltinum verður mælt til, at bókasavnslógin verður dagførd, og at skipanirnar við stuðli til rakstur og bygging av fólkabókasøvnum verða endurskoðaðar. Mælt verður í álitinum til, at arbeiðið at endurskoða skipanirnar verður gjørt í samráði við kommunurnar. Ætlanin er at leggja uppskot um nýggja bókasavnslóg fyri Løgtingið til várs."

Svarið fyriheldur seg ikki til ásetingarnar í § 15, stk. 2-3 í bókasavnslógini.

Við hesum kann staðfestast at umleið 5 ára samskifti við stjórnarráðið hevur verið til fánýtis.

Tískil er greitt, at framtíðar tilagingar mugu gerast við kommunalari fígging burturav. Bygningurin hevur alneyðugum tørv á ábótum og harumframt má støða takast til, hvussu ein dagføring av bygninginum til nútímans bókasavn kann fremjast og fíggjast av kommununi komandi árini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka til eftirtektar, at landskassastuðul fæst ikki til ætlanina, og at íløgur í verandi bókasavnsbygning ella nýggjan bygning verður at raðfesta innan kommunalu fíggjarætlanina burturav.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. desember 2020:** Samtykt at krevja, at landsmyndugleikin heldur galdandi bókasavnslóg og stuðulsskipanir, sum heimilaðar eru í hesi lóg.

**Ískoyti:**
Í apríl 2021 var arbeiðið boðið út sum undirhondsboð millum 2 feløg. Lægsta boð hevði Sp/f Valaverk. Umsitingin hevur gjøgnumgingið tilboðið saman við ráðgeva og er klárt at innganga arbeiðstøkusáttmála við Sp/f Valaverk á 1.321.461,50 kr. Hartil koma aðrar útreiðslur til ráðgeving, ókent, trygging, klárgerð v.m. soleiðis at samlaða upphæddin verður 1.700 tkr.

Í útboðnum liggja eisini neyðugar umvælingar av vesum og skiftiumstøðum á barnabókasavinum, ið eisini eru umstøður fyri ungdómsbókasavnið.

Tøka fíggingin á projektkontu L54001 Býarbókasavn í 2020 eru 908 tkr. Sostatt resta í 792 tkr.

Skotið verður upp at fíggja tann tørvin við 400 tkr. av yvirskotinum hjá Býarbókasavninum konta 5410 í framflytingini fyri 2020 og við 394 tkr. av yvirskotinum hjá Tórshavnar kvøldskúla konta 5210 í framflytningini fyri 2020.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:

a). at heimila umsitingini at gera arbeiðstøkusáttmála við Sp/f Valaverk á 1.321.461,50 kr. og at heimila ein heildarkarm á 1.700 tkr.

b). at flyta 400 tkr. av kontu 5410 Býarbókasavnið á projektkontu L54001 Býarbókasavn

c). at flyta 394 tkr. av kontu 5210 Tórshavnar kvøldskúli á projektkontu L54001 Býarbókasavn

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 12. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. juni 2021 | Blað nr.: 696<br><br>Formansins merki: |

# 174/21 Yvirtøka av ognini hjá FC Hoyvík á Gundadalsvegnum 8

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.05.2021 | 132/21 | 21/01794-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 09.06.2021 | 160/21 | 21/01794-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 152/21 | 21/01794-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 174/21 | 21/01794-1 |

**Upprunin til málið**
Heðin Mortensen, borgarstjóri og Annfinn Brekkstein, formaður í mentamálanevndini.

**Lýsing av málinum**
Í 2018 var eitt mál (mál nr. 18/00009) viðv. felagshúsi til FC Hoyvík. Tað málið endaði í sambandi við samtykt um gera eina fyribils hølisloysn til fótbóltsfeløgini FC Hoyvík og Undrið FF við Hoyvíksvøll. Tað arbeiðið er ígongd og koma leigusáttmálar tí viðv. til viðgerðar í næstum.

**Ognin hjá FC Hoyvík á Gundadalsvegnum**
Felagið eigur ogn í Gundadali (gamla Fram-húsið) á leigaðum lendi frá kommununi. Ognin er í ringum standi og ikki brúkilig til nakað stórvegis. Sambært ætlanini um nýtt torg við Tórsvøll skal ognin takast niður eins og hinar bygningarnir har.

Umsitingin hevur umrøtt upplegg til semju við felagið, har kommunan yvirtekur ognina fyri ásetta upphædd til felagið, sum tó verður at brúka beinleiðis til bygging av nýggjum felagshúsið, áskoðaraskýli, umklæðingarrúm v.m. samsvarandi krøvunum sbrt. vallarreglugerðini hjá FSF. Samstundis gevur kommunan lyfti um, at um kommunan í seinasta lagi 31. desember 2024 fer undir undir ítøkiligar fyrireikingar til at byggja bygning við Hoyvíksvøll, kann felagið krevja ásettu keypsupphæddina útgoldnað í árið eftir.

**Fíggjarviðurskifti**
Á løgukontuni fyri verkløg við Hoyvíksvøll er ávís upphædd (uml. 1.000 tkr.) enn tøk og ikki disponerað, ið mett verður kundi fíggjað hesa avtaluna.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávísøkir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at gera uppskot til sáttmála um yvirtøku av nevndu ogn og fyri upphædd í mesta lagi kr. 1 mió, sum bert fellur felagnum til gjaldingar, um kommunan ikki seinni enn 31. desember 2024 er farin undir ítøkiligar fyrireikingar at byggja felagshús v.m. Til endamálið kunnu kr. 1 mió avsetast av kontu 5775 Ítróttaranlegg L57034 Verkløg við Hoyvíksvøll.

**Mentamálanevndin 12. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í samráðingum við FC Hoyvík og er komin ásamt um at TK kann keypa ognina fyri 636 tkr. Sí hjálagt skeyti, umframt gera avtalu um at felagið leggur peningin í at fáa innrætta eina komandi nýggja hølisloysn við Hoyvíksvøll. Henda skal vera byrja innan 31. desember 2024 og kann felagið annars krevja upphæddina útgoldnað. Sí hjáløgdu ískoytisavtalu.

Upphæddin verður støðlað í roknskapinum hjá TK.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at keypa ognina á Gundadalsvegnum 10 frá FC Hoyvík fyri 636 tkr. sbrt. hjálagda skeyti og ískoytisavtalu og at flyta 636 tkr. av projektkontu L57034 Verkløg við Hoyvíksvøll á fíggjarstøðuna.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 09. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og við tí ískoyti, at kr. 1,5 mió verða játtaðar í fíggjarætlanini 2024 til at seta í gongd bygging av áskoðaraskýli við felagshølum við Hoyvíksvøll, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg og Annika Olsen.

## 175/21 Vegna nevndina í Bridgehúsinum Pól E. Egholm : Umbøn um fund viðvíkjandi Brigdehúsinum í Gundadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 17/18 | 16/01316-10 |
| 2 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 161/18 | 16/01316-10 |
| 3 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 268/20 | 16/01316-10 |
| 4 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 257/20 | 16/01316-10 |
| 5 Mentamálanevndin | 27.04.2021 | 107/21 | 16/01316-10 |
| 6 Fíggjarnevndin | 28.04.2021 | 101/21 | 16/01316-10 |
| 7 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 117/21 | 16/01316-10 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2021 | 104/21 | 16/01316-10 |
| 9 Mentamálanevndin | 09.06.2021 | 158/21 | 16/01316-10 |
| 10 Mentamálanevndin | 22.06.2021 | 186/21 | 16/01316-10 |
| 11 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 173/21 | 16/01316-10 |
| 12 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 175/21 | 16/01316-10 |

**Upprunin til málið:**
Brigdehúsið hevur vent sær til kommununa fyri at fáa avklára framtíðina hjá húsi felagsins, ið stendur á kommunalari grund.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í 2016 lat nevndin fyri Brigdehúsið skriv til kommununa viðv. verandi loysn fyri Brigdehúsinum í Gundadali. Húsið fevnir um virksemi hjá teimum 3 brigdefeløgunum í Havn. Sí hjálagt skriv.

Felagið hevur 3 uppskot til loysn:

1. At Tórshavnar kommuna veitir Brigdefeløgunum nýggj og egnaði høli. (sí hjálagt skriv við kravfesting).
2. At Tórshavnar kommuna yvirtekur Brigdehúsið í Gundadali nú og fremur tær neyðugu ábøturnar og bridgefeløgini fáa framíhjárætt at nýta húsið.
3. At Tórshavnar kommuna leingir verandi leiguavtalu í minst 10 ár, og hjálpir bridgefeløgunum at fíggja neyðugar íløgur.

Síðani skrivið hevur umsitingin samskift við brigdehúsnevndina við atliti at pkt. 1 uttan at hetta hevur ført við sær nakað sum felagið tekur undir við.

Felagið keypti húsið í 1992 frá Havnar Bóltfelag (sí hjálagt skjal) og fekk leigusáttmála við kommununa sama ár (sí hjálagt skjal). Í grein 2 er ásett at leigumálið ikki kann vera uppsagt fyrrenn til 1. Februar 2017, uttan so at leigarin í aðrar mátar ikki hevur hildið sáttmálan.

Á fundinum fer umsitingin at gjøgnumganga málið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin vendur aftur til nevndina við ítøkiligum tilmæli til ein komandi fund.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**
17. Januar 2018 var ástaðarfundur millum umsitingina og nevndina í Brigdehúsinum og limafeløgunum. Myndir eru tiknar, ið eru tøkar í hjáløgdum skjali. Sí eisini avrit av virðismeting, ið Sp/f Protek gjørdi í 2011.

Eftir fundin fær kommunan skriv har feløgini siga:
*"At bridgefeløgini ikki hava nakað serstakt ynski um at eiga hølir ella hús til sítt virksemi. At tað snýr seg um at hava føst, góð og væl egnaði høli til virksemi, við so lítið stríð og so lítlan kostnað sum gjørligt – uppá langt sikt. At Tórshavnar kommuna (TK) kanska skal nýta øki har vit eru, og at TK ynskir at skapa góðar karmar fyri ítrótt og frítíðarvirksemi í kommununi, eigur tí at kunna loysast skjótt, trygt og gott. Hóast húsini treingja til ábøtur, so hava tey eitt virði á t.d. 2 - 3 mió kr, og tí ynskja bridgefeløgini, at ein avtala við TK avspeglar tann veruleikan, at TK við keyp og yvirtøku av húsinum fáa eitt stórt virði sum feløgini hava skapt.*

*Møguleiki 1 omanfyri kann bera til, og Frúutrøð bleiv nevnt. Ímóti talar, at TK ynskir at selja ognir ið "leypa av"og at bridgefeløgini trívast væl í Gundadali.*
*Møguleiki 3 omanfyri hevur ein avmarking í, at TK bert kann stuðla við 33%, og at bridgefeløgini ikki ynskja at verða byggiharri í slíkari verkætlan, og ei heldur at taka upp lán.*

*Við at tillaga møguleiki 2 ynskja vit tí fylgjandi:*

*At TK keypir bridgehúsið fyri kr 1,00, pluss møgulig skuld og aðrar skyldur. Afturfyri fáa feløgini ein 30 ára leiguavtala fyri kr 0,00 um árið, og soleiðis at bert rakstrarútreiðslurnar verða goldnar av feløgunum. (alternativt keypir TK nú, men yvirtaka dispositiónsrættin um 30 ár). (alternativt keypir TK fyri kr 3 mió, og feløgini leiga frá TK fyri 100.000 p.a. í 30 ár – men tað gevur tað sama). Langtíðar viðlíkahald og umvælingar verða framdar av TK eftir avtalu við feløgini. Innibera umvælingar av húsinum, at virksemi má flytast út úr húsinum, skal TK fáa til vega líknandi og hóskandi hølir í tíðarskeiðinum. TK kann siga upp leiguavtaluna, um so er, at TK skal nýta húsini til annað endamál ella at tey skulu takast niður. Hetta tó bert, um TK kann bjóða feløgini hóskandi og samsvarandi hølir aðrastaðni.*

*Feløgini eru sinnaði at samstarva um hóskandi loysnir, og eisini um talan skal verða um, at byggja út og deila hølini við t.d. talvfelagið.”*

Økið húsini standa á, innganga í heildarætlanina fyri Tórsvøll/Gundadal. Tí er mest upplagt at húsini vera tikin burtur innan ávísa áramál. Eisini er upplagt at vita um felagið kann innganga í eina loysn saman við t.d. Telvingarfelagnum. Sí eisini mál 17/00846 Hølisviðurskifti o.a. – Havnar Telvingafelag.

**Tilmæli**
Trivnaðastjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at samráðast víðari við felagið um møguleikan at hýsa felagnum á øðrum stað og um møguligt saman við øðrum felag.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Víst verður til viðgerð í máli 18/01969 Tøkir skúlabygningar, umframt til mál 16/01194 Herluf Jakobsen: Áheitan vegna Bragdið um útvegan av hølum til felagið.

Av tí at felagið rykkir eftir eini avklåring og av tí at tað ikki longur er serliga sannlíkt, at tað verður rúm í komandi tøku skúlabygningunum til virksemi hjá Brigdehúsfelagnum verður mett hóskandi at geva felagnum afturboðan um tað og at fara undir tilgongd viðv. yvirtøku av bygninginum og endurgjald fyri tí.

Byrjað verður við samráðingum og roynt at fáa eina semju. Um tað ikki ber á mál verður er skipan í galdandi leigusáttmála um at partarnir biðja tveir óheftar metingarmenn um at áseta eitt hóskandi endurgjald fyri ognina á leigaðum lendi.

Á fundinum greiðir umsitingin frá metingum viðv. endurgjaldi og kostnaði av niðurtøku.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til:

a). um farast skal undir samráðingar við Brigdehúsfelagið um yvirtøku av ognini í 2021 ella 2022.
b). um samráðingar ikki bera á mál so at heimila umsitingini at fáa tilnevnt metingarmenn um at áseta endurgjaldið.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam samtykti at taka undir við a og b og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Mentamálanevndini.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Samskifti hevur aftur verið við Bridgehúsfelagið um yvirtøku av bridgehúsinum og endurgjald í tí sambandi, nú torgverkætlanin er farin í gongd.

Ynski teirra er, at framtíðar staðsetingin av bridgehúsinum verður í ítróttaøkinum, og at talan er um teirra egnu høli, sum ikki eru minni enn verandi, tvs. uml. 250 m2. Kommunan hevur ikki slík høli at bjóða til leigu, so tí verður mest sannlíkt talan um nýbygging.
Felagið leigar grundøkið, sum bygningurin stendur á, frá kommununi.

Mett verður, at ein semja um endurgjald skal hava sum fortreyt, at felagið sjálvt byggir sær nýtt felagshús, og at kommunan endurrindar felagnum í mesta lagi kr. 2.500.000 fyri gamla Bridgehúsið. Grundøkið kann skipast í nýggjum langtíðarsáttmála.

Byggi- og býarskipanarnevndin skal viðgera staðsetingina.

Mett verður, at fígging til endurgjaldið kann játtast av kontu 5775 Ítróttaranlegg L57015 Langhylur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild at samráðast og gera avtalu um endurgjald fyri bridgehúsið í mesta lagi kr. 2.500.000 fíggjað av kontu 5775 Ítróttaranlegg L57015 Langhylur.

Mælt verður harumframt til at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at staðseta nýggja bridgehúsið, og at møguligur leigusáttmáli um grundøkið verður at viðgera og samtykkja eftirfylgjandi.

**Mentamálanevndin 27. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Málið viðv. heimild at gera avtalu um endurgjald verður beint í býráðið um fíggjarnevndina, og málið um staðseting av nýggjum bridgehúsi verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið viðv. heimild at gera avtalu um endurgjald í býráðið.

Málið um staðseting av nýggjum bridgehúsi verður beint í byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Annika Olsen, atkvøður ímóti vísandi til, at eingin óheft meting fyriliggur av bridgehúsinum, ið kann verða grundarlag undir einari avtalu við felagið um endurgjald. Ynski er tó, at ein loysn verður funnin á hølisviðurskiftunum hjá felagnum.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Kristian M. Skála, Birgir Nielsen og Ruth Vang.
Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti:**
Bridgefelagið hevur virkað í Gundadali í umleið 30 ár. Fólkini handan felagið hava eitt stórt ynski um, at verða verandi í Gundadali, hóast felagshúsið nú eftir ætlan verður tikið niður í sambandi við at økið skal brúkast sum partur av býartorginum í Gundadali, mál nr. 20/04581, Tórsvøllur Torg.

Ymiskar staðsetingar hava verið umrøddar í sambandi við at finna felagnum eina nýggja staðseting. Niðanfyri eru 4 staðsetingar í Gundadalsøkinum lýstar yvirskipað:

1. Býarskipanarliga er Gundadalur eitt øki, sum er um at verða fult útbygt. Heildarætlanin fyri Gundadali vísir tó á møguligar útbyggingarmøguleikar. Í heildarætlanini verður víst á økið millum HB- og B36-húsið. Hetta er eitt øki, sum í dag stendur óbygt, og sum partvíst kundi hóska seg til eitt bridgehús. Um byggjast skal á hesum stað, so skal alt økið byggjast, og hevði tað verið upplagt, at bygt tað við møguleika fyri áskoðaraplássum út móti ovara vølli, umframt at kjallarahæddin verður nýtt til okkurt hóskandi. Kjallahæddin skal helst brúkast av virksemi, sum partvíst kann húsast í myrkri, av tí at stórur partur av bygninginum verður undir jørð. Virksemið hjá Bridgefelagnum vildi helst hóska seg betri í ovaru hæddini, har inniklimaði kann gerast gott til kortspæl.
   Økið liggur í D2 í Almennu byggisamtyktini, har umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum, umframt at økið liggur í C3 í serstøku byggisamtykt nr. 3 og verður kannað ítróttum og tílíkum.

   Fyrimunur við staðsetingini er, at tað er rættiliga lætt at fara undir bygging á hesum stað.
   Vansar við staðsetingini er, at her skulu byggjast rættiliga nógvir fermetrar, sum møguliga ikki er hóskandi til Bridgefelagið, umframt at fótbólsfeløgini í fleiri umførum hava havt ymisk ynskir til økið.

2. Ein onnur staðseting, sum hevði hóskað seg væl til virksemið og teirra ynskir um at verða í Gundadalsøkinum, er í økinum við Tórsbreyt. Kring Tórsbreyt er møguligt at byggja rættiliga nógvar fermetrar, og eigur hendan loysnin at verða umhugsað sum ein framtíðar útbyggingarmøguleiki, bæði til at húsa ymiskum ítróttarligum virksemi, men so sanniliga eisini fyri at betra um veður og hølis avbjóðingarnar, sum virkandi ítróttarfeløgini á Tórsbreyt stríðast við. Við at staðseta bridgefelagið í hesum økinum, so kundi skjøtil verið settur á enn ein ítróttarmiðdepil, sum vildi gagnað fleiri enn bara Bridgefelagnum, tí tørvur er støðugt á fleiri hølum til ymisku ítróttagreinarnar, sum virka í høvuðsstaðnum.
   Økið liggur í D2 í Almennu byggisamtyktini, har umráðispartarturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.
   Fyrimunir við staðsetingini er, at skjøtil verður settur á arbeiðið at menna Tórsbreyt til eina veruliga kappingarbreyt, umframt at møguleiki er fyri at staðseta fleirir ítróttargreinar á økið, sum í dag tørva fermetrar.
   Vansar við staðsetingini er, at kommunan má luttaka við í planleggingini av økinum, umframt at tað møguliga verður ein longri tíðarhorisontur, tá Bridgefelagið einans hevur tørv á fáum fermetrum í økinum.

3. Ein triðja staðseting, sum hevur verið umrødd í sambandi við at vísa á eina staðseting til Bridgefelagið, er á matr. nr. 1268b, sum er økið beint yvir av verandi Bridgehúsi. Leigusáttmáli er galdandi fyri part av økinum, har ein privatur vinnubygningur stendur á leigaðum lendi hjá kommununi. Hóast leigusáttmálan, so eigur ikki at verða nøkur forðing í at byggja á hesum økinum. Í sambandi við at Tórsvøllur er bygdur, so er eitt parkeringskrav upp á 150 parkeringspláss, har 75 pláss skulu skipast inni á sjálvum byggiøkinum og kann restin teljast millum tey, sum longu eru í Gundadalsøkinum. Sum liður í at skipa Tórsvallar torgið verður økið aftan fyri Gundadalshøllina og økið sunnan fyri Gundadalsvegin skipað sum grøn parkeringspláss fyri at nøkta parkeringskravið frá UEFA, og verður vøkstur við til at skipa innrættingina og skapa eitt grønt umhvørvi.
   Økið liggur í C1 øki í serstøku byggisamtykt nr. 3, sum er lagt til miðstaðarbygging. Mest loyvda byggistig er 0,4 og mest loyvda nýtslustig er 0,8. Grundstykkið er 1250 m$^2$, og um bygt verður í einari hædd, kunnu í alt uml. 500 m$^2$ byggjast (inkl. aðrir bygningar á stykkinum).
   Fyrimunir við staðsetingini erfjór, at økið er lætt at fara til.
   Vansar við staðsetingini er, at ætlanirnar at innrætta parkeringsøkið og fríðka um í økinum tá ikki kunnu gerast og verður parkeringstørvurin helst óneyðuga stórur í hesum partinum at Gundadali.

4. Fjórða staðsetingin, sum hevur verið umrødd, er partur av matr. nr. 1292n, sum er á Oknarvegi, á vegnum til nýggja høvuðssæti hjá Bank Nordik. Matrikulin er 2000 $m^2$ til støddar, og rúmast Bridgefelagið væl á hesum økinum, og tískil kann hugsast, at bert ein partur av økinum skal setast av til Bridgefelagið.
   Økið liggur í umráðispartinum A í serstøku byggisamtyktini nr. 3 og er ætlað til sethúsabygging. Hóast økið liggur í sethúsaøki, so verður mett, at tað er grundarlag fyri at broyta ásetingarnar fyri økið, tí matrikulin er í beinleiðis sambandi við hotel- og bankavirksemið, sum annars í økinum.
   Fyrimunir við staðsetingini er, at økið er rímiliga lætt at fara til.
   Vansar við staðsetingini er, at byggisamtyktin skal broytast fyri at virksemið kann verða staðsett í hesum økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at heimila umsitingini at fara í samráðingar við felagið um part av økinum á matr. nr. 1292n, Oknarvegur – staðseting 4.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2021:** Samtykt at fara víðari við staðseting 3.

**Mentamálanevndin 09. juni 2021:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Bridgehúsfelagið tekur undir við staðsetingini til nýggja Brigdehúsið á matr.nr. 1268b, sum byggi- og býarskipanarnevndin hevur samtykt.

Uppskot til semju fyriliggur, sum Bridgehúsfelagið tekur undir við. Upphæddin, sum kommunan skal endurgjalda felagnum fyri verandi Bridgehús, verður kr. 2,5 mió, ið er tann upphæddin, sum býráðið samtykti 29. apríl 2021. Møguligur yvirtøkudagur av húsinum verður at avtala nærri.

Aftrat skal kommunan játta íløgustuðul (konta 5370 stuðul til íløgur) til byggingina í mesta lagi kr. 1,5 mió svarandi til uml. triðingin av metta byggikostnaðinum. Henda játtan verður at rinda í tveimum líka stórum pørtum árni 2022 og 2023.

Endalig bygging er treytað av byggiloyvi, og herundir viðgerð hjá friðingarmyndug-leikunum av tí at talan er um bygging tætt uppat viðarlundini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka støðu til uppskotið um semju.

Um samtykt, mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til at gera keypssáttmála fyri kr. 2,5 mió sbrt. hjálagda skeyti. Harumframt verður mælt til at fíggja íløgustuðul til nýtt Bridgehús á fíggjarætlanini fyri 2022 við upphædd kr. 750.000 og fyri árið 2023 kr. 750.000.

Mælt verður eisini til at gera leigusáttmála við Bridgehúsfelagið um part av lendinum matr.nr. 1268b, tá neyvari avmarking av grundøkinum er gjørd.

**Mentamálanevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

## 176/21 Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu: Støðan og framtíðar løgutørvur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 324/19 | 19/04413-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 9/20 | 19/04413-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 21.01.2020 | 33/20 | 19/04413-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 12/20 | 19/04413-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 10/20 | 19/04413-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 73/20 | 19/04413-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 78/20 | 19/04413-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 27.04.2020 | 123/20 | 19/04413-1 |
| 9 Býráðsfundur | 06.04.2020 | 55/20 | 19/04413-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 29.04.2020 | 110/20 | 19/04413-1 |
| 11 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 80/20 | 19/04413-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 171/20 | 19/04413-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 225/20 | 19/04413-1 |
| 14 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 264/20 | 19/04413-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 256/20 | 19/04413-1 |
| 16 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 13/21 | 19/04413-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 22.02.2021 | 40/21 | 19/04413-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 15.03.2021 | 56/21 | 19/04413-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 49/21 | 19/04413-1 |
| 20 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 87/21 | 19/04413-1 |
| 21 Mentamálanevndin | 24.03.2021 | 67/21 | 19/04413-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 25.03.2021 | 73/21 | 19/04413-1 |
| 23 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 160/21 | 19/04413-1 |
| 24 Mentamálanevndin | 09.06.2021 | 157/21 | 19/04413-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 154/21 | 19/04413-1 |
| 26 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 176/21 | 19/04413-1 |

**Upprunin til málið:**
Umsitingin.

**Samandráttur**
TK hevur 5 fótbóltsvallir í fullari stødd, umframt Eysturvøll og tilhoyrandi stadion kring leikvallirnar. Talan er um stór og týðandi anlegg, ið hýsa umfatandi virksemi gjøgnum stóran part av árinum, men eisini anlegg, ið tørva regluligar dagføringar v.m. Í málinum verður gjørd eina støðulýsing, umframt givið eitt boð uppá framtíðar løgutørv.

**Lýsing av málinum**

<u>Alment</u>
Metingarnar í hesum yvirlitinum eru í høvuðsheitum grundaðar á metingar hjá umsitingini og Ítróttaanleggum. Talan er um yvirskipaðar metingar, sum skulu takast við ávísum fyrivarni, men sum geva eina rímiliga greiða ábending. Í hvørjum einstaka føri vil ítøkilga tilgongdin geva eitt endaligt svar uppá kostnaðir v.m.

**Viðv. tørvi á at skifta graslíki:**

- Ovari vøllur í Gundadali
Seinasta vallarkanningin í sambandi við UEFA-dystir var gjørd á várið 2019 og fekk vøllurin aftur góðkenning. Sí hjálagt skjal. Vøllurin er enn í rímiligum standi, men verður neyðugt at fyrireika eina møguliga útskifting innan stutta tíð. Ítróttaanlegg leggur seg eftir at halda vøllirnar væl og hevur m.a. júst í summar lagt á meiri gummigranulat. Vøllurin verður kannaður árliga. Málið er at vøllurin heldur minst til á sumri 2021 og skiftast á sumri 2021. Feløgini í Gundadali mæla hinvegin til at skifta vøllin í 2020, og at sprinkling eigur at verða løgd undir vøllin. Vøllurin er næsttýdningarmikli fótbóltvøllurin hjá TK.  og verður mett at útskifting av vøllinum er mett til umleið 3.300 tkr., við sprinkling nærri 5.000. tkr

- Niðari vøllur
Vøllurin er nógv skalaður í sambandi við Vesturskýlisverkætlanina á Tórsvølli. Verkætlanin er væntandi farin av vøllinum á heystið 2020 og verður mælt til at gera økið í stand aftur og skifta vøllin á várið 2021, enn er tó óvist viðv. skaðum og lendisarbeiði. Saman við neyðugum lendisarbeiði verður samlaði kostnaðurin mettur til uml. 5.000-5.500 tkr.

- Vøllurin Inni í Vika/Argir
Vøllurin er tann elsti – umleið 10 ár og stendur fyri útskifting. Ítróttaanlegg leggur seg eftir at halda vøllirnar væl og hevur m.a. júst lagt á meiri gummigranulat, men er tað uppá lánta tíð. Málið er at vøllurin heldur minst til og við 2021 og skal í seinasta lagi skiftast á várið/sumri 2022. Útskifting av vøllinum er mett til umleið 3.000 tkr.

- Tórsvøllur
Seinasta vallarkanningin var gjørd á várið 2019. Sí hjálagt skjal. Ítróttaanlegg leggur seg eftir at halda vøllirnar væl og hevur m.a. júst lagt á meiri gummigranulat. Vøllurin verður kannaður árliga. Málið er at vøllurin heldur minst til og við 2020, og sostatt ikki skiftast fyrrenn á vári/sumri 2021. Hinvegin ætlar FSF at skifta vøllin í 2020 í sambandi við, at FSF er vertur fyri EM-endaspæli fyri U17 í apríl/mai 2020. Vøllurin er týdningarmiklasti fótbóltvøllurin í TK og verður mett, at útskifting av vøllinum, flyting og umskipan av sprinklaraskipan (7 pkt. til 12. pkt.) o.a. verður mett til umleið 5.000 tkr. FSF hevur sagt seg vera sinnað at rinda 50% av kostnaðinum.

- Eysturvøllur
Vøllurin er sum heild í góðum standi og er ætlanin at hann skal halda nøkur ár afturat.

- Hoyvíksvøllur
Vøllurin er í góðum standi. Tað ganga fleiri ár áðrenn tørvur aftur er á útskifting.

**Viðv. krøvum frá FSF til ljósskipanir við vallirnar**:

Alment

Vallarreglugerðin hjá FSF setur krav um 250 lux til dystir í fremstu og næstfremstu deild, tó um gjørd verður skipan við 350 lux fæst 400 tkr. (við fyrivarni!) í stuðli frá FSF/Hattrick-grunninum. Í tann mun feløgini ikki uppfylla treytirnar skulu tey vísa á ein tiltaksvøll tá tørvur er á tí. Her vísir kommunan á Tórsvøll.

- Ovari vøllur
Ljósstyrkin pt. er umleið 80 lux. Skal vøllurin uppfylla vallarreglugerðina er ábending um, at bæði fundament og mastrar skulu skiftast umframt lutvíst nýggjar el-talvur, kábling og + nýggir projektørar. Kostnaðurin er helst umleið 5 mio.kr, tá roknað við LED-tøkni.

- Argir
Styrkin pt. er nøkur tíggju lux og uppfyllir ikki vallarreglugerðina. Helst mugu fundament, mastrar, elskipan og projektørar gerast av nýggjum. Kostnaðurin er helst umleið 5 mio.kr, tá roknað við LED-tøkni.

- Niðari vøllur
Er framyvir mest ein venjingarvøllur og ikki til dystir í fremstu og næstfremstu deild. Í sambandi við Tórsvallaverkætlanina verða mastrar og ljós skift á eystaru síðu og kostar tað nakrar fáar hundrað túsund. Vestara síða er eisini um at verða útlivað og kostar helst minst eini 1.500 tkr. at dagføra.

- Hoyvíksvøllur
Ljósskipanin er nýggj og ca. 250 lux og tekur seg væl út og tykist hava lítlan ampa fyri grannalag. Uppfyllir vallarreglugerðina hjá FSF. Ongin orsøk sum er til broyting ella stórvegis íløgur.

- Eysturvøllur
Tað verður ikki mett neyðugt við nøkrum serstøkum átaki.

**Umstøður kring station**

- Ovari vøllur í Gundadali
Í sambandi við skifting av graslíkinum er tørvur á at gera nýggja girðing, umframt aðrar ábøtur á vestaraskýli o.a.

- Niðari vøllur
Í sambandi við upprætting av undirlagnum og nýggjum graslíki skal eisini nýggj girðing gerast, umframt finna eina góða loysn fyri økið móti ovara vølli.

- Vøllurin Inni í Vika/Argir
Tørvur á at gera ymiskar ábøtur, herundir betri p-viðurskifti, snøgga kring stadion v.m.

- Tórsvøllur
Er partur av øðrum máli. Stig 8 í avtaluni við FSF um økið har bygningarnir við niðara vøll standa – er næst á skrá.

- Eysturvøllur
Ynskiligt at fingið gjørt fleiri p-pláss norðanfyri stadion.

- Hoyvíksvøllur
Tørvur er á eini røð av hentleikum. Station hevur undantak frá reglunum í Vallarreglugerðini. Talan er um mio.kr. tørv. Av kringumstøðunum kunnu nevnast tørv á at tryggja skráningin norðanfyri móti Skúlanum við Løgmannabreyt, at gera áskoðarapláss, felagshús til skifting v.m. Umframt átroðkandi tørv á at gera hægri girðing sunnanfyri vøllin móti Jørundargøtu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongi.

**Møgulig frávik/læettar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Graslíkisvallir hava við sær umhvørvisárin herundir serliga dálking frá gummigranulati o.a. Umsitingin og Ítróttaanlegg leggur seg eftir at loysnir og røkt eru so frægar sum gjørligt.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin kemur við einari endaligari tilráðing um raðfestingar og tíðarætlan til ein komandi fundi

**Mentamálanevndin 27. November 2019:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Eftir viðgerðina seinast er fíggjarætlanin fyri 2020 samtykt, umframt at tað í langtíðar-íløguætlanini er lagt upp til fígging til áhaldandi dagføringar 2021 og 2022.

Á løgukontu 5775 eru fyri fíggjarárið 2020 játtaðar 5.000 tkr. til Gundadal/Argir (vallarøkið) og ætlaðar 4.000 tkr. til 2021 og 3.000 tkr. 2022, umframt ætlaðar 7.000 tkr. í 2021 til ljós til vøllir í Gundadali og á Argjum.

**Sjónarmið hjá HB og B36**
Umsitingin hevur havt fund við HB og B36 um raðfestingar av tøka løgukarminum fyri 2020 og hugsanir um ár 2021 og framyvir og umrøddu, um feløgini mettu, at ljósskipan ella graslíki skuldi koma fyrst í raðfestingunum fyri 2020. Hetta tí tað ikki er fíggjarliga møguligt at fremja báðar verkætlanirnar í 2020 fult út innan fyri givna fíggjarkarmin. Teirra einmælta tilmæli er, at TK skiftir graslíki á ovara vølli á sumri 2020 og um møguligt eisini at fáa sprinklaraskipan til vøllin ella at gera fyrireikingar til tað.

Við støði í galdandi samtyktu fíggjarætlan fyri 2020 og teimum teimum fíggjarligu útlitunum, umframt tilmælinum frá HB og B36, umframt dialogi við FSF, verður mett, at fylgjandi raðfesting er eitt boð upp á raðfestingar í 2020, 21 og 22. Henda raðfesting er tó ikki meiri føst enn at hon kann endurskoðast, so hvørt orsøkir eru til tess.

**Ráðgeving í sambandi við verkætlanirnar**
Gerast skulu avtalur um ráðgeving um graslíkisvøllin. Hartil kemur spurningurin um sprinkling. Verður avgjørt at fara undir fyrireikingar til at gera spinklaraskipan til ovara vøll, er eisini upplagt hava í huga framtíðar tørvin at leggja rør til útskifting av el-kaðalum til komandi nýggju ljósskipanina.

Arbeiðið uppá nýggja Vesturskýlið á Tórsvølli gongur sína gongd og herundir liðugtgerð av horninum móti B36 húsinum. Ein komandi nýggj ljósmastur til ovara vøll skal sannlíkt setast har á leið, og er tí upplagt at fáa gjørt eitt mastrafundament til hana longu nú í 2020, so tað ikki verður neyðugt at fara afturumaftur í 2021, tá ljósskipan annars ætlandi skal gerast við Ovara vøll.

Sostatt er greitt, at talan er um eina samanseting av fleiri ráðgevaraøkjum t.v.s. innan lendis- og graslíkisviðurskifti, innan sprinklaraskipan (HVS) og innan konstruktión og el hvat viðvíkur mastrafundamenti til nýggja ljósmastur við B36 húsið/Tórsvøll.

Um tað skal bera á mál, serliga við at skifta graslíki á sumri 2020, er neyðugt at fáa gjørt avtalur við ráðgevast sum skjótast og fáa boðið arbeiðini út.

Hvat viðv. gerð av mastrafundamenti við B36-húsið verður mett mest hóskandi at geva ráðgevunum, ið eru á teirri verkætlanini, møguleika fyri at gera ískoytisavtalu um tað, umframt at geva høvuðsarbeiðstakaranum har høvi at gera avtalu um gerð av arbeiðinum. Hetta tí at tað vanliga vil vera óneyðuga tvørligt at fáa aðrar ráðgevar og arbeiðstakarar inn um entreprisumark, har aðrir longu virka.

**Máltalva/stórskermur**
Verandi stórskermur er ikki í nøktandi standi til at tað er ráðiligt at brúka hann til komandi kappingarár, ið byrjar í mars 2020. Tí er átroðkandi sum skjótast at fara undir at útvega ein nýggjan. Umsitingin hevur kannað, um tað hevði borið til at leigað ella langtíðarleigað ein slíkar stórskerm í staðin fyri at keypa hann. Fyrimunurin við at leiga er minni tekniskur váði og skjótari útskifting, ið vanliga vildi verið 5. hvørt ár. Mettur kostnaður fyri ein slíkan skerm er upplýstur í hjálagda fylgiskjali.

**Meting um hvat letur seg fremja innan fyri setta fíggjarkarmin**
Vegna atlit til marknaðar- og kappingarviðurskifti eru mettar upphæddir o.a. lagdar í hjálagda fylgiskjali.

**Tórsvøllur stadion**
Tórsvøllur, sum tjóðarleikvøllur Føroya, er mentur og bygdur stigvíst í tøttum samstarvi millum FSF og TK. Sí hjálagt avrit av galdandi sáttmálum millum FSF og TK og sí eisini mál 16/00962 Tórsvøllur - vestursíðan. Arbeitt verður við at gera endaligu rakstraravtaluna fyri Tórsvøll lidna til nevndarviðgerð í vár.

Vísandi til seinastu vallarkanningina av Tórsvølli, og av tí at FSF er vertur fyri HM endaspæli fyri U17 kvinnur í mai-juni 2021, ynskir FSF at skifta graslíki á Tórsvølli í 2020. Eisini ynskir FSF at fáa gjørt fleiri sprinklaradysur og fáa flutt verandi sprinklaradysur á vøllinum soleiðis, at tær eru nærri leikvallarøkinum. Í dag eru dysurnar staðsettar soleiðis, at tær ofta koma at standa innan fyri talgildu ljósbandareklamurnar og tí ikki kunnu virka sbrt. endamálinum.

FSF er til reiðar at leggja út fyri verkætlanina, treytað av at FSF og TK gera eina avtalu um, at TK rindar sín part av verkætlanini við seinni høvi. Fyribils metingin av verkætlanini er upplýst í hjálagda fylgiskjali og tá gingið út frá, at lagt verður upp til at útvega allarbestu dygd av graslíkisteppi og gummigranulati. Harumframt er ætlanin at leiga ein nýggjan stórskíggja til stadion.

Eisini er lagt upp til at fáa sett ein fjarhitavekslara til hitaskipanina í vøllinum og soleiðis fáa eina eyka trygd fyri, at týðandi landsdystir kunnu verða spældir størri part av árinum. Ætlanin er at kanna, um sami vekslari kann veita hita til Fimi, B36-húsið og HB-húsið. Mettur kostnaður er upplýstur í hjálagda fylgiskjali.

Samstundis er eisini ynskiligt at kunna bjóða út veitingina av graslíki av báðum verkætlanunum í senn og soleiðis vónandi kunna spara nakað.

**Viðv. fyribils raðfestingum fyri 2021 og 22**
<u>2021</u>
Endurskapan av lendinum og skifting av graslíki við niðara vøll í Gundadali, umframt at gera nýggja ljósskipan til ovara vøll.

<u>2022</u>
Skifta graslíki á Argjum og at fáa nýggja ljósskipan har.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini at fara í samráðingar við FSF um at gera samstarvsavtalu um at skifta graslíki, flyta sprinklaraskipanina á Tórsvølli í 2020, umframt verkætlan við hitavekslara, og at TK rindar sín part í 2021 og 2022 og at venda aftur við eini avtalu til støðutakan.

b). at heimila umsitingini at heinta tilboð og fara í samráðingar við ráðgevar innan viðkomandi fakøki til at fremja pkt. a. og at venda aftur í nevndina við einum úrsliti til støðutakan.

c). at heimila umsitingini at heinta tilboð og fara í samráðingar við ráðgevar innan viðkomandi fakøki til at skifta graslíki á ovara vølli í Gundadali á sumri 2020, umframt gera fyrireikingar til at gera sprinklaraskipan á vøllinum og at venda aftur í nevndina við einum sáttmála til støðutakan.

d). at heimila umsitingini at samráðast við ráðgevar á Tórsvallar-vesturskýlisverkætlanini (t.e. Sp/f MAP, Sp/f HMP Consult og P/F LBF) um at gera eitt mastrafundament í horninum millum B36-húsið og Tórsvøll til eina komandi nýggja ljósskipan við ovara vøll og venda aftur í nevndina við einum sáttmála til støðutakan.

e). at flyta 5.000 tkr av løgukarminum konta 5775 á nýggja projektkontu.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 21. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle tekur undir við Mantamálanevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, mælir til at skifta grásliki á ovara vølli og at fáa ljósviðurskiftini í rættlag í ár og játta neyðuga peningin av konto nr. 6275.

Málið beint í býráðið.

**Ískoyti:**

**Viðv. Tórsvølli**
TK og FSF eru komin á samt um samstarvsavtalu um verkløgini við Tórsvøll Stadion. Sí hjálagt uppskot.

**Viðv. fjarhitaskipan til Tórsvøll**
Ítróttaanlegg eru í holt við saman við ráðgeva at gera eina fyribils loysn við at nýta tveir hitavekslarar, ið TK eigur frammanundan, og knýta teir í fjarhitaskipanina og vallarskipanina. Kostnaðirnir í hesum umfari eru arbeiðsløn at gera arbeiðið, umframt útvegan av frostvesku til hitaskipanina í vøllinum. Kostnaðurin í hesum umfarinum verður mettur til 200 tkr. Um royndin eydnast væl, skal støða takast til, um hetta er ein nøktandi og varandi loysn. Talan er um eina loysn, ið gevur umleið 1,4 MW og gevur eisini fjarhita til hornabygningin á Tórsvølli, har skipanin er staðsett.

**Viðv. verkløgunum annars á Tórsvølli**
Umsitingin saman við ráðgeva er í holt við at fyrireika og bjóða út arbeiðini viðv. nýggjum grasliki, flyting av sprinklaraskipanini, umframt útvegan av nýggjum stórskíggja. Væntandi verður klárt at taka støðu til tilboðini í mars.

**Viðv. verkløgum á Ovara vølli**
Fyrireikingar eru í gongd viðv. gerð av avtalum um gerð av mastrafundamenti í eina horninum á Ovara vølli, móti B36 húsinum. Væntandi verður tað arbeiðið útint á sumri 2020. Ráðgevi er eisini í holt við at fyrireika og bjóða út verkløgini við Ovara vøll. Væntandi verður klárt at taka støðu til innkomin tilboð í mars.

**Stórskíggi til ovara vøll**
Umsitingin hevur viðgjørt møguleikan at leiga ein skíggja. Mett verður hóskandi at útvega ein stórskíggja til ovara vøll beinanvegin. Ítróttanlegg heintar inn tilboð.

**Umhvørvisatlit**
Umhvørvisdeildin hevur gjørt vart við, at TK hevur tikið undir við sonevndu KIMO ásetingunum (sí hjálagt skjal) fyri at minka um dálking frá graslíkisvøllum. Tað verður kannað nærri, hvussu TK á frægasta vís kann betra um umhvørvisviðurskiftini í sambandi við verkætlanirnar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:
a). at taka undir við samstarvsavtaluni við FSF
b). at heimila umsitingini at útinna fyribils loysn viðv. íbinding av fjarhitaskipan til Tórsvøll.
c). at heimila umsitingini at útvega stórskíggja til ovara vøll við leiguavtalu.
Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 06. apríl 2020:** Atkvøtt varð um tilmælini frá fíggjarnevndni 22. januar 2020 og 1. apríl 2020, og vórðu tey einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
20. apríl 2020 var licitatitón uppá endurnýggjan av graslíkisvøllinum, og annað viðkomandi í hesum sambandi, til Ovara vøll í Gundadali.

Seks feløg vóru boðin at bjóða. Trý lótu inn tilboð.

Hesi vóru:
Laiderz Aps. (filial skrásett í FO)
Metatron EHF/Polytan Danmark A/S
Unisport Scandinavia A/S / Jónfinn Olsen

Í hjálagda fylgiskjalið sæst licitatiónsprotokollin.

Ráðgevin og umsitingin hava viðgjørt tilboðini og er hjálagda tilmæli komið frá ráðgevanum.

Mælt verður til at Laiderz Aps. fær møguleikan at gera sáttmála um verkætlanina. Hetta tí at felagið hevur lægsta boð og at dygd v.m. er í samsvari við krøvini í útbjóðingartilfarinum. Sama felag vann eisini útboðið seinast TK bjóðaði út – tá graslíki v.m. til nýggja Hoyvíksvøll.

Tá verkætlanin var boðin út, var ávís óvissa um standin á stoytdoyvingarlagnum, men er ráðgevin komin eftir, at tað sera sannlíkt er tørvur á at skifta tað nú og er tað tí tikið við.

Vegna økt krøv til burturbeining av verandi tilfari og ávís óvissa kring kostnaðin fyri sjálva innlatingina til Brennistøðina og møguliga endurnýtslu, verður mælt til at kostnaðurin fyri burturbeining (pos. 2.5 og 2.6) ikki verður partur av sáttmálanum, men at TK sjálvt ger avtalu um tað. Loysnin er antin at senda tilfarið samlað til endurnýtslu ella at gera sortering í Føroyum. Hetta verður kannað nærri komandi vikurnar.

Áljóðandi er sáttmálin (høvuðstilboð Laiderz) sostatt: 3.235.660 kr. (uttan kommunalt MVG)
Harumframt er sett av 900 tkr. til ráðgeving, ókent (herundir burturbeining v.m.) og kommunalt MVG.

**Áleggingartíðspunkt**
Arbeiðið verður ætlandi gjørt frá umleið mánaðarskiftinum juni/juli og umleið 4 vikur fram. Ætlanin er avstemmað við HB og B36 og FSF. Í juni 2020 vera fyrireikingar gjørdar viðv. komandi sprinklaraskipanini, so tað ikki kemur í vegin seinni og er klárt tað hetta verklagið verður útint.

**Fíggjar- og búskaparviðurskifti**
Á projektkontu L57031 eru 5.000 tkr. tøkar. Hetta inniber sostatt at tað, sum var í ætlanini fyri 2020 ikki letur seg gera fult út í 2020. Til ein komandi fund kemur tilmæli um restina av verkløgunum í Gundadali.

**Umhvørvisviðurskifti**

Samskifti hevur verið við Umhvørvisdeildina um betranarátøk til frama fyri betri umhvørvisvernd móti dálking frá mikroplasti og verða ymisk tiltøk framd í 2020 og 21 í hesum sambandi.

**Farsóttarstøðan**
Vegna serligu støðuna er ávís óvissa kring nøkur viðurskifti, ið annars ikki eru vanlig. Roynt verður at taka neyðug fyrilit tí viðvíkjandi. Í evsta lagi kann tað viðføra meirkostnaðir.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndin til at samtykkja at taka av høvuðstilboðnum frá Laiderz Aps. og at gera sáttmála við felagið á 3.235.660 kr. (uttan kommunalt MVG) at fíggja av projektkontu L57031. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 29. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
VIÐV. VERKLØGUM VIÐ OVARA VØLL
Vallarverkætlanin
TK hevur skrivað undir sáttmála við Laiderz Aps. um endurnýggjan av graslíknum við Ovara vøll í Gundadali. Arbeiðið byrjar um mánaðarskiftið juni/juli 2020 og tekur væntandi 4-6 vikur.
Tá kappingarárið er liðugt seint í 2020 verður farið undir at gera ristir og brunnar økinum kring vøllin til at samla upp mikroplast frá vøllinum og harvið tryggja at leikvøllurin lýkur KIMO-ásetingarnar.

Sprinklaraskipan
Umsitingin og ráðgevin eru í holt við fyrireiking til at fáa útvega og sett upp 8 sprinklaraboksir kring vøllin. Arbeiðið verður ætlandi framt um mánaðarskiftið juni/juli 2020.

Tá kappingarárið er liðugt seint í 2020 verður ætlandi farið undir at leggja rør til sprinklarahúsið.

Mastrafundament í horninum millum B36-húsið og Tórsvøll

Umsitingin og ráðgevin eru í holt við fyrireiking til at fáa projekterað og útint at gera eitt fundament í horninum millum B36-húsið og Tórsvøll. Arbeiðið verður ætlandi útint í august/september 2020.

Tá kappingarárið er liðugt seint í 2020 verður farið undir at leggja el-kaðalar kring vøll til nýggja elskipan, ið skal veita streym til nýggju ljósmastrarnar kring vøllin. Nærri tilmæli um útbjóðing av verkætlanini viðv. ljósmastrum verður lagt fyri nevnd í heyst og verður ætlandi útint fyrst í 2021.

VIÐV. VERKLØGUM VIÐ TÓRSVØLL
Verkætlanin viðv. fjarhitaskipan er framt. Í september verður farið undir fyrireikingar til flyta sprinklaraskipanina, umframt fyrireikað útbjóðing av at endurnýggja graslíkið. Ætlandi verður tað bjóðað út saman við veiting av nýggjum graslíki til Niðara vøll í Gundadali.

VIÐV. VERKLØGUM VIÐ NIÐARAVØLL
Í september verður byrjað uppá fyrireikingar og verða mál løgd fyri nevndina í oktober 2020.

Fíggjar- og búskaparviðurskifti

Á fundinum vera dagførdar kostnaðarmetingar fyri verkløgini í 2020 og 21 gjøgnumgingnar.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at umsitingin arbeiðir víðari við at fyrireika og fremja verkløgini.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
VIÐV. VERKLØGUM VIÐ TÓRSVØLL
Í dialogi eru kommunan og FSF komin ásamt um at graslíkið á Tórsvølli skal skiftast í juli 2020, umframt flyting av sprinklaraskipanini verður gjørt um sama mundi. Eisini fer at vera kannað um tað ber til at fáa spinklaraskipanina til at arbeiða skjótari, so tað ber til at sprinkla vøllin í hálvleikinum. Skotið verður upp at útbjóðingin at graslíkisveitingini til vøllin verður boðin út saman við arbeiðinum við nýggjum graslíki og stoytdoyvingarlagi til niðara vøll, men at útboðið eisini er sett soleiðis saman at FSF og kommunan eisini kunnu velja bara at taka av øðrum. Fyri at hava rímiliga tíð til útbjóðingartilgongdina verður mett hóskandi at fáa heimild til útboð soleiðis at støða kann takast til tilboð antin í desember 2020 ella januar 2021. Ætlanin er at halda fram við P/F LBF sum høvuðsráðgeva.

VIÐV. VERKLØGUM VIÐ OVARA VØLL
-Vøllurin
Arbeiðið við vøllin er nú avhendað. Ætlanin verður vøllurin skoðaður í mun til FSF og UEFA krøv innan 2 vikur.
Endalig uppgerð av arbeiðinum higartil verður tøk til fundin.
- Sprinklaraskipan
Rør og kassar eru lagdir í vøllin og er nú eftir at fara undir liðugtgerð av sprinklaraskipanini við pumpuskipan, stýring v.m.. Alt eftir uppgerðini av arbeiðinum higartil, er ætlanin antin at fáa gjørt arbeiðið liðugt innanfyri verkætlanina ella evt. at fíggja ein part av rakstrinum. Nærri frágreiðing og møguligt tilmæli kemur til fundin í okt.
- Ljósverkætlan
Arbeiðið við fundamenti til ljósmastur í horninum við B36/Vesturskýlið var útsett vegna atlit til Vesturskýlisverkætlanina og sprinklaraskipan. Æltanin er nú at fara undir projektering av verkætlanini so skjótt sum tað er greitt viðv. játtan fyri 2021 til endamálið og fáa tað boðið út í februar 2020 og arbeiðið útint í mars-apríl 2020.

VIÐV. VERKLØGUM VIÐ NIÐARA VØLL
- Lendisarbeiði
Neyðugt verður at fáa gjørt vøllin av nýggjum og herundir at fáa upprættað lagið undir drensasfaltinum í parti av vallarøkinum, umframt lagt drenasfalt í størri parti av vallarøkinum, umframt fáa tikið av verandi stoytdoyvingarlag og graslíki og lagt alt tað av nýggjum.
- Nýtt stoytdoyvingarlag og graslíki
Harumframt er neyðugt at leggja nýtt stoytdoyvingarlag, umframt nýtt graslíki.

- Økið millum ovara vøll og niðara vøll má eisini gerast soleiðis at tað er trygt og gevur pláss fyri atkomu v.m.

- Neyðugt verður við játtan til girðing og nýggjar ljósmastrar og projektørar á suðursíðuni og projektørar á norðursíðuna. Tær mastrarnar eru partur av vesturskýlisverætlanini.

- Tíðarætlan: Mett verður hóskandi at byrja arbeiðið við niðara vøll so skjótt sum játtan er tøk í 2021 og er málið at leggja nýtt graslíki í apríl-mai 2020 áðrenn U17 EM endaspælið fyri kvinnur verður í mai 2020.

Metingar av kostnaði

Sí hjálagt fylgiskjal við metingum fyri einstøku postarnar í hesi ætlan. Samanlagt er talan um ein mettan tørv á umleið 10.000 tkr.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). At heimila umsitingini at bjóða út graslíkisveiting til Tórsvøll og at samráðast við lægsta tilboðsgeva um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð. Útboðið verður gjørt saman við veiting av stoytdoyvingarlagi og graslíki til niðara vøll sum møguleika.

b). At heimila umsitingini at fara undir innleiðandi fyrireikingar til útboð av arbeiðum við Niðara vøll.

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

VIÐV. VERKLØGUM VIÐ OVARA VØLL
- 5. oktober 2020 verður ovari vøllur kannaður av óheftum kanningarpersóni frá Sports Lab. Niðurstøðan er væntandi tøk innan fáar dagar. Síðani verður viðgjørt um leggjast skulu á størri nøgdir av gummigranulati og um henda nøgd eigur at vera partur av arbeiðstøkuni ella onnur veiting.

- Ráðgevin hevur gjørt meting viðv. fyrireiking og gerð av sprinklaraskipanini, ið tekur støði í pumpu- og stýriskipanini á Tórsvølli. Skjal við kostnaðarmeting verður tøkt mánadagin. Tá verður talan um at ein sprinklaradysa er í nýtslu í senn og tekur ein fullfíggjað sprinkling tá umleið 15 min. Í einum seinni umfari kann vera viðgjørt um at fáa eina skipan, ið kann sprinkla uppá helvtartíð, men vil tað innibera ein upphædd sum helst er tað tvífalda.

Umsitingin er í holt við at gera upp fíggjarstøðuna á verkætlanarjáttanini fyri 2020 (L57031 Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu). Nærri greiðing kemur til fundin, men er neyvan nøktandi upphædd tøk til at gera sprinklaraskipanina lidna. Mælt verður tí til at fíggja restina av kontu 5717 Ítróttaanlegg.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at fremja verkætlan við sprinklaraskipan.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neytabø, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
**VIÐV. VERKLØGUM VIÐ OVARA VØLL**
Á verkætlanarkontuni L57031 Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu eru umleið kr. 50.000 eftir. Arbeiðið at gera sprinklaraskipanina er ikki liðug enn.

Kommunan hevur 10. desember 2020 fingið sendandi sertifikat frá FIFA við góðkenning av Ovara vølli sbrt. FIFA Quality Pro skipanini. Sí hjálagt skjal. Á fundinum kemur umsitingin at greiða frá støðuni viðv. graslíkinum á Ovara vølli og sáttmálaviðurskiftunum við veitaran.

Sbrt. fíggjarætlanini fyri 2021 eru á løgukontu 5775 Ítróttaanlegg, Ovari vøllur játtaðar kr. 4 mió til ljósskipan til Ovara vøll. Í løtuni verða viðurskiftini kring verandi mastrar kannaði nærri, og hvussu ein hóskandi ljósskipan kundi verið samansett. Mett verður tó sannlíkt, at ein nýmótans skipan ikki rúmast innanfyri játtaðu upphæddina, ella í øðrum lagi verður neyðugt at minka nakað um ætlaðu ljósstyrkina í fyrsta umfari, og so ístaðin gera klárt til at kunna økja um talið av ljósprojektørum seinni.

Samstundis er umsitingin í holt við at kanna, um ein alternativ loysn letur seg gera, har hæddin á mastrunum verður lækkað og samstundis vera tvær nýggjar mastrar settar upp í miðjuni. Henda greining er ikki liðug enn, men vil umsitingin greiða frá henni á fundinum.

Alt eftir niðurstøðuni viðv. ljósskipan til Ovara vøll, og um avgjørt verður at endurnýggja alla skipanina, verður neyðugt at gera fundamentið í horninum millum B36-húsið og nýggja Vesturskýlið á Tórsvølli, áðrenn byggiplássið har verður riggað av í apríl-mai 2021. Í løtuni verða gjørdar innleiðandi fyrireikingar til gerð av hesum og verður arbeiðið sum útgangsstøði latið til verandi feløg/arbeiðstakarar á Vesturskýlisverkætlanini.

**VIÐV. VERKLØGUM VIÐ TÓRSVØLL**
Kommunan og FSF eru í holt við undantilgongd til útbjóðing at skifta graslíkið og stoytdoyvingarlagið á Tórsvølli, umframt fyrireika at flyta sprinklarar. Ætlandi byrjar útboð medio februar 2021, og skal vøllurin skiftast medio juni 2021 og verða klárur at brúka til altjóða landsdystir primo august 2021.

Ætlandi verður útboðið av graslíki v.m. gjørt saman við útboðnum av graslíki v.m. til Niðara vøll, sí niðanfyri.

Arbeiðið við at umleggja sprinklaraskipan v.m. verður gjørt sum undirhondsboð við undanfarnum veitarum.

Í desember 2020 kom hitaskipanin á Tórsvølli at virka á fyrsta sinni, leiðingarnar vórðu lagdar í vøllin í 2012. Sbrt. samstarvssáttmálanum við FSF frá 2020 legði FSF út fyri tað arbeiðið í 2020.

Sbrt. sama samstarvssáttmála skal kommunan í 2021 rinda helvtina av kostnaðinum fyri hitaskipanina og nýggja graslíkið v.m. á Tórsvølli – tá mett til umleið kr. 2,5 mió til hvønn partin. Ongin peningur er játtaður til endamálið í 2021 í íløguætlanini hjá kommununi.

Kommunan og FSF hava fingið greining av stoytdoyvingarlagnum á Tórsvølli og staðfestir hon, at tað er ivasamt, um stoytdoyvingarlagið er í nøktandi standi til at vera endurnýtt til eina nýggja álegging. Nøkur pkt. uppfylla ikki nýggju krøvnini í FIFA Quality Pro standardinum frá 2015, og tí er ávísur váði í at lata tað vera á. Umsitingin og FSF meta, at hetta er ov stórur váði at taka, tí Tórsvøllur er einasti vøllur í Føroyum, sum kann hýsa A-landsliðskappingardystum, og tí krevst trygd fyri góðkenning. At skifta stoytdoyvingarlagiðhevur eyka kostna við sær.

Av tí at kommunan ikki hevur játtað fígging til hesi endamál í 2021 er neyðugt at umraðfesta í íløguætlanini fyri ítrótt (løgukontu 5775 Ítróttaranlegg) ella í øðruj lagi at útvega aðra játtan.

**VIÐV. VERKLØGUM VIÐ NIÐARA VØLL**
Kommunan er í holt við undantilgongd til útbjóðing at skifta graslíkið og stoytdoyvingarlagið á Niðara vølli, umframt fáa bøtt um undirlendið v.m. Ætlandi verður útboðið av graslíki v.m. gjørt medio februar 2021 saman við útboðnum av graslíki og stoytdoyvingarlagi til Tórsvøll, sí omanfyri.

FSF mælir kommununi til, at graslíkisvøllurin á Niðara vølli lýkur somu FIFA Quality Pro krøv sum Tórsvøllur, so at altjóða landsliðskappingar kunnu spælast á fleiri góðkendum vøllum á hægsta stigi í Havn. HB og B36 meta at tað er nøktandi at vøllur skal lúka FIFA Quality krøv, ið nøktar teirra tørv. Verður vøllurin FIFA Quality Pro, skal undirlendið gerast av nýggjum, t.e. planeringin og drensasfaltið, sum er gamalt.

Arbeiðið við undirlendinum verður ætlandi boðið út sum undirhondsboð til tveir veitarar.

Sbrt. fíggjarætlanini fyri 2021 eru á løgukontu 5775 Niðari vøllur/vøllurin á Argjum - játtaðar kr. 3 mió til Niðara vøll. Mett verður ikki gjørligt at endurnýggja graslíkið v.m. til Niðara vøll fyri hesa upphædd. Á fundinum kemur umsitingin at leggja fram eina meting/fíggjarætlan.

Umsitingin hevur saman við FSF havt samskifti við HB og B36 um ætlanirnar og tíðarætlanina. Semja er um at gera Niðara vøll fyrst og síðani Tórsvøll.

Sí hjálagt ætlaða tíðarætlan fyri verkløgini við Tórsvøll og Niðara vøll, og sí hjálagt skjal við kostnaðarmeting fyri ymsu verkløgini.

Um tað skal vera møguligt at fremja graslíkisverkætlaninirnar í 2021, er alneyðugt at fara undir útboð av graslíki v.m. til Tórsvøll og Niðara vøll medio februar 2021.

**FÍGGING**
Omanfyri nevndu arbeiði viðv. Ovara vølli, Niðara vølli og Tórsvølli eru ikki fult fíggjaði, hetta uttan mun til, um stoytdoyvingarlag v.m. verður skift ella ikki. Neyðugt er antin at útseta ávís arbeiði til 2022, um fígging tá verður útvegað, ella at fáa til vega tørvandi fíggingina á verandi íløguætlan á løgukontu 5775 Ítróttaranlegg ella í øðrum lagi at útvega aðra játtan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). At heimila umsitingini at bjóða út graslíkisveiting v.m. (FIFA Quality Pro) til Tórsvøll, og at samráðast við lægsta tilboðsgeva um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð.
b). At heimila umsitingini at bjóða út veiting av graslíkisveiting v.m. til Niðara vøll (antin FIFA Quality Pro ella FIFA Quality), og at samráðast við lægsta tilboðsgeva um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð.
c). At flyta kr. 7 mió av løgukontu 5775 á L57031 - Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 22. februar 2021:** Ein meirluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, samtykkir at heimila umsitingini at bjóða út graslíkisveiting v.m. FIFA Qualitiy Pro til Tórsvøll og til Niðara vøll FIFA Quality, og at samráðast við tilboðsgeva um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð. Harumframt samtykt at játta kr. 3 mió av løgukontu 5775 ætlað Niðara vølli til løgukontu L57031 Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu.

Ein minniluti, Annika Olsen, tekur undir við meirilutanum, men tekur ikki undir við, at íløgujáttan kr. 4 mió, sum ætlaðar eru til ljósmastrar á Ovara vølli, so hann lúkar krøv frá FSF, verða brúktar til graslíkið.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Hin 23. februar 2021 bað nevndarformaðurin nevndina um heimild at viðgera málið um fótbóltsvøllirnar 19/04413 á skrá í mentamálanevndini dagin fyri av nýggjum um tpost, sum formliga verður at staðfesta á næst komandi nevndarfundi.
Sum ískoyti varð skrivað: *Annfinn Brekkstein, formaður, skjýtur upp, at nevndin samtykkir at heimila umsitingini at bjóða út graslíkisveiting v.m. til tveir graslíkisvøllir og alternativt tríggjar vøllir, og at samráðast við tilboðsgeva um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð. Vísandi til, at støðan viðvíkjandi graslíkisvøllinum á Ovara vølli, sum varð lagt á í fjør, enn er óviss, er endamál við samtyktini at tryggja, at alternativt tilboð kann heintast inn samstundis sum hini báðir vøllirnir.*

Allir nevndarlimirnir góðkendu viðgerð um tpost í hesum føri. Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, tóku undir við uppskotinum. Ein minniluti, Annika Olsen, tekur ikki undir við uppskotinum vísandi til, at tað er ov tíðliga at avgera, at Ovari vøllur skal bjóðast út. Ein annar minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt.

3. mars 2021 byrjaði útboðið av veiting av graslíki v.m. til Tórsvøll, Niðara vøll og eisini Ovara vøll í Gundadali sum ein optión.

Licitatión verður 19. mars 2021. 3 feløg eru við í útboðnum. Æltandi kemur tilmæli um at taka av tilboðið til viðgerðar á býráðsfundinum 25. mars 2021.

Lendisarbeiðið við Niðara vøll byrjar væntandi primo apríl, so tað er klárt til primo mai tá álegging av stoytdoyvingarlagi ætlandi skal byrja, umframt onnur tilhoyrandi arbeiðir við vøllin. Arbeiðið at skifta graslíkið á Tórsvølli skal skipast eftir skránni fyri altjóða dystir í summar, og ætlast tí at byrja í fyrru helvt av juni og skal verða liðugt til ólavsøku.

Til verkløgini, tó ikki Ovara vøll, verður mett neyðugt at útvega 5.000 tkr. afturat, umframt verandi tøku fígging til verkløg í Gundadali 7.000 tkr. Í hesum verður ikki roknað við ljósverkætlanini á Ovara vølli, sum mett verður krevur aðra fígging. Sí hjálagda skjal við kostnaðarmetingum (skjalið kemur í first agenda mánadagin).

Skotið verður upp at útvega mettu restfíggingina til Niðara vøll og Tórsvøll á 5.000 tkr. av løgukontu 5775 soleiðis:
Stórhøll 1.000 kr.
Hoyvíksvøll 1.500 tkr.
Langhylur 2.500 tkr.

Viðv. ljósskipan í Gundadali
Umsitingin er enn í holt við kanningar um tilber at finna eina bílgari og nøktandi loysn. Stovnað verður nýtt mál og kemur tilmæli væntandi til fundin 14. apríl 2021.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til formliga at góðkenna viðgerðina og samtyktina, sum fór fram um tpost hin 23. februar 2021.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta 2.500 tkr. av projektkontu L57015 Svimjihøll, 1.000 tkr. av løgukarmi 5775 Stórhøll og 1.500 tkr. av løgukarmi 5775 Hoyvíksvøllur til projektkontu L57031 Fótbóltsvøllirnir í Gundadali. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Vísandi til mál 20/01962 Verkløg við Hoyvíksvøll, har ætlanin um fyribilshøli til felagsvirksemi har væntandi verður tillagað og størri í vavi eisini kostnaðarliga, verður mett neyðugt at broyta tilmælið omanfyri viðvíkjandi restfíggingini til verkætlanirnar í Gundadali/Tórsvølli.

Fyrisitingin skjýtur upp at játta tær kr. 5 mió av íløgujáttanini til langhylin, sum ikki kemur at brúka alla játtanina í ár.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndina til at formliga at góðkenna viðgerðina og samtyktina, sum fór fram um tpost hin 23. februar 2021, har heimild varð latin umsitingin at bjóða út graslíksveiting v.m.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla harumframt til at játta kr. 5 mió av projektkontu L57015 Svimjihøll til projektkontu L57031 Fótbóltsvøllirnir í Gundadali.

**Mentamálanevndin 15. mars 2021:** Nevndin samtykti formliga at góðkenna viðgerðina og samtyktina, sum fór fram um tpost hin 23. februar 2021, har heimild varð latin umsitingin at bjóða út graslíksveiting v.m.

Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, taka undir við tilmælinum um at játa kr. 5 mió av projektontu L57015 Svimjihøll til projektkontu L57031 Fótbóltsvøllirnir í Gundadali.

Ein minniluti, Annika Olsen, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at íløgujáttan kr. 4 mió, sum ætlaðar eru til ljósmastrar á Ovara vølli, so hann lúkar krøv frá FSF, verða brúktar til graslíkið.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Elsa Berg, tekur undir við tilmælinum frá meirilutanum í mentamálanevndini at játta kr. 5 mió av projektontu L57015 Svimjihøll til projektkontu L57031 Fótbóltsvøllirnir í Gundadali og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen, tekur ikki undir við málinum vísandi til, at íløgujáttan kr. 4 mió, sum ætlaðar eru til ljósmastrar á Ovara vølli, so hann lúkar krøv frá FSF, verða brúktar til graslíkið.

**Ískoyti:**
Inn komu trý tilboð, har tvey teirra luku treytirnar í útboðnum og tey teknisku krøv, ið útbjóðingartilfarið setti til graslíkið v.m. Útboðið var uppá Niðara vøll og Tórsvøll báðir við nýggjum stoytdoyvingarlagi, og sum optión eisini tilboð uppá triðja vøll bert graslíki.

Lægsta boð hevði Metatron/Polytan á 6.600.859 kr. uppá Niðara vøll og Tórsvøll. Triði vøllur vil sum útgangsstøði kosta samsvarandi eindarprísunum í tilboðnum (mett til 2.250.000 kr.).

Verandi Tórsvøllur er av merkinum Polytan, og vøllurin í tilboðnum er ein dagførd útgáva av hesum. Fleiri norsk stadion til tippuligafótbólt hava sama graslíki, men við ymsum samansetingum av ífyllu.

Tilboðið frá Metatron vísir eisini á eitt umhvørvisvinarligari granulat enn útbjóðingartilfarið leggur upp til. Metast má, at man í samráðingartilgongdini fær nærri kostnaðarmett umhvørvisvinarligu loysnina. Mett verður skilabest, at allir vøllirnar hava somu ífyllu. Í fall tað verður gjørt verður tað við avtaluseðlum.

Samráð hevur verið við feløgini í Gundadali um støðuna viðvíkjandi Ovara vølli. Kommunan hevur gjørt ymsar testir av vøllinum og hevur lagt meira granulat í vøllin. Hóast vøllurin hevur altjóða góðkenning, so meta feløgini framvegis, at vøllurin er ikki brúkiligur til elitufótbólt hvørki til heimligu kappingina ella til altjóða dystir. Talan er fyrst og fremst um upplivingina, har bólturin rullar óvanligt.

Feløgini mæla til, at Ovari vøllur verður skiftur fyrst, síðani Tórsvøllur og til síðst Niðari vøllur. Broytingin í raðfylgjuni av vøllunum verður tikin upp við veitaran í samráðingartilgongdini, samstundis sum at kommunan endurskoðar tíðarætlanina fyri arbeiðinum á Niðara vølli í ár.

Samráð hevur eisini verið við FSF um venjingar hjá Gundalsfeløgunum á Tórsvølli tíðarskeiðið, ið arbeitt verður uppá Ovara vøll.

Umframt kostnaðin fyri vøllin, eru kostnaðin fyri ráðgeving, mvg og ókent. FSF rindar sambært avtalu helvtina av kostnaðinum av Tórsvølli.

Sum lýst í málslýsingini til nevndarfundin 22. februar 2021, so eru aftrat graslíkisveitingunum onnur atknýtt arbeiði at gera. Hetta fevnir m.a. um sprinklaraskipanina á Tórsvølli, sum eisini bindur saman spinklaraskipanina á Ovara vølli, og nýggjar girðingar og umhvørvistiltøk kring Ovara og Niðara vøll, fríðkan v.m. Nú tríggir vøllir skulu skiftast væntandi allir í ár, verður neyðugt at dagføra samlaða metingina um fíggjartørv. Tøkar eru uml. kr. 12 mió.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um at heimila umsitingini til at samráðast og gera sáttmála við lægsta tilboðsgevan (Metatron EHF/Polytan) um graslíkisveiting v.m. til Ovara vøll, Tórsvøll og Niðara vøll innanfyri ein karm uppá 8.850.859 kr., og útinna atknýtt arbeiði viðvíkjandi sprinkling, girðingum, umhvørvistiltøkum v.m. umframt ráðgeving og kommunalt mvg, at fíggja av projektkontu L57031 Fótbóltsvøllirnir í Gundadali, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 24. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. mars 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Elsa Berg, tekur undir við við mentamálanevndini og játtar kr. 12.000.000,00 av konto 5775 Ítróttaranlegg (7 mió. kr. ætlaðar til vøllir og 5 mió. kr. ætlaðar til langhyl).

Ein minniluti, Annika Olsen, atkvøður blankt.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Annika Olsen biður vegna minnilutan um at fáa málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við viðgerðina seinast var upplýst at arbeitt var við at fáa metingarnar neyvari. Upplýst var at samlaði karmurin fyri verkløgini var mettur til umleið 13.665 tkr. Arbeitt er síðani við aftur at gjøgnumganga viðurskiftini og verður mett at talið frá seinast er á eini leið. Í evsta lagi er altíð ávís óvissa kring ókend viðurskifti.

Tøka fíggingin er 12.000 tkr. Fyri at kunna fremja verkløgini er sostatt neyðugt við 1.665 tkr. í eyka fígging. Umsitingin mælir til at flyta 975 tkr. av projektkontu L57001 Ljósskipan við Tórsbreyt og 500 tkr. av løgukarminum konta 5775 fyri 2021 ætlað til ljósskipan við Tórsbreyt. Hetta tí at tann verkætlanin ikki kann fremjast í einum innanfyri tann fíggjarkarminum, og tí skilabetri at játta pening til ta verkætlanina í einum ísv. fíggjarætlan 2022 ella við annað høvi. Sostatt resta 190 tkr. í fígging og verður mælt til at flyta ta upphæddina av verkløgum við Hoyvíksvøll. Hetta nervar ikki verkætlanina viðvíkjandi fyribils hølum.

Sbrt. tíðar- og arbeiðsætlanini er ætlanin at vera komin á mál við verkløgunum í Gundadali í september 2021, tó so at arbeiðið við girðingunum kann koma at taka nakað longri tíð.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at flyta 975 tkr. av projektkontu L57032 Ljósviðurskifti við Tórsbreyt til projektkontu L57031 Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu og

b). at flyta 500 tkr. av løgukarminum konta 5775 til projektkontu L57031 Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu.

c). at flyta 190 tkr. av L57034 Verkløg við Hoyvíksvøll til projektkontu L57031 Fótbóltvøllirnir í Tórshavnar kommunu.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 09. juni 2021**: Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, samtykkir at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annika Olsen og Ruth Vang, tekur undir við málinum, men tekur ikki undir við at fíggja hetta av játtanini til Ljósviðurskifti við Tórsbreyt L57032.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, tekur undir við minnilutanum í mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Anniku Olsen, um at taka undir við málinum, men at fíggingin verður játtað av tøkum peningi.

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri, sjey ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Síðani varð atkvødd um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, tveimum ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg og Annika Olsen.

Blankt atkvøddu: Jákup Dam, Gunvør Balle og Ruth Vang.

# 177/21 Uppskot um avtalu millum Kommunufelagið og Nám um undirvísingartilfar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 165/19 | 18/03863-5 |
| 2 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 237/20 | 18/03863-5 |
| 3 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 279/20 | 18/03863-5 |
| 4 Mentamálanevndin | 26.10.2020 | 287/20 | 18/03863-5 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 11.03.2021 | 14/21 | 18/03863-5 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 53/21 | 18/03863-5 |
| 7 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 88/21 | 18/03863-5 |
| 8 Trivnaðarnevndin | 10.06.2021 | 50/21 | 18/03863-5 |
| 9 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 156/21 | 18/03863-5 |
| 10 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 177/21 | 18/03863-5 |

**Upprunin til málið:**
Uppskot til heildaravtalu við Nám

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna og Kommunufelagið hava verið á fundi við Nám um avtalu um undirvísingartilfar. Við støði í tí fundinum gjørdi Nám upprit um samstarv millum Kommunufelagið og Nám. Eftir uppskotinum rinda kommunur/skúlar hald eftir næmingatali og fáa so atgongd til tilfarið, umframt at heildaravtalan eisini fevnir um ymsu KT-skipanirnar, ið skúlarnir rinda fyri. Ætlanin er, at avtalan handferð viðurskiftini í Skúlanum á Fløtum, sum nærum burturav hevur talgilt undirvísingartilfar.

Í samskiftinum hevur Nám boðað frá, at tey eru í holt við at útbyggja funktiónirnar í skipanini Kervi soleiðis, at hon longu til komandi skúlaár kann bjóðast ístaðin fyri Vitanet til handfaring av uppmøting, skema, skúlatingum o.ø. Breið undirtøka er fyri hesum millum skúlarnar og vil henda tænasta so seinni gerast partur av eini samlaðari avtalu.

Uppritið er ætlað sum grundarlag fyri at fara í samstarv/samráðingar um eina avtalu.

Uppskotið um samstarv er viðgjørt á regluligum fundi við skúlaleiðarar í Tórshavnar kommunu. Sum er hevur Skúlin á Fløtum avtalu við Nám um talgilt tilfar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Einki at viðmerkja

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Einki at viðmerkja

**Umhvørvisárin**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar

**Skjøl**
Upprit um samstarv millum Kommunufelagið og Nám er hjálagt.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at umsitingin fær heimild til saman við Kommunufelagnum at arbeiða víðari við ætlanini um avtalu um undirvísingartilfar.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Kommunufelagið hevur vegna kommunurnar tingast við Nám um eina avtalu fyri tær tænastur, sum Nám veítir kommununum. Endaligt uppskot er gjørt, sí hjálagt skjal.

Hóast tað eru Kommunufelagið og Nám, sum hava arbeitt við at gera standardavtaluna, er tað einstaka kommunan, ið ger av, um hon ynskir at gera eina slíka avtalu við Nám, og tað er so einstaka kommunan, sum er sáttmálapartur mótvegis Námi.

Við í avtaluni eru tær pappírsbøkur og talgildar bøkur, ætlaðar fólkaskúlunum, ið Nám framleiðir og er einaútgevari av.
Tey talgildu amboðini, ið eru við í avtaluni eru hesi:

1. Talgildar bøkur

2. Talgild próvtøkuskipan (Wiseflow)
3. Samskiftisskipan (Microsoft office 365) umframt tænastu
4. Skemaleggingarskipanina (Gp Untis)
5. Umsitingarskipan - Kervið og FSG
6. Undirvísingarportalurin Snar
7. Tilfarsgrunnur (mitCFU).

Undirvísingarportalurin Snar er partur av avtaluni. Skipanin hevur annars verið tann, at kommunurnar rinda fyri Snar, og parturin hjá Tórshavnar kommunu er uml. 210 tkr. um árið,

Árliga gjaldið er:
1. Skúlaárið 2021/2022 – 1020 kr./næming
2. Skúlaárið 2022/2023 – 1100 kr./næming
3. Skúlaárið 2023/2024 – 1150 kr./næming

Goldið verður síðst í september og fyrstu ferð tann 30. september 2021, ið er gjaldið fyr skúlaárið 2021/2022

Kommunufelagið ger vart við, at tað sum so ikki hevur góðkent prísin, tí felagið ikki hevur faktuelt grundarlag til at seta spurnartekin við, um útrokningargrundarlagið hjá Námi er á eini leið ella ikki.

Nýggj fígging krevst til at kunna undirskriva avtaluna.

Sáttmálaskeiðið er trý ár, og sáttmálin er galdandi fyri skúlaárið eftir, at undirskrivað er. Sáttmálin kann tó uppsigast av báðum pørtum við 3 mánaða freist.

Ætlanin er at senda skúlaleiðarunum avtalauna og viðgera hana á fundi við teir hósdagin 1. oktober, og síðani leggja hana fyri mentamálanevndina aftur til støðutakan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða hjálagdu avtalu um undirvísngartilfar, aðrar talgildarloysnir og undrivísingarportalin Snar.

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
Endaliga uppskotið til avtalu við Nám um undirvísingartilfar, talgildar loysnir og undirvísingarportalin Snar varð viðgjørt á fundi við skúlaleiðarar hósdagin 1. oktober.
Skúlaleiðarar er ikki heilt samdir um, Tórshavnar kommuna eigur at gera henda sáttmála. Teir ynskja, at nøkur viðurskifti verða viðgjørd betur, her hugsa teir serliga um, at avtalan bindur ikki Nám at geva út nýtt tilfar, og at sum heild eigur undirvísingartilfar ikki at vera eldri enn 10 - 15 ár. Haraftrat fara skúlar at rinda nakað meir til Nám, enn teir gera í dag.

Í § 9 stendur: "Ráðgevandi bólkur við umboðan úr Kommunufelagnum, trimum skúlaleiðarum og umboðan frá Námi, møtist minst 2 ferðir árliga at umrøða og viðgera viðurskiftini í hesum sáttmála. Bólkurin umrøður og viðger m.a. útgávuætlanir hjá Námi á fólkaskúlaøkinum, hvørjum útgávum tørvur er á, hvussu talgildu amboðini virka og møguliga kunnu mennast, og metir annars áhaldandi um tær tænastur, ið skúlarnir fáa við hesi skipan, og viðger, hvussu møguligar tillagingar kunnu gerast."

Skúlaleiðarar meta, at ráðgevandi bólkurin eigur eisini at hava heimildir at taka avgerðir saman við Námi um, hvat kemur út, og hvussu játtanin hjá Námi verður brúkt í sambandi við nýggjar útgávur.

Mentamáladeildin fer at seta seg í samband við Nám aftur at vita, um tað ber til at gera eitt fylgiskjal til sáttmálan, sum staðfestir, at tilfarið frá Námi er dagført, og at útgávur ikki verða ov gamlar, áðrenn nýtt tilfar kemur. Síðani er ætlanin at leggja málið fyri mentamálanevndina aftur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða hjálagdu avtalu um undirvísngartilfar, aðrar talgildarloysnir og undrivísingarportalin Snar.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Útsett.

**Mentamálanevndin 26. oktober 2020:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Tórshavnar kommuna hevur eftir ynski frá skúlaleiðaranum í fólkaskúlunum sent Námi skriv um at fáa nakrar broytingar við í avtaluna, tær eru viðvíkjandi endurnýggjan av tilfari og nýggjum útgávum. Svarið frá Námi er, at tey treyðugt gera broytingar nú. Kommunur hava skrivað undir avtaluna, og tað ber ikki til at gera serliga avtalu við Tórshavnar kommunu. Nám metir haraftrat, at § 9 í avtaluni leggur upp fyri, at tilfar ikki verður ov gamalt, at tilfar verður dagført, og at nýtt tilfar kemur út.

Nám var við á fundi við skúlaleiðarar tann 7. januar í 2021, har stovnurin greiddi frá svarinum til Tórshavnar kommunu, og at Tórshavnar kommunu er so stór, at einki er at ivast í, at hon verður umboðað í ráðgevandi bólkinum, sum sambært avtaluni m.a. skal umrøða og viðgera, hvørjum útgávum tørvur er á, hvussu talgildu amboðini virka og kunnu mennast, bólkurin skal eisini meta um tær tænastur, ið skúlarnir fáa við hesi skipan og viðgera, hvussu møguligar tillagingar kunnu gerast.

Skúlin a Fløtum er talgildur og brúkar ikki so nógvar pappírsbøkur. Skúlin hevur havt eina avtalu við Nám um talgilt tilfar, men tann avtalan er ikki galdandi longur, og Nám fer ikki at gera serskilda avtalu við Skúlan á Fløtum um tilfar. Skúlin á Fløtum hevur gjørt vart við, at tað, at hann ikki brúkar so nógvar pappírsbøkur, hevur givið pláss í játtanini til skúlan til kt-útgerð og amboð. Skúlin fer ikki at hava sama møguleika longur, tí sambært uppskotinum til avtalu um undirvísingartilfar, aðrar talgildar loysnir og undirvísingarportalin Snar millum kommunur og Nám fer, hvør skúli at rinda fastan prís fyri hvønn næming, og tí ber ikki til at spara her.

Skúlarnir taka sum heild undir við, at Tórshavnar kommuna skrivar undir avtaluna við Nám, sum so verður galdandi í trý ár.

Játtan er sett av til undirvísingarportalin Snar, sum Nám umsitur. Ein avtala er millum Uttanríkis- og mentamálaráðið og Kommunufelagið um undirvísingarportalin, og sambært henni útvega kommunurnar og Uttanríkis- og mentamálaráðið fígging til undirvísingarportalin, kommunan rindar ávísa upphædd fyri hvønn borgara í kommununi. Í 2021 eru 210.000 kr. játtaðar á 4141 Undirvísingarportalur. Um samtykt verður at skrivað undir avtaluna við Nám, verður undirvísingarportalurin partur av avtaluni og kostnaðinum, og tí verður mælt til at flyta teimum 10 kommunalu fólkaskúlunum hesa játtan og býta hana eftir næmingatali.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja:

a). at Tórshavnar kommuna skrivar undir avtaluna við Nám

Um samtykt verður at skriva undir avtaluna mæla trivnðaðarstjórin og mentamálaleiðarin trivnaðarnevndini til samtykkja:

b). at játtanin á 4141 Undirvísingarportalur verður flutt á játtanirnar hjá teimum 10 kommunalu fólkaskúlunum og verður býtt eftir næmingatali.

**Trivnaðarnevndin 11. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Harumframt samtykt at tryggjað verður, at tilfarið eisini kann nýtast til hjálpiforrit í sambandi við orðblindni v.m. samstundis sum bókaútgávan, og at skúlarnir verða tiknir við í eftirmetingina.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt

**Ískoyti:**
Á fundi í trivnaðarnevndini varð samtykt, at Tórshavnar kommuna skrivar undir avtaluna við Nám, men samtykt er eisini, at tryggjað verður, at tilfarið eisini kann nýtast til hjálpiforrit í sambandi við orðblindni v.m. samstundis sum bókaútgávan, og at skúlarnir verða tiknir við í eftirmetingina. Hetta er vist ætlað sum ein áheitan, men tað stendur ikki í avtaluni, so Tórshavnar kommuna hevur ikki skrivað undir avtaluna. Mælt verður tí nevndini til at samtykkja at Tórshavnar kommuna skrivar undir hjáløgdu avtalu við Nám.

Aðrar kommunur hava skrivað undir avtaluna, og Kommunufelagið hevur vegna kommunurnar tingast við Nám um avtalu fyri tær tænastur, sum Nám veítir kommununum. Endaliga uppskotið til avtalu: “Sáttmáli um undirvísingartilfar og aðrar talgildar mannagongdir og undirvísngarportalin Snar“ er hjálagt.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja, at Tórshavnar kommuna skrivar undir avtaluna við Nám og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 10. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 178/21 Frítíðartilboð til 3. flokk í Badmintonhøllini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 246/20 | 20/04036-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 6/21 | 20/04036-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 12.05.2021 | 112/21 | 20/04036-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 09.06.2021 | 155/21 | 20/04036-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 157/21 | 20/04036-1 |
| 6 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 178/21 | 20/04036-1 |

**Upprunin til málið:**
Tróndur Sigurðsson biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

Hann biður somuleiðis vegna Javnaðarflokkin um at fáa sett hetta uppskot fram til atkvøðugreiðslu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Uppskot at seta Frítíðartilboð til 3. flokk á stovn í Badmintonhøllina.

Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini hevur verið ein sólskinssøga. Skúlabørnini úr Sankta Frans skúla í 1. og 2. flokki stórtrívast í Badmintonhøllini, hóast hølisumstøðurnar eru sera trongar.

Nú er avgerð tikin um at seta fyribils bingjur omanfyri Badmintonhøllina, so at frítíðarskúlin kann hýsa øllum børnunum í 1. og 2. flokki, og tað er ivaleyst gott.

Tað loysir tó ikki avbjóðingina hjá Badmintonhølini at bjóða næmingum í 3. flokki eitt frítíðartilboð, sum bæði foreldur og næmingar hava eftirlýst.

Havnin og serliga miðbýurin í Havn er í støðugum vøkstri, og tað er ein sannroynd, at miðbýarbørn í 3. flokki hava tørv á einum skipaðum frítíðartilboðið aftaná vanliga skúlatíð. Onga staðni í Norðurlondum arbeiða foreldur so nógv og so leingi sum í Føroyum. Tað merkir, at nógv børn eru ov einsamøll aftaná skúlatíð.
Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini hevur prógvað, at hann megnar at geva eisini børnum í 3. flokki eitt mennandi og mentandi tilboð – eins og kropsligar og heilsugóðar avbjóðingar. Men tey hava ikki pláss og játtan til endamálið í Badmintonhøllini.

Hvørt einasta ættarlið av børnum hevur ómetaliga stóran týdning, og vit hava skyldu til at skipa trygg viðurskifti fyri øll børn, sum ikki eiga at noyðast at vera einsamøll fleiri tímar hvønn dag.

Tí fara vit í Javnaðarflokkinum at skjóta upp, at fyrispurningurin frá foreldrunum, sum hava børn síni har, um at seta frítíðartilboð til 3. flokk á stovn í Badmintonhøllini verður svaraður játtandi beinanvegin.

Játtan skal útvegast til uml. 2 ársverk, eins og høli skulu útvegast at seta upp bráðfeingis í sambandi við badmintonhøllina í Gundadali. Viðvíkjandi starvsfólkakostnaði er broytingin í mestan mun útreiðsluneutral.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Javnaðarflokkurin mælir býráðnum til at samtykkja, at frítíðarskúlin í Badmintonhøllini eisini hevur frítíðartilboð til 3. flokk í Sankta Frans skúla, fíggjað av kontu 3216 Verkætlanir á ungdómsøkinum, 3. flokkur, og at útvegað verða bráðfeingis fyribilshøli.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Atkvøtt varð um uppskot frá Gunvør Balle um at beina málið aftur í nevnd, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Málið beint í Mentamálanevndina.

**Ískoyti:**

Formaðurin vísir til tilmælið omanfyri við tí endamálið at nevndin samtykkir, at frítíðartilboð til børn í 3. flokki í Sankta Frans skúla verður skipað í Frítíðarskúlanum í Badmintonhøllini ætlandi frá august 2021, og at umsitingin skjótast gjørligt kemur við uppskoti til hølisloysn, harundir kostnaðarmeting og tíðarætlan.

Umsitingin skal upplýsa, at børn í 3. flokki í Sankta Frans skúla eins og børnini í 3. flokki í Skúlanum á Fløtum og Eysturskúlanum hava frítíðartilboð í Margarinfabrikkini.

Foreldur í Skúlanum á Fløtum hava eisini spurt um møguleikan fyri frítíðartilboði til 3. flokk og ungdómsvirksemi um kvøldarnar so sum gjørt verður t.d. í Skúlanum á Argjahamri og í Hoyvíkar skúla.

Vanliga eru uml. 45 næmingar í 3. flokki í Sankta Frans skúla. Um 40 næmingar taka lut í frítíðartilboðnum, krevjast hølini at vera uml. 100 fermetrar til støddar.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Samtykt at heimilað umsitingini at fyrireika frítíðartilboð til 3. flokk í Badmintonhøllini og venda aftur í nevndina.

**Ískoyti:**
Kannaðir eru ymsir møguleikar fyri hølisloysn. Møguleiki er at leiga høli frá B36 til frítíðtilboðið til 3. flokk. Felagið ynskir at vera við til at ungdómurin trívist í Gundadali. Talan er um stóra høli og atknýtum høli (sal, køk, ves). Uppskot til leigu er kr. 22.000 um mðr. umframt reingerð. B36 tillagar samstundis sína nýtslu av hølunum. Hølini eru ríkiliga stór.

Játtan er ikki sett av til leigugjaldið í fíggjarætlanini, men játtan er til løn og rakstur annars.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at umrøða hesa loysn og heimila umsitingini at gera uppskot til leiguavtalu.

**Mentamálanevndin 12. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uppskot til eitt ára leigusáttmála fyriliggur sum royndartíðarskeið. Avtalað er leigugjald kr. 19.000 um mánaðin, sum fyri 2021 kostar kommununi kr. 95.000, fígging fyri eftirfylgjandi tíðarskeið verður at játta í komandi fíggjarætlan. Mett verður, at kostnaðurin fyri 2021 kann fíggjast av kontu 3216 Verkætlanir á ungdómsøkinum, sum er tann kontan, ið fíggjar frítíðartilboðið til 3. flokk. Framflyting frá roknskaparárinum 2020 ger tað møguligt uttan at tað ávirkar sjálvt frítíðartilboðið. Harumframt er neyðugt at játta fígging til leigumálið í fíggjarætlanini 2022.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja leiguavtaluna, at játta kr. 95.000 til leigugjald 2021 av kontu 3216 Verkætlanir á ungdómsøkinum og at játta fígging til leigugjaldið 2022 í fíggjarætlanini 2022 og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 09. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 179/21 Umhvørvisárin frá graslíkisvøllum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 12.02.2021 | 8/21 | 20/00856-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 12.05.2021 | 119/21 | 20/00856-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 116/21 | 20/00856-2 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 08.06.2021 | 30/21 | 20/00856-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 164/21 | 20/00856-2 |
| 6 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 179/21 | 20/00856-2 |

**Upprunin til málið:**
Í sambandi við at graslíkini á Tórsvølli og Ovaravølli skuldu skiftast í 2020, hevur Umhvørvisstovan biðið Tórshavnar kommunu kanna hvat tilfar kemur í staðin, og hvussu atlit verða tikin til umhvørvið.

Graslíkisvøllir við leysari plastfyllu eru ein vælkendur umhvørvistrupulleiki, og smáu gummiperlurnar fara lættliga av vøllinum og út í umhvørvið. Mikroplast verður støðugt verandi í umhvørvinum og dálkar hav, jørð og djór, og hevur árin á heilsu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í Tórshavnar kommunu verða størru graslíkisvøllirnir gjørdir uttan nøktandi atlit til hvussu leysa plastfyllan verður verandi á vøllunum. Sjónligar ábendingar eru um, at gummigranulat frá vøllum í kommununi enda í økinum kring vøllirnar, og í regnvatnsleiðingum. Í Noreg vísa kanningar, at gummigranulat frá graslíkisvøllum er triðstørsta kelda til dálking við mikroplasti, aftaná størri plastlutir, sum enda í havumhvørvinum, og slit frá bildekkum. Mett verður at, áleið 10% av plastfylluni, sum verður nýtt til graslíkisvøllir, endar uttanfyri vøllin (Noreg).

Leys plastfylla verður væntandi bannað við nýggjari EU lóg, sum í løtuni er til viðgerðar og eftir ætlan verður samtykt í 2022. Ein tillagingartíð á 3-6 ár er nevnd í lógaruppskotinum, umframt at nøgdirnar av mikroplasti, sum sleppa av vøllum, sum framvegis nýta plastfyllu, ikki skulu fara uppum 7 $g/m^2$. Roknast kann tí við avmarkingum innan nýtsluna av leysari plastfyllu á graslíkisvøllum og at hugt verður eftir øðrum loysnum.

Kommunan er eftirlitsmyndugleiki og hevur eisini rakstur um hendi ísv. ítróttarvøllir, og skal saman við Fótbóltssambandinum tryggja, at neyðug tiltøk verða sett í verk fyri at fyribyrgja dálking. Fyri at vøllir framyvir skulu lúka galdandi umhvørviskrøv, er reglugerð gjørd við støði í kunngerðunum um spillivatn og umhvørvi og eftir norskari fyrimynd.

Reglugerðin leggur dent á, at forðingar verða gjørdar, sum skulu halda gummigranulati aftur, so at tað ikki sleppur av vøllunum. Hartil skal spillivatn kring vøllin leiðast gjøgnum reinsiverk, sum reinsar mikroplast úr vatninum. Fyllan skal ikki dragast av vøllinum t.d. ísv. nýtslu og viðlíkahald av vøllinum. Reglugerðin leggur eisini upp til, at royndir verða gjørdar við fyllu, sum ikki er úr plasti/gummi, men úr meiri umhvørvisvinarligum tilfari.

Hædd verður tikin fyri at krøvini eru kostnaðareffektiv. Møguligir øktir kostnaðir til reinsing verða í ávísan mun javnaður í spardum útreiðslunum til endurfylling av gummifyllu, og um samlaði kostnaðurin hjá vøllinum økist, skal hesin vigast við gagninum, sum fæst frá minni dálking.

**Lógir, ásetingar o.a.**
<u>Kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn:</u>
*§ 8. Spillivatn skal ikki leiðast út í løkir, áir, veitir, vøtn, strond, fjøru o.tíl.*
*[...]*
*Stk. 3. Spillivatn skal leiðast burtur í afturlatnum spillivatnsskipanum.*

*§ 9. Spillivatnsskipanirnar skulu verða gjørdar, so at evni og tilfar í størst møguligan mun verða afturhildin í reinsiverkum, rottangum, úrskiljarum, sandfangum o.ø. fyri at fyribyrgja dálking av umhvørvinum.*
*Stk. 2. Reinsiverk, rottangar, úrskiljarar, sandfang o.a. skulu reinsast og røkjast eftir tørvi.*

<u>Kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur:</u>
*§ 1. Órudd o.a. Ikki er loyvt at lata órudd liggja og rekast. Bý- ella bygda(r)ráðið skal halda almenn pláss, vegir, áir, áarinntøk við veg og rennur rein, meðan avvarðandi eigari skal halda tún og onnur privat uttandura øki rein.*
*Stk. 2. Bý- ella bygda(r)ráðið kann geva boð um, at órudd og annað burturkast skal beinast til hóskandi stað, jvb. kunngerð um burturkast.*

*§ 22. Røkt av spillvatnsleiðingum o.t. Allar spillvatnsleiðingar, frárenslleiðingar, niðurlopsbrunnar o.t., skulu røkjast og reinsast so ofta, tað er neyðugt eftir árstíðini og viðurskiftunum annars, soleiðis at vandi ikki er fyri dálking ella til heilsuvanda.*
*Stk. 2. Bý- ella bygda(r)ráðið skal ansa eftir, at spillvatnsleiðingar, frárenslleiðingar, niðurlopsbrunnar o.t., feittbrunnar, oljuútskiljarar og spillvatnsreinsiverk verða hildin rein og í góðum standi.*

<u>Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd:</u>
*§ 1. Við hesi lóg er ætlanin at:*
*1) fyribyrgja og minka um dálking av luft, vatni og jørð […]*
*2. stk. Lógin skal serliga nýtast til at tryggja teir eginleikar í ytra umhvørvinum, ið eru av týdningi fyri heilsufrøðiligu og rekreativu lívskorunum hjá menniskjum og fyri varðveiting av einum fjøltáttaðum djóra- og plantulívi.*

*§ 2. Lógin fevnir um alt virki, haðani føst, flótandi ella luftvorðin evni, ristingar, geisling, ljós og óljóð kunnu elva dálking av luftini jørðini, áum, vøtnum ella føroyska sjóøkinum. […]*

*§ 3. Tann, ið ætlar at byrja virki sum nevnt í § 2, skal velja eitt slíkt stað at útinna hetta, at vandin fyri dálking verður avmarkaður so væl sum til ber.*
*2. stk. Tá staðið skal veljast, skal ansast eftir, hvussu økið er háttað íroknað verandi og ætlaðar komandi nýtslur, eisini við atliti til hóskandi burturtøku av spillvatni og øðrum burturkasti.*
*3. stk. Tann, ið útinnir ella ætlar at byrja virki sum umrøtt í § 2, skal fremja tær til fyribyrgingar og forðingar av dálkingini neyðugu atgerðir og leggja til rættis rakstur virkisins á ein slíkan hátt, at virkið í minst møguligan mun elvir dálking.*

<u>Umhvørvispolitikkurin fyri Tórshavnar kommunu:</u>
Mál 5.2 *Tilfar, sum verður lagt á lendi, skal ikki geva frá sær evni, sum eru skaðilig fyri heilsu og umhvørvi*.

<u>KIMO samstarvið, har Tórshavnar kommuna og Kommunufelagið eru limir (Local Authorities International Environmental Organisation - Kommunernes Internationale Miljøorganisation):</u>
*Viðtøka um mikroplast frá graslíkisvøllum - KIMO RESOLUTION 18/01 Microplastic Pollution from Artificial Grass Sports Fields)*

*Viðtøka um mikroplast - KIMO RESOLUTION 3/09 (revised October 2016)*
*Microplastics*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mentanardeildin og Fótbóltssamband Føroya hava havt høvi at viðmerkt uppskotið til reglugerð, og tann 14. desember 2020 skipaði Tórshavnar kommuna fyri hoyringsfundi við Fótbóltssamband Føroya. Á fundinum luttóku umboð fyri Fótbóltssamband Føroya, mentanardeildina (TK), umhvørvisdeildina (TK), teknisku deild (TK), Umhvørvisstovuna og hallarvørðar og ráðgevandi verkfrøðingur. Uppskot til reglugerð um ítróttarvøllir, har leys plastfylla verður brúkt, varð løgd fram og umrødd. Áhugi var at arbeiða víðari við átøkum sum skulu fyribyrgja dálking frá mikroplasti, og ítøkiliga ísv. at Niðarivøllur í næstum verður skiftur.

**Umhvørvisárin**
Reglugerðin skal fyribyrgja dálking av mikroplasti frá eini týðandi dálkingarkeldu. Væntað verður, at dálkingin verður avmarkað soleiðis at í mesta lagi 7 g/$m^2$ mikroplast árliga kemur frá vøllunum, og at sum frá líður meiri umhvørvisvinarligt tilfar verður nýtt til vøllirnar.

**Skjøl:**
Uppskot til reglugerð um avmarking av dálking frá leysari plastfyllu, j.nr. 20/00856-9
KIMO_Resolution_Artificial_Grass_Sports_Fields.pdf, j.nr. 20/00856-10
KIMO_Resolution_Microplastics.pdf, j.nr. 20/00856-11

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | x | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til:
- At tikið verður undir við "Reglugerð um avmarking av dálking frá leysari plastfyllu, sum verður brúkt á graslíkisvøllum", og at reglugerðin verður beind í býráðið umvegis mentamálanevndina og fíggjarnevndina.
- At útbjóðingartilfar fyri vøllir framyvir verður gjørt í samsvari við reglugerðina.
- At mannagongdin í sambandi við rakstur av ítróttarvøllum verður endurskoðað við støði í reglugerðini.
- At játtaðar verða 70.000 kr. av konto 6610 til framleiðslu av upplýsandi tilfari til brúkarar av vøllum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 12. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og málið verður eftirmett árliga.

**Mentamálanevndin 12. mai 2021:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Samtykt at beina málið aftur í náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 08. juni 2021:** Samtykt at arbeiða við at lýsa møguleikar fyri at endurnýta grasvallirnar, soleiðis at tað kann koma við i reglugerðina, tá hon verður endurskoðað og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 180/21 Útstykking oman fyri Argjahamar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2021 | 102/21 | 21/01777-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 115/21 | 21/01777-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 162/21 | 21/01777-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 180/21 | 21/01777-1 |

**Upprunin til málið**
Stóri bústaðartørvurin í Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum**
Tórshavn eins og aðrir høvuðsstaðir er í teirri støðu, at tey flestu vilja búgva her. Sum høvuðsstaðarkommuna mugu vit ganga á odda til tess at finna loysnir á bústaðarøkinum. Í hesari tilgongd vilja vit skapa eina burðardygga býarmenning, har rúm er fyri øllum, har vit tætta býin og har vit gagnnýta býin skynsamari. Harumframt er tað týdningarmikið, at vit sum kommuna standa á odda fyri at veita fjølbroyttar bústaðir, bæði eigara- og leigubústaðir.

Stórur fólkavøkstur er, umframt at húskini minka alsamt. Kommunuætlanin frá 2020 vísir á, at tørvur verður á íalt 10200 bústøðum í 2032 roknað frá 2018.

Tískil er tað týdningarmikið, at kommunan eisini sjálv stendur á odda fyri at veita borgarum bústaðir, samstundis sum hon samstarvar við virkandi innan privatu vinnuna um partar av hesi uppgávuni.

Bústaðarsløgini eru vanliga býtt upp í sethús, tvíhús/raðhús og íbúðir. Tað eru nógv sum ynskja at búgva í sethúsum, umframt at vit síggja ein størri og størri áhuga fyri íbúðum. Enn manglar kommunan eitt útboð av leigubústøðum, meðan vit hava seinastu árini havt nógvar útstykkingar við íbúðum.

Kommunuætlanin vísir á ymisk lendi til býarvøkstur, har Stóratjørn stendur at verða best egnaða lendið til býarvøkstur og økið Klingurstjørn er næstbesta staðseting. Arbeitt verður við ætlanunum á Stórutjørn, og er ætlanin nú at fara í gongd við eina ætlan oman fyri Argjahamri, sí kortskjal nr. 21/01777-3, Uppskot til útstykking oman fyri Argjahamri.

Viðlagda kortskjal er ein skitsa av hvussu økið kann verða skipað við bústøðum, bæði set- , raðhúsum og íbúðum, umframt at øki verður lagt av til møguliga stovnsbygging. Neyðugt verður at umsitingin tillagar uppskotið, soleiðis at skipanin av økinum verður nøktandi, umframt at hetta kortskjalið er ikki heilt í samsvar við tað, sum er avtalað við festaran á økinum. Ymisku byggistigini síðani skulu projekterast.

Lendið, matr. nr. 4a, sum ætlanin er at fara undir at skipa til bústaðarbygging og stovnsbygging, er ogn hjá Búnaðarstovuni, har Poul Müller er festari á lendinum. Samlaða økisvíddin, sum er avtalað við festaran at fara undir at skipa sæst á kortskjalinum nr. 21/01777-6, Lendi at keypa frá Búnaðarstovuni til nýggja útstykking, er sambært kortskjalinum uml. 128.000 fermetrar til støddar.
Uppskot til ætlanaravtalu við festaran er gjørd og viðheft, sí skjal nr. 21/01777-4, Uppskot til ætlanaravtalu millum Tórshavnar kommunu og Poul Müller.

Ætlanaravtalan fevnir bæði um lendið til útstykking, umframt lendið til Viðarlund, matr. nr. 4a og matr. nr. 43a, sí kortskjal nr. 21/01777-5, Argjahamri_Viðarlund.

Samanlagt er talan um á leið 163.000 $m^2$, ið Tórshavnar kommuna skal keypa og frábýta frá Búnaðarstovuni til ætlaðu útstykkingar- og frílendisendamál.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Lóg um landsjørð

**Upplýsingar frá umsitingini**
Støða skal takast til, hvat slag av bústøðum økið skal skipast til, hvussu stór grundstykkini skulu vera og hvussu fríøkini í útstykkingini verða skipaði og tryggjaði. Harumframt er týdningarmikið, at útstykkingin í størstan mun tillagar seg lendið og at eitt nú leiðin niðan á Kongavarða verður varðveitt.
Ein umhvørvis árinismeting eigur at verða gjørd av lendinum, áðrenn farið verður undir at skipa tað endaligt, soleiðis at atlit kunnu verða tikin til serlig viðurskiftir í økinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
21/01777-3, Uppskot til útstykking omanfyri Argjahamri
21/01777-4, Uppskot til ætlanaravtalu millum Tórshavnar kommunu og Poul Müller
21/01777-5, Argjahamri_Viðarlund
21/01777-6, Lendi at keypa frá Búnaðarstovuni til nýggja útstykking

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At lendið, sambært kortskjali 21/01777-6, verður lagt av til nýggja útstykking í kommununi, og at umsitingin fer undir at skipa økið neyvari.
- At heimila umsitingini at bjóða projekteringina út.
- At ætlanaravtalan, skjal nr. 21/01777-4, verður samtykt.
- At heimila umsitingini at søkja Búnaðarstovuna um at keypa lendið sambært kortskjali 21/01777-5 og 21/01777-6.
- At málið verður beint aftur í nevnd, tá samlaði lendiskostnaðurin er kendur.
- Og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**

Tórshavnar kommuna hevur fingið tilsøgn frá Búnaðarstovuni um keyp av lendi til ætlaðu útstykkingina á Argjahamri. Umsóknin hevur verið til ummælis hjá festaranum, sum ikki hevur viðmerkingar til ætlanirnar hjá kommununi. Kommunan skal rinda umleið 15 mió. kr. fyri at ogna sær lendið v.m., og kemur hesin peningur heilt ella lutvíst inn aftur, tá ið grundøkini í útstykkingini verða seld. Mælt verður til at fíggja keypið av tøkum peningi.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at játta kr. 15 mió. av tøkum peningi til keyp av lendi til nýggja útstykking omanfyri Argjahamar og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Í tilsøgn dagfest 16. juni 2021 hevur Búnaðarstovan útgreinað samlaða kostnaðin, ið Tórshavnar kommuna skal rinda fyri útvegan av lendi til ætlaðu útstykkingina omanfyri Argjahamar. Samlaðu útreiðslurnar fyri kommununa verða umleið 13 mió. kr., ið mælt verður til at játtað av tøkum peningi.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 181/21 Umsókn um stuðul til víðkan og dagføring av kappingarøkinum hjá Føroyskum Íslandsrossafelag undir Kráarheyggi í Havnardali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2021 | 103/21 | 21/02231-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 161/21 | 21/02231-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 181/21 | 21/02231-2 |
| 4 Býráðsfundur | | | 21/02231-2 |

**Upprunin til málið**
Felagið Føroyskt Íslandsrossafelag søkir Tórshavnar kommunu um stuðul til at víðka um, dagføra og fríðka kappingarøkið, ið felagið varðar av undir Kráarheyggi.

**Lýsing av málinum**
Felagið varð stovnað hin 8. mars 1989. Síðani stovnan hevur felagið áhaldandi arbeitt við at skapa góðar karmar fyri limir felagsins. Eftir at felagið fekk tillutað økið undir Kráarheyggi frá Tórshavnar kommunu, hevur felagið bygt kappingarbreyt, reiðhøll og rossafjós, sum í dag húsa áleið 150 íslandsrossum.
Felagið hevur verið í støðugari menning hesi árini og limaskarin er vaksin til nú at fevna um áleið 150 virknar limir. Limir felagsins hava síðani 1992 luttikið í altjóða kappingum kring evropa.

Sum liður í at menna ríðiítróttina í felagnum víðari, metir felagið tað nú vera átrokandi at víðka um og dagføra kappingarøkið hjá felagnum undir Kráarheyggi, og tað er grundað á hetta ynski, at felagið nú søkir kommununa um stuðul til:

1. Gerð av breyt til Gæðingakappingar
Felagið ætlar at víðka um kappingarøkið, so tað gerst møguligt at skipa fyri gæðingakappingum á økinum. Hetta kann gerast við at víðka um núverandi ringvøllin hjá felagnum.

2. Skeiðbreyt
Felagið ætlar at byggja eina skeiðbreyt, so at skipast kann fyri skeiðkappingum. Eins og við breytini til Gæðingakappingar, kann skeiðbreytin gerast við at víðka um verandi ringvøllin hjá felagnum.

3. Uttandura venjingarvøllur
Í takt við at limatalið og virksemið hjá felagnum veksur, er reiðhøllin vorðin nakað trong til at rúma allari venjingini. Somuleiðis er ynskiligt at hava ein venjingarvøll uttandura, so at reiðfólk kunnu njóta góðveðursdagar við venjing uttandura.

4. Áskoðara- og uttanumøki kring kappingarbreyt
Felagið ynskir eisini at gera økið kring kappingarvøllin meira áskoðaravinarliga.

Víst verður annars til umsóknina við fylgiskjalinum, skjal nr. 21/02231-3

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið undir Kráarheygi, sum felagið hevur avtalu við Tórshavnar kommunu um liggur í almennu byggisamtyktini í D2. Umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
At felagið hevur ætlanir um at betra um ríðiviðurskiftini hjá felagnum er gleðiligt og metir umsitingin, at ætlanin er góð. Hóast hetta, so er at viðmerkja, at tað eru tvey ríðifeløg í økinum, og at bæði feløgini skulu hava somu hentleikar tykist óneyðuga umfatandi. Tískil metir umsitingin, at neyðugt verður at kanna

møguleikarnar fyri at samskipa nakrar av hentleikunum, hetta bæði fyri at taka atlit til ikki at brúka óneyðuga nógva náttúru til hentleikar sum bæði feløgini møguliga kunnu deilast um, umframt at minka um fíggjarligu íløgurnar.

Fylgiskjalið, sum sýnir kort yvir ætlaðu útbyggingarnar, sær út til at fara útum bæði økið, sum felagið hevur avtalu um, umframt at útbyggingarnar fara útum verandi byggisamtyktarøkið. Neyðugt verður at kanna hesi viðurskiftini nærri, áðrenn møguligur stuðul verður latin, soleiðis at avtalan verður samsvarandi økinum, sum felagið varðar av ella at víðka um avtaluna, so felagið kemur at varða av ítøkiliga økinum, sum er í brúk. Harumframt verður neyðugt at fara undir at broyta byggisamtyktina, so hon verður samsvarandi ætlaðu útbyggingunum.

Vanliga, tá umsóknir um stuðul verða sendar og viðgjørdar av kommununi, tá er tað Mentamálanevndin, sum viðger hesar umsóknirnar, og tískil verður mett ráðiligt í framhaldandi tilgongdini, at ymisku viðurskiftini verða umrødd, soleiðis at onnur viðurskiftir verða kannaði, áðrenn ein møguligur endaligur stuðul verður latin felagnum. Somuleiðis er at viðmerkja, at tá kommunan stuðlar frítíðarfelagsskapum, tá plagar kommunan at stuðla einum parti av íløguni, men í hesum førinum kenna vit ikki íløguna og verður neyðugt at kanna hetta nærri, áðrenn endaligi stuðulin verður veittur.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Landsverk hevur havt ætlanir um at leggja innkomuvegin gjøgnum Havnardal og partvís eisini gjøgnum har ríðifeløgini virka. Kommunan hevur ikki sæð hetta sum ein møguleika, og Tekniska deild hevur upplýst, at kommunan væntandi kemur at yvirtaka innkomuvegin og planleggingina av vegnum. Hetta broytir um støðuna, og tískil verður mett ráðiligt, at feløgini á staðnum kunnu víðka um sítt virksemi.

Innkomuvegurin kommunali parturin - samstarv við LV – mál nr. 20/00778
Innkomuvegurin kommunali parturin – mál nr. 20/00776

Ætlanin er at játta felagnum 1 mió. kr. av L62019, Lendisgøtur. Býráðið játtaði 1 mió. kr. at gera eina gøtu kring vatnbrunnin í Havnardali. Ásannandi at tað helst verður ein longri tilgongd við hesi gøtuni, og játtanin væntandi ikki verður brúkt í ár til at gera gøtuna, so verður mett ráðiligt at flyta Føroyskt Íslandsrossafelag peningin í stuðul til at betra um hentleikarnar hjá felagnum.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Umsókn við fylgiskjali_journal nr. 21/02231-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Talan er um flyting av peningi av løgukonto fyri lendisgøtur (6275), til rakstrarkonto fyri stuðul til íløgur (5370). Sostatt er talan um eina eykajáttan, og krevur 2 viðgerðir í býráðnum.

| | **Rakstrarjáttan** | **Løgujáttan** |
|---|---|---|

| **Samlaður kostnaður** | Dkk 1.000.000 | Dkk -1.000.000 |
|---|---|---|
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk 1.000.000 | Dkk -1.000.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato juni-des 21 | Dato: |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | **Á** | | | **Av** | | | **Lokað** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk 1.000.000 | 5370 | | | 6275 | L62019 | | | Ja |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At játta felagnum eina upphædd á 1 mió. kr. í stuðul sambært omanfyri standandi
- At omanfyri standandi viðurskiftir viðv. avtaluni millum kommununa og felagið, byggisamtyktini o.s.fr. verða avgreidd, áðrenn stuðulin verður veittur.
- At flyta 1 mió. kr. av konto 6275, L62019, Lendisgøtur, til kt. 5370, Stuðul til íløgur, til at fíggja stuðulin og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið at viðgera sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, atkvøður ímóti vísandi til, at hann heldur, at atlit ikki verða tikin til náttúruna og skynsama lendisnýtslu í økinum.

Býráðsfundur 23. juni 2021:Atkvøtt varð um at beina málið aftur í Náttúru og umhvørvisnevndina, ið fall við 7 atkvøðum ímóti, 5 fyri og 1 blankari.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Birgir Nielsen

Síðan varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Tróndi Sigursson:
Tórshavnar kommuna veitir felagnum Føroysk Íslandsrossafelag eina upphædd á 1 mió kr. fyri at dagføra/víðka um breytina í Havnadali. Hetta er grundað á, at feløgini missa kappríðingarbreytina við

Hotel Føroya orsakað av, at lendið skal brúkast til nýggja innkomuvegin. Peningurin verður játtaður av konto  8175 Vegir.
Broytingaruppskotið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, einari ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg

Blankt atkvøddi: Gunvør Balle

# 182/21 Útbjóðing av útstykking við Miðhorn í Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.10.2020 | 53/20 | 20/03654-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 182/20 | 20/03654-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 262/20 | 20/03654-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 230/20 | 20/03654-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 343/20 | 20/03654-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.12.2020 | 360/20 | 20/03654-1 |
| 7 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 313/20 | 20/03654-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.12.2020 | 254/20 | 20/03654-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 137/21 | 20/03654-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 175/21 | 20/03654-1 |
| 11 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 182/21 | 20/03654-1 |

**Upprunin til málið:**
Ásannandi at tørvur støðugt er á fleiri bústøðum í Tórshavnar kommunu, og at neyðugt er at útvega fleiri byggiøki, fer kommunan undir at bjóða økið við Miðhorn út í almenna sølu.
Kommunuætlanin vísir á, at tørvur er á ymiskum bústaðasløgum, og metir umsitingin at hetta økið kann skipast við blandaðari bústaðabygging.

Mál nr. *19/01753* um útstykking av økinum við Miðhorn varð viðgjørt og samtykt í fíggjarnevndini 22. januar 2020.

Samtykt var:

- at kanna eftir um NN Holding eru áhugaðir í at makaskifta til íbúðarbygging, sambært avtalu undir Kongavarða.
- at økið, sum er eftir, eftir møguligt makaskifti, verður lýst til sølu í almennum útboði, til bústaðarbygging, eftir treytum sum umsitingin setur.

Kommunala eftirlitið hevur ikki góðkent ætlanina um at makaskifta ognina til NN Holding, og verður tí mett, at økið undir Miðhorni eigur at verða boðið út til almenna sølu til skipan av blandaðari bygging, bæði sethúsa- og íbúðabygging, herundir eisini leigubústaðir, eftir treytum ið umsitingin setur.
Økið, ið boðið verður út er sambært vegleiðandi kortskjali: *Møgulig byggilinja og útstykking til bústaðir, journal nr. 20/03654 - 3.*

Økið við Miðhorn liggur millum tveir býlingar, ið lýsa hvør sín bústaðardám. Vestanfyri liggur Norðasta Horn við sethúsum og tvíhúsum og eystanfyri liggur Millum Horna við íbúðarhúsum og sethúsum.
Um hugt verður eftir lendinum, kundi ein byggilinja við íbúðarhúsum verið løgd sum framhald frá íbúðarhúsunum Millum Horna og vestureftir móti Norðasta Horni og sethúsaútstykking verðið sambinding millum býarpartarnar.
Sí skjal 20*/03654 – 3 møgulig byggilinja og útstykkingar til bústaðir*

Keypari av ognini, skal prosjektera útstykkingina, soleiðis at samlaða byggingin er skipað í eini heild í mun til lendið og felagsøki. Økið skal skipast við atliti at atkomuviðurskiftum fyri øll, bæði í byggingini sjálvari og í mun til atkomu- og ferðsluviðurskiftum í økinum.

Tilboðsgevarar skulu hava neyðugar fakligar førleikar til at lýsa og loysa samlaðu ætlanina í síni heild.

**Lýsing av málinum – samandráttur**:
At byggja bústað á økinum við Miðhorn, hevur tað við sær, at Norðasta Horn fær betri samband við býin. Talan er um eitt avmarkað øki á matr. nr. 1160a, sum er ogn hjá Tórshavnar kommunu, sí kortskjalið.

Kortskjalið er bert vegleiðandi, og skal eitt hóskandi øki sundurbýtast frá matr. 1160a til endamálið. Á økinum eru fýra leigumál um traðarbrúk, sum eru uppsøgd at fara úr gildi 30. November 2020.

Í sambandi við útbjóðingina av økinum, fáa grannar høvi at koma við viðmerkingum, so teirra ynski í størst møguligan mun verða tikin við í ætlanina.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Vegaatkoma verður frá Landsvegi ella frá privatum vegi, millum Horna.
Økið liggur í 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum í høvuðsheitum verður nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt. Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.
Almenna byggisamtyktin skal tí broytast fyri økið, um farið verður undir útstykkingina, soleiðis at økið verður fevnt av ásetingunum fyri A1 øki, og alt eftir nágreiniligu útstykkingarætlanini, verður helst neyðugt at gera serstaka byggisamtykt. Tað vil siga, at byggisamtyktin skal broytast fyri økið.
Hugsast kann, at partur av økinum verður í A1 øki og partur verður í A3 øki, og at serstøk byggisamtykt skal gerast fyri part av økinum.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Málið verður avgreitt við allar avvarðandi myndugleikar og leigarar. T.d. liggur økið upp at landsvegi, sum krevur eina hoyring hjá Landsverki. Harafturat skal ein matrikulering fara fram, sum krevur eitt samskifti við Umhvørvisstovuna.

**Skjøl:**
*Møgulig byggilinja og útstykking til bústaðir, journal nr. 20/03654 - 3.*

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, býverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:
- at umsitingin fær heimild at bjóða økið við Miðhorn út í almenna sølu.
- útbjóðingin skal skipast í tvær verkætlanir:
    1. Sethúsaøki
    2. Íbúðarbygging til leigu
- Útbjóðingin verður skipað eftir sama leisti, ið áður er brúkt, sambært útbjóðingartreytum, ið umsitingin setir.

Umframt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 06. oktober 2020:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Bergun Kass og Tróndur Sigurðsson, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, tekur ikki undir við málinum og mælir til, at spurningurin um yvirtøku av landsvegnum verður avgreiddur, áðrenn økið verður boðið út sambært omanfyristandandi treytum.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, ongari ímóti og seks blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
Tá freistin at lata tilboð inn 4. des 2020 kl. 15 var farin, vóru ávikavist 8 tilboð innkomin – 4 tilboð uppá íbúðarøkið og 4 tilboð upp á set-/raðhúsaøkið. Harumframt góvu tveir tilboðsgevarar alternativt tilboð inn upp á bæði økini.

Boðgevararnir fingu síðani møguleika at lata inn hægri boð, og skuldu hesi verða kommununi í hendi í seinasta lagi 8. desember 2020 kl. 15.

Tá seinna freistin at lata tilboð inn 08. des 2020 kl. 15 var farin, vóru ávikavist 4 tilboð innkomin – 2 tilboð uppá íbúðarøkið og 2 tilboð upp á set-/raðhúsaøkið, umframt at tveir tilboðsgevarar góvu alternativt samlað tilboð inn upp á bæði økini.

Av tí at útbjóðingarskrivini ikki biðja um samlað tilboð fyri bæði økini, so verður mett, at alternativu tilboðini ikki kunnu takast við í viðgerðina av tilboðunum, og verða tey tí strikaði.

Tilboðini fyri 1. og 2. rundu eru lýst í viðhefta skjali, Tilboðsupphæddir Miðhorn, journal nr. 20/03654-33.

Hægsta tilboðið var tilboðið frá Felag undir stovnan v/Gordon Rajani. Felagið lat eitt samlað tilboð inn áljóðandi kr. 5.105.400,00, og er tilboðið sum omanfyri nevnt ikki tikið við í viðgerðina. Tó verður í tilboðnum boðin fermetra kostnaður á kr. 402 kr/fermetur, sum samlað gevur omanfyri nevndu tilboðsupphædd. Verður upphæddin býtt á ávikavist íbúðaøkið á 5.700 fermetrar og set-/raðhúsaøkið á 7.000 fermetrar, eru boðini ávikavist kr. 2.291.400,00 fyri íbúðaøkið og 2.814.000,00 fyri set-/raðhúsaøkið. Tilboðið hevði harumframt hesi fyrivarni:

> **Fyrivarni:** Vit hava uml. 4.827m2 av lendi til avlops undir Kongavarða. Hetta lendi ynskja vit at lata innaftur til Tórshavnar Kommunu fyri ein prís á 870 kr/m2 sum er hóskandi og sum tí skal mótroknast. Millumgjald verður sostatt: 822.510,-
>
> Fyrivarni verður eisini tikið fyri, at man blívur samdur um, hvussu vegurin verður gjørdur. Tí ynskiligt er at tillaga vegaloysnina.

Umsitingin metir, at hesi fyrivarni frá felagnum víkja ov nógv frá kravinum um fígging, til at tilboðið kann góðtakast.  Viðmerkjast kann, at verkætlanin undir Kongavarða og málið um sølu at lendi við Miðhorn ikki kunnu knýtast saman á tann hátt, ið gjørt verður í fyrivarninum til tilboðið.

Fortreytin fyri tilboðnum er, at Tórshavnar kommuna keypir uml. 4.800 m² av lendi undir Kongavarða frá felagnum fyri 870 kr./m², og at peningurin frá hesi sølu gongur inn í boðið upp á lendið við Miðhorn.

Víst skal verða á, at Tórshavnar kommuna ikki hevur samtykt at keypa aftur uml. 4.800 m² av lendi frá felagnum undir Kongavarða fyri 870 kr./m², og tí fyriliggur eingin avtala um hetta.

Av tí at tilboðsgevarin treytar sítt boð av einum øðrum handli, sum eingin avtala fyriliggur um, fer umsitingin at mæla frá at taka av tilboðnum, og mælt verður tískil til at vraka tilboðið frá felagnum.

Næst hægsta tilboðið á kr 1.635.900,00 fyri íbúðaøkið var frá Articon. Hetta tilboðið hevur ein fermetrakostnað áljóðandi 287,00 kr fyri teir 5.700 fermetrarnar. Tilboðið er væl lýst við einum sokallaðum skipanaruppskotið og er uttan nøkur fyrivarni.

Næst hægsta tilboðið á kr. 2.550.000,00 fyri set-/raðhúsaøkið var frá Felag undir stovnan v/ Janus Petersen. Hetta tilboðið hevur ein fermetrakostnað áljóðandi 364,28 kr fyri teir 7000 fermetrarnar. Tilboðið hevði harumframt hesi fyrivarni:

> Boðið er givið við teirri fortreyt, at ein annar keypir stykkið til íbúðarbygging, og at kostnaðurin til skipan av økinum, og at gera vegin og fríøkið, verður býttur líka millum keyparan av íbúðarverkætlanini og keyparan av sethúsa-/raðhúsaverkætlanini.
>
> Viðmerkjast skal, at boðið er givið við atliti til ta óvissu, sum liggur í, at myndugleikatreytir v.m. í pkt. 3.2 í útbjóðingartilfarinum ikki er útgreinað nærri. Harvið er ein ávís óvissa hjá tilboðsgevara í mun til kostnaðarútrokningar og váðan við verkætlanini.
>
> Tað er ein fortreyt, at ein leistur verður gjørdur til at handfara eina møguliga støðu, har semjast ikki fæst við keyparan av íbúðarstykkinum og/ella kommununa, um skipan og útbygging av økinum.

Umsitingin metur ikki, at hesi fyrivarni eru ov víttgangangandi í mun til treytirnar í útboðstilfarinum.

Tó hevur umsitingin mett um tilboðið í mun til aðrar sambærligar sølur av lendi seinastu árini, og lendi, ið er til sølu í privatum handli í løtuni. Hesar sølur vísa greitt, at byggilendi til sethús verður selt fyri ein munandi hægri kostnað enn tann, sum er boðin fyri lendið undir Miðhorn, sí j.nr. 20/03654-32.

Av tí at tilboðsupphæddirnar fyri set-/raðhúsaøkið ikki er at meta ájavnar við onnur líknandi økir, sum antin standa til sølu ella nýliga eru seld í kommununi, so metir umsitingin, at útbjóðingin fyri set-/raðhúsaøkið eigur at verða strikað vísandi til, at ein søla fyri tann prís, ið er boðin, ikki er fíggjarliga skynsom.

Skotið verður í staðin upp, at kommunan sjálv stendur fyri einari kommunalari sethúsa/raðhúsaútstykking í økinum, og á henda hátt tryggjar borgarum í kommununi nøkur grundøkir, sum verða útlutað eftir kommunala leistinum í sambandi við útlutan.

Viðvíkjandi økinum til íbúðarbygging verður tó mett, at innkomna boðið er nøktandi, vísandi til tær avmarkingar, ið eru lagdar á økið, herundir serliga at talan skal vera um leigubústaðir .

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til:

- At annulera alternativu tilboðini.
- At annulera tilboðini upp á set-/raðhúsa økið, grundað á at sambærlig øki í kommununi verða seld fyri væl hægri kostnað enn innkomnu tilboðini eru ájóðandi, og grundað á, at mett verður skilabetri, at kommunan fer undir at skipa set-/raðhúsa útstykkingina.
- At taka av tilboðnum hjá Articon upp á íbúðarøkið, hetta grundað á, at kostnaðurin verður mettur at vera á nøktandi støði fyri hetta lendið í mun til tær avmarkingar, ið ætlanin er at leggja á økið í sambandi við søluna.
  At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at økið til set-/raðhús verður boðið út aftur til sølu við treytum um, at byggjast skulu leigubústaðir á hesum øki. Málið beint í býráðið.

Heðin Mortensen atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið aftur í fíggjarnevndina, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Turid Horn, Bogi Andreasenn og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um uppskot frá Heðini Mortensen um at beina málið aftur í fíggjarnevndina, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Anniku Olsen:

Mælt verður til at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini við teirri broyting, at viðvíkjandi lendinum til set-/raðhús verður - vísandi til samtyktina í máli 18/01973 og ætlanina at makaskifta lendi á Kongavarða við lendi við Miðhorn, mælt býráðnum til enn einaferð at troyta møguleikan at fáa loyvi til upprunaligu ætlanina um at makaskifta og, um hetta ikki ber á mál, at bjóða lendið við Miðhorn, ið var ætlaður til set-/raðhús, út í fríari sølu við treytum um, at leigubústaðir skulu byggjast á ognini.

Broytingaruppskotið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Turid Horn, Bogi Andreasenn og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Býráðslimirnir Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein gera galdandi, at teir ikki eru kunnaðir um teir nýggju upplýsingarnar, sum fyriliggja í málinum og sum grunda avgerðina hjá meirilutanum og føra tískil fram, at málið ikki er nóg væl lýst og átti at verið beint aftur í nevnd at viðgera.

**Ískoyti:**
26. mars 2021 móttók kommunan endaligt svar frá Kommunala eftirlitinum, har ætlaða makaskiftið, sum varð samtykt 17. desember 2020, verður noktað.

Síðani hava fundir verið við tveir teir hægst bjóðandi upp á bæði lendini. Roynt hevur verið, at fáa teir bjóðandi at samstarva um eina ætlan fyri alla útstykkingina, men tað hevur ikki víst seg at borið á mál.

Ásannandi at tað kann gera tilgongdina meiri fløkta, at hava tveir aktørar at samstarva um skipanina og útinnanina av økinum, hetta tí at tað liggur ein fíggjarligur vági í, umframt at tilgongdin kann verða merkt av, at ósemjur millum aktørarnar kunnu seinka tilgongdini, so verður mett ráðiligt at kanna møguleikan fyri at fáa ein arbeiðstakara at taka sær av allari verkætlanini, soleiðis at verkætlanin kann verða framd skjótt og gott.

Articon vann útboðið av íbúðarbyggingini við hægsta tilboðnum. Undir stovnan v/Janus Petersen hevði hægsta tilboðið upp á lendi til set-/raðhúsini, men bjóðaði hetta felagið ikki upp á íbúðarverkætlanina.

Tilboðini upp á lendið til set-/raðhúsini var mett ov lág grundað á at sambærlig øki í kommununi verða seld fyri væl hægri kostnað enn innkomnu tilboðini, og grundað á, at mett varð skilabetri, at kommunan fór undir at skipa set-/raðhúsa útstykkingina. Býráðið samtykti at bjóða lendið, ætlað til set-/raðhús, út í fríari sølu við treytum um, at leigubústaðir skuldu byggjast á ognini. Í tilgongdini at fáa teir bjóðandi at samstarva um útstykkingina hevur tað víst seg óheppið at hava tveir aktørar á eini útstykking, og tí verður mælt til, at fáa ein arbeiðstakara at taka sær av allari útstykkingini, bæði íbúðarbyggingini og set-/raðhúsabyggingini, umframt at sleppa kravinum um, at bústaðirnir á set-/raðhúsa økinum skulu vera til leigubústaðir.

Kommunan er í bústaðarneyð, og tí verður í næstum farið undir eina nýggja útstykking á Argjum. Fíggjarligi vágin fyri kommununa við at gera útstykkingar er rættiliga stórur, og tí verður mett, at tað kann loysa seg um ein aktørur fær alla útstykkingina millum Horna at menna, bæði fyri kommununa í mun til at fáa fleiri bústaðir í kommununi skjótt, umframt við at sleppa undan eini møguligari fígging av at veita fleiri bústaðir.

Av tí at Articon vann útboðið upp á lendi til íbúðarbyggingina, so verður mett ráðiligt fyri at fáa ein aktør upp á alla útstykkingina, at fara í eina tilgongd við Articon, har Articon fær í boði at keypa lendið til set-/raðhús fyri tilboðskostnaðin, sum felagið Undir Stovnan bjóðaði. Talan er um ein tilboðshækkan uppá áleið 500.000 kr. Mett verður, at verður farið undir eina tílíka tilgongd, so kann útstykkingin verða framd skjótt og gott, grundað á at ein aktørur tekur sær av øllum viðurskiftunum.

Articon lat saman við tilboðnum kommununi uppskot uppá skipan av báðum stykkjunum, sí viðhefta ávegis skipanaruppskot, journal nr. 20/03654-41. Væntandi verður hetta ætlanin aftanfyri alla útstykkingina.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at Articon fær í boði at keypa lendið til set-/raðhús fyri tilboðsupphæddina, sum var hægst, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 183/21 Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri partin av Karlamagnusarbreyt ímillum Rólantsgøtu og Ólivantsgøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 138/21 | 21/02442-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 183/21 | 21/02442-1 |

**Upprunin til málið**
Í 2015 varð serstaka byggisamtyktin fyri Karlamagnusarbreyt broytt, soleiðis at ovastu stykkini, sum áður vóru ætlaði blandaðari bústaða- og miðstaðabygging, vóru løgd til sethúsastykki. Tað, at stykkini áður vóru ætlaði blandaðari bygging, hevði ávísar bindingar við sær, m.a. vóru áløgd byggifelt, sum vóru løgd grundað á kloakleiðingar og fráleika til grannar, sí kort *Byggifelt – áðrenn broyting*. Hesi byggifeltini vórðu ikki broytt, tá økið varð broytt til sethúsaøki.

**Lýsing av málinum**
Smb. ásetingum í almennu byggisamtyktini og Bygningskunngerðini 2017, skal øll sethúsabygging vera 2,5 m frá grannamarki. Fyri matr. nr. 135qv og 135qw við Karlamagnusarbreyt í Hoyvík er ásett í serstakari byggisamtykt, at frástøðan til markið vestanfyri, skal vera uml. 7-8 metur frá marki móti vestur, og gevur hetta eitt sera lítið byggifelt hjá eigarunum at byggja á. Ásetta byggifeltið er lagt grundað á m.a. kloakkleiðingar og fyri at fylgja byggilinjuni víðari oman gjøgnum Karlamagnusarbreyt.

Dámurin á tí partinum av Karlamagnusarbreyt, sum liggur millum Rólantsgøtu og Ólivantsgøtu er blivin ein annar, enn ætlanin var, tá tær stóru linjurnar vórðu lagdar í fyrstu serstøku byggisamtyktini fyri Karlamagnusarbreyt. Tá var ætlanin, at miðstaðargøtan Karlamagnusarbreyt skuldi vera eitt samanhangandi øki frá kirkjutorginum og niðan til Ólivantsgøtu. Hetta bleiv sum áður nevnt broytt í 2015, tá økið millum Rólantsgøtu og Ólivantsgøtu varð broytt til sethúsaøki, og er økið í dag meira ein partur av sethúsaøkinum á Hoyvíkshædd, enn ein partur av miðstaðargøtuni Karlamagnusarbreyt. Tí verður ikki mett, at tørvur er á at halda fast í teimum byggilinjum, sum vóru lagdar í sambandi við miðstaðargøtuna Karlamagnusarbreyt, men at byggilinja á 2,5 m móti vestri, verður løgd fyri matr. nr. 135qv og 135qw, sí kortskjal *Byggifelt – eftir broyting.*

Harumframt er søkt um at flyta kloakkleiðingina út av privatu ognunum og út á kommunalt lendi, sí mál 21/02553.

Økið vestanfyri matr. nr. 135qv og 135qw er fríøki, og fer ein tílík broyting tískil ikki at hava stórvegis ávirkan á grannar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum m.a. hevur hesar ásetingar:

- Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.
- Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Broytingar á matr. nr. 135qv og 135qw í Hoyvík,* journal nr. 21/02553.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *Byggifelt – áðrenn broyting,* journal nr. 21/02442-2.

- *Byggifelt – eftir broyting,* journal nr. 21/02442-2.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggifeltið fyri matr. nr. 135qv og 135qw, Hoyvík verður broytt smb. kortskjalinum *Byggifelt – eftir broyting*, treytað av, at kloakkin verður flutt, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 184/21 Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 140/21 | 21/02624-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 176/21 | 21/02624-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 184/21 | 21/02624-2 |

**Upprunin til málið**
Málið er byrjað sum eitt politiskt mál.

**Lýsing av málinum**
Sambært kommunuætlanini og bústaðarpolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu eru visjónirnar fyri kommununa, at fleiri bústaðir skulu gerast í kommununi. Politiskt er ynski at royna aðrar leiðir fyri at nøkta tørvin á bústøðum, og tí verður farið undir at bjóða privatum mennarum at keypa part av matr. nr. 203c í Kollafirði fyri at menna til bústaðir.

Tórshavnar kommuna eigur matr. nr. 203c, og upprunaliga var ætlanin at stykkja lendið út saman við parti av matriklunum niðanfyri út til sethúsagrundir. Hendan ætlanin kom ongantíð á mál, og nú er ynski so at bjóða part av økinum út til aktørar at menna til bústaðir. Ætlanin er at selja uml. 3600 fermetrar í fríari sølu. Sí kortskjal, øki til sølu, journal nr. 21/02624-4.

Í sambandi við útboðið verður krav sett um, at tað skulu byggjast íbúðir ella raðhús. Tað er upp til tey bjóðandi at koma við uppskoti, hvussu byggingin verður skipað og hvat slag av bústøðum verða bygd. Bústaðirnir kunnu verða bygdir sum eigara- ella leigubústaðir.

Tilhoyrandi parkering og nøktandi loysnir fyri uttanumøkið er partur av loysnini.
Kommunan setir sum treyt, at tað er eitt hóskandi tal av bústøðum í verkætlanini. Tað er ein fyrimunur um byggingin er fjølbroytt og at atlit verður tikið til umhvørvið og stórfingna útsýnið. Dentur verður lagdur á, at byggingin tekur seg væl út, er dygdargóð og fellur væl inn í landslagið.

Útbjóðingin og sølan verður løgd soleiðis til rættis, at tað verður komið fram til bestu loysnina, sum tryggjar eina fjølbroytta, snøgga og dygdargóða bústaðarloysn, sum tekur seg væl út í umhvørvinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matrikul nr. 203c liggur í umráðispartinum A1 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og er serstøk byggisamtykt fyri útstykking á Lygnesi í Kollafirði galdandi fyri økið, sí skjal nr. 21/02624-3.

Tá vinanndi verkætlanin verður ment, verður neyðugt at broyta byggisamtyktina samsvarandi ætlanunum fyri økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er týdningarmikið at tryggja, at innkomnu tilboðini verða gjøgnumgingin við atliti at tryggja, at tað sum ætlanin er at fara undir at byggja hóskar til umhvørvið og fellir væl inn í økið sum heild.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið hevur ikki verið hjá øðrum deildum enn.

**Skjøl**
Øki til sølu, journal nr. 21/02624-4

Serstøk byggisamtykt fyri útstykking á Lygnnesi í Kollafirði, journal nr. 21/02624-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**

Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á stjórnardeildini og býararkitekturin mæla til, at matr. nr. 203c verður boðin út í fríari sølu við endamálinum at menna bústaðir á ognini eins og omanfyri lýst, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 185/21 Umsókn um keyp av lendi av matr. nr. 1100, Tórshavn til fríøki til íbúðarøkið á Fløtum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 22.06.2021 | 41/21 | 21/01523-4 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 131/21 | 21/01523-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 177/21 | 21/01523-4 |
| 4 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 185/21 | 21/01523-4 |

**Lýsing av málinum**

Umsókn er komin til kommununa, dagfest 29. mai 2021, um at keypa eitt øki á umleið 1000 fermetrar burtur av matr. nr. 1100, til at leggja saman við matr. nr. 919a, til at byggja fleiri íbúðir á Landavegnum/Fløtum.

Økið, sum søkt verður um at keypa, liggur sum partur av skúlanum á Fløtum, millum Hans Andriasar gøtu og Íbúðarbyggingina á Fløtum, og ætlanin er at hesin parturin skal liggja sum fríøki til íbúðirnar.

Grundstykkið, sum Skúlin á Fløtum stendur á, er íalt 41.011 m$^2$ til víddar, tá er Hans Andriasar gøta og partur av Janusargøtu við.

**<u>Verandi:</u>**

Grundstykkið 41.011 m$^2$
Verandi bygningur er uml. 6.363 m$^2$ til byggistigið
Verandi bygningur er uml. 11.750 m$^2$ til nýtslustigið

Byggistigið er 0,155, mest loyvda er 0,25
Nýtslustigið er 0,287, mest loyvda er 0,30

**<u>Broytt:</u>**

Grundstykkið 40.011 m$^2$
Verandi bygningur er uml. 6.363 m$^2$ til byggistigið
Verandi bygningur er uml. 11.750 m$^2$ til nýtslustigið

Byggistigið verður 0,159, mest loyvda er 0,25
Nýtslustigið verður 0,294, mest loyvda er 0,30

**Lógir, ásetingar o.a.**

Alt økið liggur í umráðispartinum C3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar m.a. eru:

> *Umráðisparturin verður í síni heild lagdur til miðstaendamál, t.e. handlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki ið hava samband við hetta. Loyvt er eisini at byggja skúlar, almennar stovnar og íbúðir*

Økið liggur eisini í serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil, eind 3, sum er lagt til miðstaðar- og bústaðarbygging

Økið, sum ætlanin er at keypa, liggur við somu ásetingum sum matr. nr. 919a, bæði í almennu- og í serstøku byggisamtyktini og eru ásetingarnar tí ongin hindring.

**Upplýsingar frá umsitingin**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**<u>Býarskipanardeildin:</u>**
Tá íbúðarverkætlanin varð sett í gongd, varð byggistigið broytt frá 0,5 til 0,8, hetta fyri at byggiharrin fekk bygt fleiri íbúðir á økið. Nú vísir tað seg, at tørvur er á størri lendi fyri at fáa verkætlanina at ganga upp, og tí verður søkt um at keypa part av matr. nr. 1100.

Vanligt er ikki at selja av fríøkinum tilhoyrandi aðrar byggingar, men í hesum førinum kann man siga, at hetta er eitt avlops-stykki, sum helst ikki fer at verða brúkt til uppihald, men heldur sum frílendi millum byggingarnar. Um økið verður selt, verður neyðugt at tryggja í skeytinum, at økið ikki verður bygt á, men verður selt fyri at fáa byggistig og nýtslustig at ganga upp fyri íbúðarbyggingina.

Somuleiðis eigur at verða tryggjað, at um økið verður selt, sum søkt er um, so eigur óbygdi parturin av matr. nr. 917, har Musikkskúlin er staðsettur, at verða hildið frítt og uttan bygging, soleiðis at um skúlin á Fløtum við árunum hevur tørv á fleiri hølum ella neyðugt verður við størri vídd, so eigur hesin matrikulin at verða hildin til eina útbygging av skúlavirkseminum.

**<u>Tekniska deild:</u>**
Økið, sum er lagt til veg á matr. 1100 (uml. 7400 m³), kann, um byggi- og nýtslustigið av skúlabygningunum skal vera undir hægst loyvdu virðir, ikki frábýtast til litra, heldur ikki um ætlaða sølan ikki verður framd. Tí vil ætlaða sølan einans hava beinleiðis ávirkan á innfrakervið á matr. 1100 um vegurin í framtíðini skal frábýtast til litra, og tað tá koma at mangla 1000 m³, fyri at hetta skal verða loyvt.

**<u>Viðmerkingar frá Stjórnarskrivstovuni:</u>**
Sum tað framgongur í frágreiðing omanfyri, er víddin á verandi øki til skúlan nóg stórt, hóast uml. 1.000 fermetrar verða seldir burtur av, og lagdir aftur at umsøkjarans matrikli.

Høvuðsreglan viðvíkjandi sølu av kommunalari fastogn er, at føst ogn hjá kommununi ikki má seljast, uttan so, at ognin hevur verið boðin út alment, sbrt. § 44, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 2000 um kommunustýri. Í kunngerð nr. 122 frá 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn, eru undantøk til høvuðsregluna. Sambært viðmerking frá kommunala eftirlitinum í øðrum máli framgongur at, við heimild í § 2. Stk.2, í somu kunngerð kann tó verða vikið frá kravinum um alment útboð, tá tað annars eru serlig viðurskifti, ið tala fyri at, fastognin kann verða seld uttan alment útboð. Til hetta krevst góðkenning frá landstýrismanninum. Góðkenningin er einans ætlað at vera nýtt í serligum føri, har tað má metast, at kravið um alment útboð vil forða søluni óneyðugt, og at alment útboð ikki hevur við sær tilboð um hægri prís.

Sølan av økinum, sum søkt verður um, lýkur ikki undantøkini í kunngerð um alment útboð av fastari ogn, og er tí neyðugt at søkja um loyvi frá landstýrismanninum til søluna.

Grundstykkið, sum søkt verður um í hesum føri, er ein avlangur tríkantur, sum liggur millum verandi ogn umsøkjarans og vegin. Longdin er uml. 85 metrar. Størsta breidd uml. 22 metrar og minsta breidd niður móti 0 metrum.

Í hesum ítøkiliga føri, metir kommunan, at økið er ikki egnað til bygging av sjálvstøðugum bygningi, og kann einans brúkast sum byggiøki, um tað verður lagt afturat grannaognini.

Ognarmeting verður umbiðin frá ognarmeklara, og verður møgulig søla framd við grundarlagi í hesi virðismeting, sum skal avspegla marknaðarvirði.

Umsókn um loyvi til at selja økið til umsøkjara, uttan at økið verður bjóða alment til sølu, verður send kommunala eftirlitinum.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. juni 2021 | Blað nr.: 755<br><br>Formansins merki: |

**Skjøl**
j.nr. 21/01523-1 Umsókn um keyp av lendi
j.nr. 21/01523-3 nýtt uppskot til keyp av lendi
j.nr  21/01523-4 Kort til keyp av lendi

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini, býararkitekturin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla býráðnum til, umvegis teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina, at selja umsøkjara uml. 1.000 fermetrar av matr.nr. 1100 at leggja afturat matr.nr. 919a.
Um økið verður selt, verður neyðugt at tryggja í skeytinum, at økið ikki verður bygt á.
Sølan er treytað av loyvi frá kommunala eftirlitinum, og verður selt fyri marknaðarvirði sambært meting frá ognarmeklara.

**Tekniska nevnd 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 186/21 Umsókn um keyp av øki burturav matr. nr. 1076a, Stiðjagøta at leggja saman við 1076m, Stiðjagøta 3

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 22.06.2021 | 42/21 | 21/02406-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 129/21 | 21/02406-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 178/21 | 21/02406-2 |
| 4 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 186/21 | 21/02406-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn um at keypa økið frá kommununi.

**Lýsing av málinum – samandráttur :**
Umsøkjari, sum eigur vinnustykkið matr. 1076m, ynskir at keypa eitt øki av vegnum matr. 1076a Stiðagøta, Tórshavn.

Umsókn er um at keypa umleið 228 fermetrar av vegnum til at leggja saman við matr.1076m. Økið, søkt verður um at keypa, brúkar eigarin sum parkeringspláss í dag til sína bilasølu.

- Matrikul 1076m er umleið 2595 fermetrar til støddar.

Bilasølan húsast á matr. 1076m, og er virksemið sera nógv økt síðstu árini.

Ætlan er at umskipa økið, soleiðis at meira pláss verður til goymslu og fráseting av bilum, hetta umfatar eisini niðurtøku av gomlu sethúsunum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í ásetingum B3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn

**§ 10. Ásetingar fyri umráðispart B3 í 3. grundumráði**
1 Loyvi er einans at byggja hús til smá vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi. Tó er loyvt á hvørjum grundstykki at ger bústað til eigara ella fyristøðufólk virkisins.

2 Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

3 Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 800 m$^2$ og í mesta lagi 2000 m$^2$.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Kommunan selur ikki burtur av kommunalum vegi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Onki mál sum hevur týdning

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl**
J. nr. 21/02406-1 umsókn

j. nr. 21/02406-3 Kort úr Gis yvir økið

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla frá at selja burtur av kommunalum vegi og beina málið í fíggjarnevndina umvegis byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tekniska nevnd 22. juni 2021:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Bjørg Dam og Kári Johansen, samtykti at ganga umsóknini á møti.

Ein minniluti, Ruth Vang og Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Einn meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Kári Johansen, samtykti at ganga umsóknini á møti.

Ein minniluti, Ruth Vang og Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021: Samtykt við 9 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 4 blonkum atkvøðum.**

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg og Birgir Nielsen

Blankt atkvøddu: Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

# 187/21 Dagføring av Norðara Ringvegi við Norðurlandahúsið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 02.06.2021 | 11/21 | 21/02118-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 07.06.2021 | 34/21 | 21/02118-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 159/21 | 21/02118-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 187/21 | 21/02118-1 |

**Lýsing av málinum**
Norðari Ringvegur hevur tørv á einari dagføring. Ferðslan, sum skal snara til vinstru inn til Norðurlandahúsið, er til ampa fyri ferðsluna, sum skal eystureftir á Norðara Ringveg.

Tað er tøvur á einum busslumma í sunnara borði av vegnum. Í dag steðgar bussurin mitt á vegnum, tað ger eisini, at ferðslan má steðga og fólk, sum koma úr bussinum, ikki vita hvar tey skula fara yvir um vegin.

Í sambandi við hesa dagføring er eisini nøktandi øki til súkklubreyt í sunnaru síðu, frá Áargeil 17 til rundkoyringina við Sundsvegin

Av tí at SEV er í holt við at leggja ein elkaðal í sunnaru gongubreyt, er tað eitt upplagt høvi at breiðka Norðara Ringveg nú.

Kostnaðarmetingin fyri prosjektið er uml. 1.500.000 kr. v/ kommunalum mvg.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Kort j.nr. 21/02118-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Talan er um dagføring av ringvegnum við Norðurlandahúsið.

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. juni 2021 | Blað nr.: 759 | |
| | Formansins merki: | |

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 1.500.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 1.500.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato: aug-okt 2021 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

## Játtan:

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk 1.500.000 | 8175 | nýggj | | 8175 | LK81042 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Ferðslubólkurin mælir til at taka undir við at Norðari Ringvegur verður dagførdur og breiðkaður, so pláss verður fyri vinstrasvingsbreyt til Norðurlandahúsið fyri ferðsluni eystureftir, buss lumma í sunnaru síðu, súkklubreyt í sunnaru síðu og gonguteigi við miðoyggj.

**Ferðslunevndin 02. juni 2021:** Ferðslunevndin tekur undir við tilmælinum frá ferðslubólkinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At taka undir við samtyktini hjá ferðslunevndini
- At seta verkætlanina í gongd
- At fíggja verkætlanina við kr. 1.500.000,00 av konto 8175, LK81042, Vegaverkætlanir, á konto 8175, nýggj verkætlan "Dagføring Norðari Ringvegur við Norðurlandahúsið"
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. juni 2021 | Blað nr.: 760<br>Formansins merki: |

# 188/21 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.06.2021 | 37/21 | 21/02196-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 160/21 | 21/02196-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 188/21 | 21/02196-2 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við at samráðingar hava verið millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um at kommunan tekur á seg at gera nýggjan uttara ringveg við íbindingum til Tórshavn er gjørd avtala millum partarnar um, at Føroya landsstýri letur Tórshavnar kommunu stuðul til part av verkætlanini.

**Lýsing av málinum**
Nýggjur uttari ringvegur í Tórshavn hevur verið í umbúna í mong ár og serliga síðani farið var undir at fyrireika Eysturoyartunnilin.

Landsverk hevur arbeitt við at fyrireika henda veg, og í hesi fyrireiking er linjuføring fyri vegin løgd og knútapunkt á linjuføringini staðsett (sí kort í fylgiskjølum). Vegurin verður gjørdur millum rundkoyring oman fyri Sandvíkarhjalla (C) og Marknagilsvegin við Dánjalstrøð (G). Á hesum strekkinum verða knútapunktini C1, C2 og C3, sum eru íbindingar til millum knútapunkt C og knútapunkt E, sum er rundkoyring við Villingadalsvegin/Sundsvegin. Úr knútapunkti E verður tunnil til knútapunkt F, sum er vestan fyri Hotel Føroyar. Í knútapunkti F verður gjørd rundkoyring, sum hevur fýra greinar: Ein í tunnilin, ein oman í knútapunkt G og tvær til Landið at føra ferðsluna til ávikavist Oyggjarvegin og til Sandoyarleiðina.

Alt vegastrekkið millum punkt B og G verður kommunalur vegur.

Samlaði kostnaðurin er mettur til at vera 288 mió. kr.

Stuðulin frá landinum verður í mesta lagið 110 mió. kr., sum ásett er í løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn. Stuðulin verður veittur yvir 5 ár.

Stuðulin er treytaður av, at

- arbeiðið við nýggja uttara ringvegnum verður framt í sama mun, sum stuðul verður goldin út.
- Nýggi uttari ringvegur skal lúka krøv til ferðslutrygd og vera atkomuligur fyri ferðslu til og frá meginøkinum. Hetta er tó ikki galdandi í tíðarskeiðum, tá vegarbeiði og tílíkt verður gjørt.
- Alt vegastrekkið skal haldast frítt fyri forðingar, sum t.d. ferðslubungur, soleiðis at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.
- Nýggjar íbindingar í nýggja uttara ringveg kunnu bert gerast til vegir, sum eru ætlaðir til bilferðslu; ikki til atkomu til bygningar og tílíkt. Er neyðugt at gera nýggja íbinding til annað enn ein veg, sum bara er ætlaður bilferðslu, skulu hesar fyriskipast soleiðis, at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.
- Útgoldin stuðul kann verða kravdur afturgoldin, um treytirnar ikki verða hildnar. Útgoldin stuðul kann tó ikki verða kravdur afturgoldin, tá løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn er farin úr gildi.
- Fíggjarmálaráðið kann tinglýsa hesa avtalu á matrikulin, tá nýggi uttari ringvegurin er liðugur.

Avtalan er víðari treytað av, at Løgtingið samtykkir uppskotið til løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn, og at Tórshavnar Býráð samtykkir og fremur verkætlanina sambært ásetingum í løgtingslógini og sambært avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um Fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.

Umsitingin kannar alt tøkt verklagstilfar, forkanningar og alt annað tilfar, sum Landsverk hevur framleitt í sambandi við hesa verkætlan, og sum uttan viðurlag verður latið Tórshavnar kommunu sambært avtaluni.

Byggiskrá verður gjørd við støði í úrslitinum av hesum kanningum, og arbeiðið at fremja verkætlanina verður boðið út av umsitingini sum heildarverkætlan, antin fyri:

- Alla verkætlanina samlað,
- ella fyri vegir og tunnil hvør sær.

Umsitingin arbeiðir í hesum sambandi eisini við at finna fíggingarleist fyri kommununnar part av verkætlanini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Innkomuvegur yvirlit, j.nr. 21/02196-4
Avtala_FMR_TK, j.nr. 21/02196-1
LI_uttararingveg, j.nr. 21/02196-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Biðið verður um 1 mió. kr. til at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við omanfyri standandi fyrireikingar.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| Kostnaður í hesum árinum | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Dato | Dato: juni-des 21 |
| Avleiðingar á rakstur | | Dkk |

**Játtan:**

| Upphædd íalt | Á | | | Av | | | Lokað verkætlan | Eykajáttan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Deild | Verkætlan | | Deild | Verkætlan | | | |
| Dkk 1.000.000 | 8175 | L81037 | | 8175 | LK81042 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við:

- avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.
- at umsitingin fær heimild til at gera byggiskrá fyri heildararbeiðstøku.
- at umsitingin fær heimild til at bjóða arbeiðið út í heildararbeiðstøku fyri:
  - Alla verkætlanina samlað,
  - ella fyri vegir og tunnil hvør sær.
- Umsitingin fær játtað ein fíggjarkarm á kr. 1.000.000,- av konto 8175, LK81042, Vegaverkætlanir, á konto 8175, L81037, Innkomuvegur kommunali partur, til at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við omanfyristandandi fyrireikingar.
- Málið soleiðis verður samtykt og beint víðari í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt við teirri broyting, at partar av vegnum/tunnilin kann bjóðast út í innbodnari licitatión.

# 189/21 Parkeringsøki á Smærugøtu Áheitan á TK at keypa ognina matr. nr. 1467e, fyri at betra um ferðslu- og parkeringsviðurskiftini við Býlingshúsið undir Brúnni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 22.06.2021 | 44/21 | 21/02232-6 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 181/21 | 21/02232-6 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 189/21 | 21/02232-6 |

**Upprunin til málið**
Borgari hevur heitt á Tórshavnar kommunu um at keypa ognina matr. 1467e fyri at gera parkeringsøki her. Hetta kann loysa møguligan parkeringstørv í sambandi við virksemið í Býlingshúsinum undir Brúnni

**Lýsing av málinum**
Borgari hevur heitt á Tórshavnar kommunu um at keypa ognina matr. 1467e, tá henda var sett til sølu soleiðis, at parkeringsøki kann gerast á ognini. Borgarin vísir á, at slíkt parkeringsøki kann loysa parkeringstørv, sum er sambært honum í sambandi við virksemið í Býlingshúsinum undir Brúnni.

Borgarin sendir borgarstjóranum og umsitingini eina áheitan um at gera hetta keypið við undirskriftum frá borgarunum í grannalagnum. Víst verður eisini á, at leiðarin av Býlingshúsinum fleiri ferðir hevur heitt á kommununa um at bøta um parkeringsviðurskiftini og at kommunan hevur í sambandi við Býlingshúsið á Ternuryggi keypt ognina matr. 1470dm fyri at gera parkeringspláss.

Tekniska fyrisitingin hevur í fleiri umførum kannað og viðgjørt viðurskifti í sambandi við ognina 1467e, um møguleikar at byggja á ognini. Her hevur seinasta niðurstøðan verið, at av tí at ognin liggur í grundumráði A3, so hevur eigarin av ognini til eina og hvørja tíð sambært BK17 rætt til at byggja sethús ella íbúðir á ognini, um hann annars er innanfyri tær í byggisamtyktini ásettu treytir fyri byggingina.

Viðvíkjandi parkeringstørvinum á økinum hjá Býlingshúsinum undir Brúnni, so eru tað einans 6 parkeringspláss, sum kunnu sigast at vera tilknýtt stovninum. Hetta stendur ikki mát við tey 20 starvsfólkini og 58 børnini, sum eru knýtt at stovninum. Tá parkeringsplássini ikki eru gjørd og skipað í sambandi við byggingina av stovninum, ber ikki til at siga út frá táverandi útgangsstøði, hvussu nógvir parkeringsbásar áttu at verið tilknýttir. Sambært BK17 skal ein básur verða fyri hvørjar 50 m² húsavídd. Hetta gevur uml. 10 kravd pláss Tó kann síggjast, at líknandi stovnar í Tórshavn hava uml. 15 básar tilknýttar.

Tekniska deild metir, at grundleggjandi spurningurin í hesum máli er, hvussu nøktandi tal av parkeringsbásum fæst til vega til stovnin á lagaligasta hátt.

Tí er innleiðandi kanning gjørd, at staðfesta hvørjir møguleikar eru fyri at fáa til vega 4 til 9 parkeringsbásar, afturat teimum verandi 6.

Her verður víst á tríggjar møguleikar:

1. Keyp av ognini matr. 1467e og gerð av parkeringsøkjum á matriklinum.
2. Breiðkan av Smærugøtu frá gøtuni millum Smærugøtu og Børkugøtu og inn til verandi parkeringsøki við Býlingshúsið.
3. Víðkan av verandi parkeringsøki vestureftir inn á økið hjá Býlingshúsinum.

Hesar loysnir eru lýstar við fyrimunum og vansum niðanfyri:

Ad 1:

- Lýsing
  - Á hesum økinum kunnu fáast upp til 15 parkeringsbásar, sum eru skipaðir burtur frá ferðsluni annars.
  - Samlaður kostnaður er mettur til 2800 - 3000 tkr. Kostnaður pr. parkeringspláss er mettur til 186 - 200 tkr., um 15 básar verða gjørdir og 260 – 280 tkr., um einans 10 básar verða gjørdir
- Vansar:
  - Keyp av lendi er kostnaðartungt.
  - Byggilendi verður inndrigið til parkeringsøki.
- Fyrimunir:
  - Flest parkeringspláss kunnu røkkast av teimum trimum møguleikunum.
  - Lendið er lætt at arbeiða við.
  - Grannaognin varðveitir útsýnið

Ad 2:

- Lýsing
  - Á hesum økinum kunnu fáast upp til 8 parkeringsbásar, sum eru skipaðir fram við vegnum.
  - Samlaður kostnaður er mettur til 860 – 1050 tkr. Kostnaður pr. parkeringspláss er mettur til 107 – 128 tkr.
- Vansar:
  - Stuðlamúrur skal gerast
  - Lendið er trupult at arbeiða við.
  - Fæst parkeringspláss kunnu røkkast av teim trimum møguleikunum.
- Fyrimunir:
  - Einki lendi skal keypast.
  - Lutfalsliga lágur kostnaður pr. parkeringspláss.
  - Matr. 1467e verður varðveittur sum byggilendi

Ad 3:

- Lýsing
  - Á hesum økinum kunnu fáast upp til 12 parkeringsbásar, sum eru á økinum hjá Býlingshúsinum, vestur úr verandi parkeringsøki.
  - Samlaður kostnaður er mettur til 2000 – 3010 tkr. Kostnaður pr. parkeringspláss er mettur til 166 – 258 tkr.
- Vansar:
  - Stuðlamúrur skal gerast
  - Lendið er trupult at arbeiða við. Nógv spreinging og fylla.
  - Økið hjá Býlingshúsinum á uml. 400 m² verður umgjørt frá grønum øki til parkering.
  - Lutfalsliga høgur kostnaður pr. parkeringspláss.
  - Stór óvissa um kostnaðin
- Fyrimunir:
  - Einki lendi skal keypast.
  - Lutfalsliga nógv parkeringspláss kunnu røkkast.
  - Matr. 1467e verður varðveittur sum byggilendi

Av tí at talan er um leysar metingar av kostnaðinum av hesum trimum møguleikum metir umsitingin, at tekniska nevnd eigur at taka støðu til, hvørja loysn arbeiðast skal víðari við. Tó skal nevndin eisini, um avgerð verður tikin um at arbeiða víðari við loysn 1, taka støðu til, um ognin matrikul 1467e skal keypast.

Umsitingin hevur kannað hjá fyritøkuni Meklarin tann 10.6 um ognina matr. 1467e og fekk tá at vita, at ognin var seld. Tað er tí ein treyt fyri at henda loysn 1 skal lata seg gera, at ognin enn er til sølu fyri upplýsta kostnaðin

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/01446

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Kort Smærugøta – Loysn 1
Kort Smærugøta – Loysn 2
Kort Smærugøta – Loysn 3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla í fyrsta lagi til, at heimilað verður umsitingini at arbeiða víðari við innanhýsis projektering av loysn 2.

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla tá frá, at arbeitt verður víðari við loysn 1 og 3.

**Tekniska nevnd 22. juni 2021:** Samtykt at heimila umsitingini at fara undir at keypa matr.nr. 1467e og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen, samtykkir at keypa ognina og at játta kr. 2,2 mió. kr. av konto 6175 til keypið. Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur undir við tilmælinum um at arbeiða víðari við loysn 2.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, sum varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

# 190/21 Umsókn um yvirtøku av vegi, matr. nr. 1456, Sóljugøta, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.05.2019 | 28/19 | 19/00603-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 163/21 | 19/00603-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 190/21 | 19/00603-2 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn um yvirtøku av vegi

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Eigarin av matr. nr. 1456, Ása Justinussen o. fl. hava í umsókn heitt á kommununa um at yvirtaka Sóljugøtu, matr. 1456n við tilhoyrandi installatiónum. Sí viðhefta kort 01.

Vegurin sum er partur av eini privatari útstykkingarætlan er uttan feilir og manglar, sí viðheftu myndir.
Tó skal sigast, at ljóspelar ikki standa í mark soleiðis sum sundurbýtt er. Eisini skal viðmerkjast, at gongugøtan millum vegirnar báðar ikki er asfalterað, men er tó í góðum standi. Mett er, at ikki er neyðugt at asfaltera, men at gøtan kann liggja sum grúsgøta.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ongin viðmerking

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sí Málsfrágreiðing

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongin viðmerking

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongin viðmerking

**Umhvørvisárin**
Ongin viðmerking

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongin viðmerking

**Skjøl**
Kort 01
Myndir

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at boða umsøkjarunum frá, at Tórshavnar kommuna er sinnað at yvirtaka vegin á matr. nr. 1456n, treytað av at hetta verður uttan kostnað fyri kommununa og um neyðugt er at flyta ljóspelar við innkoyringar og annað, skal eigarin sjálvur gera hetta arbeiði og bera allan kostnaðin av hesum.

**Tekniska nevnd 07. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 191/21 Støðutakan um leingjan av sáttmálanum við Sp/f Gundurs Bussar um framhaldandi koyring av bussleiðini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 14.03.2017 | 21/17 | 17/00267-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.03.2017 | 66/17 | 17/00267-2 |
| 3 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 104/17 | 17/00267-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 05.06.2018 | 39/18 | 17/00267-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 185/18 | 17/00267-2 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 159/18 | 17/00267-2 |
| 7 Tekniska nevnd | 10.09.2019 | 49/19 | 17/00267-2 |
| 8 Tekniska nevnd | 05.11.2019 | 70/19 | 17/00267-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 311/19 | 17/00267-2 |
| 10 Tekniska nevnd | 26.11.2019 | 84/19 | 17/00267-2 |
| 11 Tekniska nevnd | 02.12.2019 | 86/19 | 17/00267-2 |
| 12 Fíggjarnevndin | 04.12.2019 | 342/19 | 17/00267-2 |
| 13 Býráðsfundur | 12.12.2019 | 304/19 | 17/00267-2 |
| 14 Tekniska nevnd | 22.06.2021 | 39/21 | 17/00267-2 |
| 15 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 179/21 | 17/00267-2 |
| 16 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 191/21 | 17/00267-2 |

**Málslýsing:**
Tórshavnar kommuna hevur sáttmála við Sp/f Gundur´s bussar um rakstur av bussleiðini í Tórshavnar kommunu, tíðarskeiðið er frá 1. apríl 2011 - 1. apríl 2018. Àseting er í sáttmálanum við Sp/f Gundur´s bussar um leingjan av sáttmálanum. Tórshavnar kommuna hevur møguleika í sáttmálaskeiðinum at leingja sáttmálanum í eitt ár í senn, upp til tvey ár.

Grein 3 í sáttmálanum ásetur, at Tórshavnar kommuna skal boða arbeiðstakaranum, sum er Sp/f Gundur´s bussar, frá, um sáttmálaskeiðið verður longt, í seinasta lagi eitt ár áðrenn sáttmálin gongur út ella við styttri freist, um partarnir semjast um tað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at leingja sáttmálan við Sp/f Gundur´s bussar í 1 ár. Ì hesum tiðarskeiðinum verður arbeitt við at fyrireika og gera nýtt útbjóðingartilfar til Bussleiðina. Eisini skal samráðast við Sp/f Gundur´s bussar um broytingar av sáttmálanum og serliga broytingar í farleiðunum.

**Tekniska nevnd 14. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. mars 2017:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við teknisku nevnd og leingja sáttmálan við Sp/f Gundur's Bussar í 1 ár. Í hesum tíðarskeiðinum verður arbeitt við at fyrireika og gera nýtt útbjóðingartilfar til Bussleiðina. Eisini skal samráðst við Sp/f Gundur's Bussar um broytingar av sáttmálanum og serliga broytingar í farleiðunum í longda tíðarskeiðinum.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Sáttmálin við Sp/f Gundur´s bussar loyvir, at hann verður framlongdur við einum ári í senn, upp til tvey ár. Núverandi sáttmáli gongur út 1. apríl 2019 og skal Sp/f Gundurs bussar í seinasta lagi hava svar áðrenn 1. juli 2018, um sáttmálin verður framlongdur við einum ári afturat.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at leingja sáttmálan við Sp/f Gundur´s bussar við 1 ári afturat, fram til 1. apríl 2020 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 05. juni 2018:** Samtykt at leingja sáttmálan við 6 mðr. afturat fram til 1. oktober 2019 ella, um tað ikki ber til, fram til 1. apríl 2020.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Núverandi sáttmáli við Sp/f Gundur´s bussar, sum er longdur í 1 ár, gongur út 1. apríl 2020.

Í sambandi við útbjóðing av Bussleiðini, er neyðugt at gera nýtt útbjóðingartilfar, umframt at kanna eftir, hvat fyri slag av bussum eru á marknaðinum til at brúka í komandi útbjóðing, um tað skal verða diesel, hybrid, biogass ella el-bussar.
Tað hendur ein sera stór broyting innan økið við el-bussum, battaríini gerast betri hvørt ár og fleiri og fleiri kommunur í norðanlondum leggja um til el-bussar.
Áðrenn støða verður tikin til, um el-bussar kunnu brúkast í Tórshavnar kommunu, eiga vit at kanna kostnaðin og royndarkoyra ein buss.

Hildið verður, at besta loysnin hevði verið at longt verandi sáttmála við Sp/f Gundursbussar í 1 ár afturat, fram til 1. apríl 2021. Hetta árið kundi kommunan gjørt eina avtalu við Sp/f Gundur´s bussar um at royndarkoyrt ein el-buss á ringleiðini. Hetta fyri at vita hvussu teir hóska til tað føroyska landslagið, brekkurnar og um el-bussur klára at koyra allan dagin uttan at skula løðast.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at umsitingin tekur upp samráðingar við Sp/f Gundur´s bussar, um at framleingja núverandi sáttmála í eitt 1 ár afturat, fram til 1. apríl 2021, og at biðja Sp/f Gundur´s bussar um eitt serskilt tilboð uppá at seta ein el-buss inn til at koyra ringleiðina í eitt á, frá 1. apríl 2020 til 1. apríl 2021.

**Tekniska nevnd 10. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt samráðingar við umboð fyri Sp/f Gundur´s bussar um framleingja av sáttmálanum og um møguleikan komandi ár at fáa ein el-buss at koyra á ringleiðini/leið 5. Játtandi svar er komið frá Sp/f Gundur´s bussum, sum vil framleingja núverandi sáttmála við Tórshavnar kommunu frá 1. apríl 2020 fram til 1. apríl 2021, við somu treytum, ferðaætlan og somu upphædd á kr. 28.238.652.

Sp/f Gundur´s bussar hava eisini kannað hvørjir el-bussar eru á marknaðinum. Ein bussur, sum passar og hóskar seg væl inn í býarmyndina er ein EBN-bussur, sum er av sama slag sum núverandi SOR býarbussarnir. Støddin er 9,5 m. Prísurin fyri at keypa ein tílíkan nýggjan el-buss er kr. 3.115.000. Fólk frá umsitingini eru í ferð við at kannað møguleikan at leiga ella leasa ein el-buss møguliga í eitt styttri tíðarskeið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at leingja sáttmálan við Sp/f Gundur´s bussar við 1 ári afturat, frá 1 apríl 2020 fram til 1. apríl 2021 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 05. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Í sambandi við leingjan av sáttmálanum við Sp/f Gundur´s bussar fram til 1. apríl 2021, eiga vit at umhugsa at leingja sáttmálan fram til 1. januar 2022. Hetta vil geva kommununi betri tíð til at planleggja eina nýggja útbjóðing, og tá koma vit at hava betri grundarlag til at taka støðu til um broytingar skulu gerst í verandi leiðum, umframt at taka støðu til um kommunan skal fara yvir til at nýta el-bussar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at umsitingin kannar um tað ber til at leingja sáttmálan við Sp/f Gundur´s bussar fram til 1. januar 2022, at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 26. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Fundur hevur verið við umboð fyri Sp/f Gundur´s bussar og teir eru sinnaðir at framleingja sáttmálan til 1. januar 2022 við somu treytum, ferðaætlan og somu upphædd pr. mðr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at leingja sáttmálan við Sp/f Gundur´s bussar fram til 1. januar 2022 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 02. desember 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 04. desember 2019:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. desember 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
7 ára sáttmálin við Sp/f Gundur´s bussar gekk út 1. apríl 2018. Býráðið hevur longt sáttmálan við tí møguleikanum, sum sáttmálin gevur, við einum ári ella upp í tvey ár og er tann tíð farin. Seinasta leingjan av sáttmálanum var frá 1. apríl 2020 til 1. januar 2022.

Sáttmálin við Sp/f Gundur´s bussar í grein 3 ásetur, at Tórshavnar kommuna skal boða arbeiðstakaranum, sum er Sp/f Gundur´s bussar, frá, um sáttmálaskeiðið verður longt, í seinasta lagi eitt ár áðrenn sáttmálin gongur út ella við styttri freist, um partarnir semjast um tað.

Ein politiskur meirilutin í farna býráðnum valdi ikki fara undir at gera útbjóðingartilfar og bjóða Bussleiðina út og harvið binda eitt nýtt komandi býráð til tær stóru fíggjarligu útreiðsluna, sum Bussleiðin er.

Fundur hevur verið við umboð fyri Sp/f Gundur´s bussar, og teir eru sinnaðir at leingja sáttmálan fram til 1. januar 2023, við somu treytum, ferðaætlan og somu upphædd pr. mðr. Eisini hevur Sp/f Gundur´s bussar framlagt váttan uppá at bussarnir eru í góðkendum standi og kunnu koyra eitt ár afturat.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at leingja sáttmálan við Sp/f Gundur´s bussar við einum ári afturat, frá 1. januar 2022 til 1. januar 2023 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við teknsiku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 192/21 Bussleiðin - undangóðkenning / prækvalifikation av bjóðarum til komandi útbjóðing og gerð av útboðstilfari til rakstur av komandi bussleið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 22.06.2021 | 40/21 | 21/02467-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 180/21 | 21/02467-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 192/21 | 21/02467-1 |

**Upprunin til málið**
Sáttmála skeiðið við Sp/f Gundur´s bussar er skjótt komið at enda, og skal øll koyringin hjá Bussleiðin bjóðast út av nýggjum.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við at Bussleiðin skal bjóðast út av nýggjum, kann kommunan rokna við, at tað eru nógv, sum eru áhugaði at bjóða uppá komandi útbjóðing. Í seinastu útbjóðingini vóru bjóðarar, sum ikki høvdu royndir innan busskoyring/kolletiva ferðslu og ikki fíggjarliga orku/kapital til at lyfta tað stóru uppgávuna, sum bussleiðin er. Tað er neyðugt við undangóðkenning/prækvalifikation av bjóðarunum, sum hevur til endamáls at fáa best egnaðu fyritøkur at bjóða uppá komandi bussleið. Eisini er tað ein fyrimunur við einari undangóðkenning, tá tað kann roknast við nógvum bjóðarum, fyri at fyribyrgja, at nógvir bjóðarar/fyritøkur brúka orku, tíð og pening at gera eitt tilboð, sum vísur seg ikki at lúka ásettu krøvini í útboðstilfarinum.

Útbjóðingartilfarið verður gjørt eftir sama leisti, sum til seinasta útbjóðið og tekur støðu í tí víðkaðu ferðaætlanini, sum bussleiðin hevur koyrt eftir síðani 2019. Ferðaætlanin varð gjørd við støði í frágreiðing, sum fyritøkan Cowi gjørdi fyri kommununa 2018/19. Ferðaætlanin varð tá víðkað við fleiri effektivum koyritímum. Koyrt var longri bæði leygardag og sunnudag og tá var eisini farið undir vikuskiftiskoyring til Kollafjarðar, Kaldbak, Velbastað og Kirkjubø.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin framleggur tíðarætlan fyri undangóðkenning/prækvalifikatión og útbjóðingini av Bussleiðini

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
J. nr. 17/00267 Støðutakan um leingjan av sáttmálanum við Sp/f Gundurs Bussar

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Bussleiðin_Undangóðkenning_2021

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐ Nei ☒**

Tá undangóðkenningin av bjóðarunum er komið uppá pláss verða bæði málini, undangóðkenning og útbjóðingartilfar borið aftur í teknisku nevnd til víðari støðutakan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at samtykkja at fara undir undangóðkenning av bjóðarum uppá Bussleiðina og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 193/21 Vegagerð á ídnaðarøkinum við Kemilux matr. nr. 1083r, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.06.2021 | 35/21 | 21/00676-7 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 158/21 | 21/00676-7 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 193/21 | 21/00676-7 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá teknistovuni MAG, um at víðka um bygningin hjá Kemilux, niðan í móti vegnum.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við omanfyri nevndu umsókn, hevur spurningurin stungið seg upp, um tað ikki er skilagott at dagføra verandi veg/vegir (tveir vegir lið um lið) soleiðis at bert ein vegur verður.

Í hesum sambandi hevur hevur kommunan umbiðið eitt uppskot og kostnaðarmeting frá sama ráðgevara um eina nýggja vegaloysn á nevnda staði.
Kostnaðarmetingin fyri verkætlanina er 4,1 mió. kr. u/mvg.

Kostnaðurin fyri at gera eitt prosjekt klárt til útboð er 300.000 kr. u/mvg., ella 320.000 v/mvg.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Uppskot til vegaloysn j.nr. 21/00676-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Talan er um at játta pening til projektering av omanfyri nevndu verkætlan, klárt til útbjóðing.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Dkk | Dkk 320.000 |
| Kostnaður í hesum árinum | Dkk | Dkk 320.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Dato | Dato august-des 21 |

| | Býráðsfundur<br>23. juni 2021 | Blað nr.: 776<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| Avleiðingar á rakstur | | Dkk |
|---|---|---|

**Játtan:**

| Upphædd íalt | Á | | | Av | | | Lokað verkætlan | Eykajáttan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Deild | Verkætlan | | Deild | Verkætlan | | | |
| Dkk | 8175 | nýggj | | 8175 | LK81042 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At tikið verður av tilboðnum uppá projektering av verkætlanini
- At játtaðar verða kr. 320.000 av konto 8175, Vegagerðir, LK81042, Vegaverkætlanir, á konto 8175, nýggj verkætlan “Vegagerð á ídnaðarøkinum við Kemilux”
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við tí ískoyti, at heimilað verður umsitingini at bjóða arbeiðið at gera verkætlanina út í innbodnari lisitatión. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 194/21 Nýggj serstøk byggisamtykt á Lambatrøðni, matr. nr. 157a, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 148/19 | 19/02587-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 213/19 | 19/02587-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 251/19 | 19/02587-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2019 | 183/19 | 19/02587-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 18/21 | 19/02587-1 |
| 6 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 58/21 | 19/02587-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2021 | 108/21 | 19/02587-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 194/21 | 19/02587-1 |

**Upprunin til málið:**
Umsøkjari hevur søkt um at byggja íbúðir á Lambatrøðni, matr. nr. 157a, Argir, og 7. juni 2019 samtykti byggi- og býarskipanarnevndin at taka undir við ætlanini, og at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið.

Matr. nr. 157a, Argir liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og sambært ásetingunum kunnu íbúðir loyvast, um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Talan er um 5 bygningar í 2 hæddum við tilsamans 30 íbúðum. 20 íbúðir verða 72 $m^2$, og 10 íbúðir verða 90 $m^2$ til víddar. Til íbúðirnar á veghædd hoyrir bilskýli til. Fríøkir á tilsamans uml. 490 $m^2$ umframt øki til reinsiverk verður inni á ognini. Eitt p-pláss verður til hvørja íbúð, umframt 14 felags p-pláss.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri A1 øki eru m.a.:
§5, stk. 1. *Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*

*Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.*

Stk. 9. *Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara upp um tey nýtslustig, ið eru í stk. 5, tá ið økið verður roknað sum heild.*

*Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.*

*Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Fyrispurningur um fund í sambandi við møguliga bygging av íbúðum á Lambatrøðni, matr. nr. 157a, Argir.* Mál nr. 18/04324.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska deild: Flyta verandi spillvatnsleiðingar. Hetta verður viðgjørt nærri í tekniska projektinum.
Byggideild: Eingin viðmerking

**Skjøl**
*Serstøk byggisamtykt á Lambatrøð*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at góðkenna uppskotið til nýggja serstaka byggisamtykt sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt á Lambatrøð,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Atkvøtt varð um uppskot frá Anniku Olsen um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndin, ið varð einmælt samtykt.

Gunnvør Balle metti seg verða ógegniga og fór av fundinum, Jógvan Arge tók hennara sæti.

Bergun Kass metti seg verða ógegniga og fór av fundinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, ynskir at varðveita dámin á økinum sum sethúsaøki og samtykti tí, ikki at ganga umsóknini á møti.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Ynskið hevur verið um at fáa málið á skrá aftur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til nýggja serstaka byggisamtykt sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt á Lambatrøð*, og beina málið i býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Kári Johansen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Ruth Vang og Jákup Dam, atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fýra blonkum atkvøðum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Annika Olsen og Ruth Vang.

Gunvør Balle luttók ikki í viðgerðini av málinum, tí hon metti seg vera ógegniga.

**Ískoyt:**
Síðani uppskotið til serstaka byggisamtykt varð samtykt í býráðnum, hava umsiting og býráð verið á fundi við grannarnar. Í sambandi við, at uppskotið til serstaka byggisamtykt hevur ligið til almenna hoyring, eru tvey hoyringsskriv/mótmæli innkomin – bæði frá grannum kring Lambatrøðna, sí skjøl *lambatrøðin hoyringsskriv grannar.docx* og *Mótmælið í samband við ætlaða bygging.docx*. Niðanfyri er ein samandráttur av hesum, bólkað í evni, umframt viðmerkingar frá umsitingini:

1. Nøgd av íbúðum og dámur av økinum
   - Ov nógvar íbúðir á einum lítlum øki mitt í sethúsaøki. Hetta oyðileggur bygdadámin í hesum gamla partinum av Argjum og minkar um trivnaðin hjá grannunum.
   - Íbúðarblokkar, sum als ikki hóska inn í kringliggjandi bygging og heldur ikki tann mongdin av fólkum og bilum, talan er um.
   - Bygging ov tætt upp at húsunum í Kráargøtu, sum frammanundan eru kroyst í bæði borð við smølum vegi og húsum, sum eru bygd í mark.
   - Byggingin kemur ov tætt at grannum og ávirkar dagsljósið inni hjá teimum.
   - Við ætlaðu bygging er hædd ikki tikin fyri vindviðurskiftunum á staðnum, og vilja blokkarnir virka sum vindkanalir hjá hørðu vesturættini, sum fer oman gjøgnum dalin.
   - Um bygt verður á økinum, er áheitanin at minka um verkætlanina niður í t.d. 20 íbúðir, sum standa longri inni á trøðni.

2. Økið sum fríøki
   - Varðveita økið sum fríøki. Kommunan kann makaskifta við eigaran av Lambatrøðni, t.d. við ovaru stykkir á Argjum (undir Hamrinum), sum kommunan ætlar at seta av til fríøkir. Tað økið er størri og hóskar seg betri til húsabygging.
   - Lambatrøðin hevur altíð ligið sum fríøki. Eitt grønt øki mitt í bygdini, lætt atkomuligt niðri á Argjum.
   - Lambatrøðin natúrligt miðpunkt á Argjum – saman við skúlaøkinum og Sjósavninum. Hetta økið eigur at gerast grønt við vøkstri, spæliøki o.ø., har til ber at savnast til jólatræ og onnur høvi. Mælt verður til, at skipa verður fyri arkitektakapping hesum viðvíkjandi.
   - Áin, sum rennur oman gjøgnum trøðna, er ein av fáu opnu áunum á Argjum. Tá tosað verður um nostalgiina og trivnaðin í miðbýnum við at opna Havnará, er tað óskiljandi, at man ynskir at gera tað mótsetta á Argjum.
   - Lambatrøðin, ella partur av henni, er søguligur staður. Markið millum har tey við spidalsku sjúku kundu koma og har onnur hildu seg burtur. Laðaði grótgarðurin er aldargamal og stendur sum ein varði, har markamótið millum frælsi og fordømi av fleiri av okkara landsmonnum enn er at síggja.

3. Vegur og ferðsla
   - Vegur við uml. 60 bilum so tætt upp at grannum vil ávirka heimafriðin og trivnaðin hjá grannunum.

- Ov nógvar útkoyringar til Argjavegin, sum frammanundan hevur sera nógvar útkoyringar. Víst verður á, at eldri ætlanir um bygging á Lambatrøðni ikki hava borið til, m.a. tí tey ikki hava fingið loyvi at gera veg út á Argjavegin.

4. Annað
   - Áin í tí hædd hon liggur í, flýtur yvir, tá áarføri er. Tað ber ikki til at byggja í somu hædd, sum hon liggur nú. Skal so spreingjast og hvussu vil hetta ávirka húsini rundanum?

Ad. 1. Tórshavnar býráð samtykti í 2018 ein bústaðarpolitikk fyri kommununa. Endamálið var at áseta og tryggja, at bústaðarmøguleikarnir í kommununi eru nøktandi, og at karmar verða gjørdir fyri, at menningin verður framtíðartryggja. Av átøkum, sum neyðug eru fyri at røkka málunum í bústaðrpolitikkinum, eru m.a. at byggja fleiri íbúðir, tryggja fjølbroytt bústaðarsløg og býlingar, umframt at býartætta í verandi býi, soleiðis at vit tryggja burðardygga nýtslu av lendi, leiðingum, undirstøðukervi o.s.fr.

Hetta merkir tó ikki, at ynskið er at byggja íbúðir á øllum tøkum byggiøkjum í kommununi, men at ein meting skal gerast fyri hvørt ítøkiliga økið. Í hesum føri varð tað mett verða ráðiligt, m.a. tí at talan var um øki av eini rímiligar stødd og skapi, og at bygningarnir, sum søktir eru um, í skapi, rúmd og hædd, vóru mettir at hóska inn í økið.

Í mun til byggistig, nýtslustig, hædd og frástøðu til mark, heldur ætlaða byggingin seg til ásetingarnar fyri A1 øki. Mett verður ikki, at skapið og støddin á ætlaðu byggingini virka til, at ógvusligari vindkanalir verða, enn í vanligum sethúsaøkjum.

Ad. 2. Tá øki liggja grøn og óbygd millum eldri grannaløg í longri tíð, er tað eyðsæð, at hesi geva eitt ávíst virði til økið og at grannarnir fáa eitt tilknýti til hetta. Í hesum føri er tó talan um eitt privat byggiøki, ið eigarin hevur ein rætt at byggja á.

Mett verður ikki, at tað er rímiligt at taka eitt møguligt fríøki frá einum øki, fyri at geva einum øðrum øki eitt fríøki.

Ad. 3. Talan verður um 30 íbúðir, og á økinum eru 44 p-pláss, so talan verður allarhelst ikki um 60 bilar.

Tekniska deild hjá kommununi hevur mett, at ráðiligt er við hesi íbinding í Argjavegin.

Umsitingin hevur kannað arkivini hjá Tórshavnar kommunu, og hevur funnið nakrar gamlar viðmerkingar og fyrispurningar um útstykking á matr. nr. 157a. Í tveimum av málunum verður givin tilsøgn til, at bindast kann í Argjavegin – tað nýggjasta er frá 2015, meðan ein viðmerking frá máli í 2008 er um, at vegurin eigur at bindast í Kráargøtu.

Ad. 4. Hesi viðurskiftini verða viðgjørd í einum tekniskum projekti.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast í uppskotinum til serstaka byggisamtykt fyri Lambatrøð, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2021:** Samtykt ikki at taka undir við tilmælinum, men at halda seg til almennu byggisamtyktina.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 195/21 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri neyst, matr. nr. 208, Kollafjørður

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.03.2021 | 44/21 | 20/04637-1 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 24.03.2021 | 3/21 | 20/04637-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 101/21 | 20/04637-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2021 | 109/21 | 20/04637-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 195/21 | 20/04637-1 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr. nr. 208, Kollafjørður, hevur søkt um loyvi at stykkja út til neystagrundir. Økið liggur í E øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er lagt til smábáta-, frítíðar- og ítróttarvirksemi, og skal bygging og skipan av økinum gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Matr. nr. 208, Kollafjørður, er partur av einum uml. 2800 $m^2$ stórum neystaøki í Kollafirði, sum matr. nr. 211c, 211a og 209b, somuleiðis eru partar av. Uppskotið til serstaka byggisamtykt fevnir um allar 2800 $m^2$.

Uppskotið til serstaka byggisamtykt loyvir frítíðarbústaði á ovaru hæddini, men umstøður skulu vera at hava bát á niðastu hædd, og annars eru ásetingarnar tær somu, sum fyri onnur neystaøki í kommununi, sí skjal *SB_Kollafjørður_Neyst_2020_8.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur sum E øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og ásetingarnar fyri økið eru:

§24, stk. 1. Umráðisparturin verður lagdur til smábáta-, frítíðar- og ítróttavirksemi, ið hevur við sjógvin at gera, t.e. bátahyl, neystabygging, útipláss til smábátar, kappróðrarfeløg o.t. og virksemi, sum hevur samband við hesi, t.e. tænastuvirksemi, bilstøðlar o.t.

Stk. 2. Skipan og bygging á økinum skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Av tí at økið liggur fram við sjóvarmálan, skal serstaka byggisamtyktin góðkennast av Yvirfriðingarnevndini.

**Skjøl**
- *SB_Kollafjørður_Neyst_2020_8,* journal nr. 20/04637-9.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | Býráðsfundur<br>23. juni 2021 | Blað nr.: 782<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri neyst í Kollafirði, smb. skjalinum *SB_Kollafjørður_Neyst_2020_8,* treytað av loyvi frá Yvirfriðingarnevndini, og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kollafjarðarnevndin 24. mars 2021:** Staðbundna nevndin mælir til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Síðani uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri neyst í Kollafirði varð samtykt, hava eigararnir heitt á kommununa um at broyta hæddarásetingarnar og ásetingar viðv. takhalli, av tí at tað við verandi ásetingum er trupult at fáa loftshædd, ið ber til at nýta.

Fyri at loftshæddin kann gerast nýtilig sum frítíðarbústaður, hevur umsitingin gjørt uppskot til at broyta ásetingarnar soleiðis:

Verandi áseting: §4, stk. 3. Mest loyvda hædd er 5,5 m til mønuna, mált frá planeringshædd.

Verður broytt til: §4, stk. 3. Neystini skulu ikki vera hægri enn 4,5 m til hægsta punkt við útvegg og 6,5 m til mønuna, mált frá planeringshædd.

Verandi áseting: §4, stk.4. Neystini skulu hava mønu, og skal hon vera í miðjuni. Takhallið skal vera 41,5 gradir.

Verður broytt til: §4, stk. 4. Neystini skulu hava mønu, og skal hon verða í miðjuni. Takhallið skal vera millum 35-42 gradir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta ásetingarnar viðvíkjandi hædd og takhalli sum lýst omanfyri, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2021:** Samtykt at loyva mønuni at fara upp á 7 metur og útvegg 5 metur og annars at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt

# 196/21 Nýggj serstøk byggisamtykt Millum Horna, matr. nr. 1121a, 1121g, 1121h, 1121i og 1121k, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2021 | 110/21 | 21/01736-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 196/21 | 21/01736-1 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr. nr. 1121a, 1121g,1121h, 1121i og 1121k, Millum Horna, hevur søkt um loyvi at byggja íbúðir á ognunum. Matr. nr. 1121a liggur í A2 øki í almennu byggisamtyktini, ætlað høgari íbúðarbygging og hinir matriklarnir liggja í A1 øki í almennu byggisamtyktini, ætlað sethúsabygging, sí skjal *Almenn byggisamtykt Millum Horna*. Við serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verður íbúðarbygging loyvd í A1 øki.

Í umsóknini verður skrivað, at verkætlanin fevnir um uml. 90 íbúðir, P-básar, takt P-øki, goymsluskúrar, atkomugeirar, svalagongdir, lyft/trappubygning, gøtur, felags- og spæliøki, øki til plantur/vøkstur o.a.

**Lýsing av málinum**
Íbúðarverkætlanin, sum søkt verður um, er býtt í tveir partar – norðara part, sum liggur í A2 øki og sunnara part, sum liggur í A1 øki. Á A2 økinum er ætlanin at byggja bygning í 5 hæddum, við íbúðum á fýra teimum ovastu hæddunum og parkering/goymslu á niðastu hædd. Nýtsla, hædd, byggi- og nýtslustig, er í trá við ásetingarnar fyri A2 øki í almennu byggisamtyktini. Somuleiðis eru parkeringsviðurskiftini og fríøkini í trá við ásetingarnar í almennu byggisamtyktini. Økið framman fyri íbúðarbygning er fyrst og fremst parkeringsøki, ið er felags fyri alt verkætlanarøkið. Harumframt er eitt felags útiøki aftan fyri bygningin.

Á A1 økinum er ætlanin at byggja bygningar í tveimum hæddum, sum í støðd eru at meta sum sethús/tvíhús. Ætlanin er at byggja 7 tílíkar bygningar við 4 íbúðum í hvørjum bygningi. Mitt í A1 økinum er stórt fríøki, umframt parkering og goymslurúm.

Íbúðarbyggingin, sum er ætlað í A2 økinum, krevur í sær sjálvum ikki eina serstaka byggisamtykt, men talan er um eina samlaða ætlan, ið avhongur av hvørjum øðrum, av tí at byggingin í A1 økinum skal nýta p-plássini í A2 økinum og íbúgvarnir í A2 økinum skulu hava atgongd til fríøkið í A1 økinum. Tí er neyðugt við einari serstakari byggisamtykt, ið er galdandi fyri bæði økini.

Økið Millum Horna, er eitt øki við blandaðari sethúsa- og íbúðarbygging. Eystanfyri eru høgu íbúðarbygningarnir við Heimasta Horn, umframt at fleiri útstykkingar til íbúðir og sethús eru ætlaðar í økinum. Ætlaða byggingin í A2 liggur lendisliga á linju við íbúðarbyggingina á Heimasta Horni og gerst soleiðis partur av geiranum av høgari íbúðarbygging, ið verður loyvd fram við bratta lendinum norðanfyri. Í A1 økinum, sum annars er ætlað sethúsum, verður í hesum føri mett vera ráðiligt at loyva íbúðum, m.a. av tí at byggingin í støðd og skapi minnir um sethúsabygging, og av tí at onnur íbúðarbygging er ætlað í A1 økinum eystanfyri.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Ásetingar fyri A2 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál. Í samband við bygging skal tó bera til at gera rúm til felags nýtslu sum t.d. stovnar, vaskirúm o.a. fyri tey, ið búgva har.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska deild metir, at yvirskipaða ætlanin er ráðilig hvat viðvíkur ferðslu og leiðingum. Hetta skal tó kannast nærri, tá ætlanin er komin longri, og farið verður undir at geva loyvir.

Tórshavnar kommuna er í holt við at yvirtaka Velbastaðvegin út til Norðasta Horn, og tískil skal Landsverk ikki geva loyvi til íbindingina.

**Skjøl**
- *Almenn byggisamtykt Millum Horna,* journal nr. 21/01736-4.
- *Serstøk byggisamtykt Millum Horna,* journal nr. 21/01736-4.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt Millum Horna, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri treyt, at endaligar tekningar av útsjóndini fyriliggja til býráðsfundin.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini við tí broytingaruppskoti frá Trónda Sigurðsson, at sett verður í serstøku byggisamtyktina, at byggjast kunnu 90 íbúðir í økinum.

Einmælt samtykt.

# 197/21 Umsókn um at broyta matr. nr. 1351, Villingardalsvegur, Tórshavn til eitt A1 økið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2021 | 106/21 | 21/01920-3 |
| 2 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 197/21 | 21/01920-3 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr. nr. 1351, Tórshavn, hevur søkt um at broyta almennu byggisamtyktina fyri matrikulin, soleiðis at allur matrikulin liggur í A1 øki, í sambandi við ætlanir um at stykkja trøðna út til sethús.

**Lýsing av málinum**
Matr. nr. 1351 liggur lutvíst í A1 øki, ætlað sethúsabygging, A3 øki, ætlað blandaðari bústaða- og miðstaðabygging og 4. grundumráði, sum er ætlað landbúnaði, sí kortskjal *Áðrenn broyting*.

Í sambandi við at eigarin ynskir at stykkja út til sethús, verður mælt til, at alt økið verður broytt til A1 øki. Soleiðis verður ruddað upp í byggisamtyktini í økinum, tað gerst greiðari at umsita og gjørligt verður hjá eigaranum at fáa loyvi til ætlaðu útstykkingina.

Í sambandi við at broytingar verða gjørdar í byggisamtyktini fram við Villingadalsvegnum, verður mælt til, at man samstundis broytir byggisamtyktarlinjuna, soleiðis at hon fylgir matrikulmarkinum, fyri matriklarnar 1350a, 1349a, 1348a og 1175a, sambært kortskjalinum *Eftir broyting.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.
- Útstykking verður einans loyvd, um hon hóskar við eina útstykkingarætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt náttúrligt avmarkað øki, og tá ið byggibúningin annars er tryggjað sambært vanligu útstykkingartreytum kommununnar.

Ásetingar fyri A3 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstøvur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.
- Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

Ásetingar fyri 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- 4. grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Av tí at økið liggur upp at økinum, ið ætlaði innkomuvegurin fer at liggja, verður uppskotið til broyting send Landsverk til hoyringar.

**Skjøl**

- *Áðrenn broyting,* journal nr. 21/01920-4.
- *Eftir broyting,* journal nr. 21/01920-4.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til broyting av almennu byggisamtyktini, treytað av loyvi frá Landsverk, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 198/21 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 1083a, 1083ae og 1087b, Tórshavn. Frá 4. grundumráði til B3 øki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 134/21 | 21/02314-2 |
| 2 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 198/21 | 21/02314-2 |

**Upprunin til málið**
Ætlanir eru um at leggja partar av matr. nr. 1083a, 1083ae og 1087b, Tórshavn, saman við matr. nr. 1083ad, 1083p og 1083q, Tórshavn. Matr. nr. 1083a, 1083ae og 1087b, Tórshavn liggja í 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og um hesir skulu leggjast saman við matriklum, sum liggja í byggiøki, mugu teir somuleiðis broytast til at liggja í byggiøki.

**Lýsing av málinum**
Matr. nr. 1083ad, 1083p og 1083q liggja í B3 vinnuøki, og eru partur av vinnuøkinum í Vika. Um hesir skulu leggjast saman við matr. nr. 1083a, 1083aw g 1087b, mugu hesir somuleiðis broytast til at liggja í B3 øki smb. kortskjali *Eftir broyting*. Hetta er harumframt við til at geva vinnuøkinum eitt greiðari skap og mark út móti 4. Grundumráði.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri B3 vinnuøki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Loyvi er einans at byggja hús til smá vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi. Tó er loyvt á hvørjum grundstykki at gera bústað til eigara ella fyristøðufólk virkisins.

Ásetingar fyri 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- 4. Grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Áðrenn broyting j.nr. 21/02314-3
Eftir broyting j.nr. 21/02314-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta almennu byggisamtyktina sambært skjalinum *Eftir broyting*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

## 199/21 Broyting av byggisamtyktini fyri Nólsoy, matr. nr. 159e. Frá D øki til A øki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Nólsoyarnevndin | 21.06.2021 | 7/21 | 21/02438-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 133/21 | 21/02438-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 199/21 | 21/02438-1 |

**Upprunin til málið**
Á býráðsfundi 27. mai 2021 varð samtykt, at farast skuldi í holt við at gera restina av kommunalu útstykkingini í Nólsoy lidna, soleiðis at tað verða 17 grundstykkir.

**Lýsing av málinum**
Eitt av teimum 17 grundstykkjunum liggur skeivt byggisamtyktarliga. Hetta liggur í D øki til almennar stovnar og mentan, men um sethús skulu byggjast á tí, skal tað broytast til A sethúsaøki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A-sethúsaøki í byggisamtyktini fyri Nólsoy eru m.a.:

- Loyvt er einans at byggja sethús við upp til 2 íbúðum og – eftir serloyvi frá bygdarráðnum – tvíhús, rað- og ketuhús o.t. til húski. Í sambandi við bústaðirnar skal tó bera til at innrætta høli til handlar, onnur vinnuendamál og stovnar, treytað av, at hesi virki ikki eru til ampa ella lýta dámin á økinum, sum sethúsabýlingi.

Ásetingar fyri D øki til almennar stovnar og mentan eru m.a.:

- Økið verður lagt av til almennar stovnar, undirvísing, mentanarlig endamál, átrúnaðarlig, heilsulig endamál o.t.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Liðuggerð av útstykking í Nólsoy,* journal nr. 21/01688.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Viðmerkingar eru komnar frá nólsoyarnevndini, j. nr. 21/02438-3 og 4.

**Skjøl**

- *Áðrenn broyting,* journal nr. 21/02438-2.
- *Eftir broyting,* journal nr. 21/02438-2.
- *Útstykking,* journal nr. 21/02438-2.
- *Viðm. frá nólsoyarnevndini 21/02438-3 og 4*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til broyting av byggisamtyktini fyri Nólsoy sambært skjalinum *Eftir broyting*, og beina málið í býráðið umvegis nólsoyarnevndina.

**Nólsoyarnevndin 21. juni 2021:** Staðbundna nevndin tekur undir við tilmælinum um tað ikki darvar almennari bygging so sum ellis- og røktarheim.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

# 200/21 Broyting av byggisamtykt fyri Velbastað, matr. nr. 51a, í sambandi við sethúsaútstykking

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 135/21 | 21/01258-2 |
| 2 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 200/21 | 21/01258-2 |

**Upprunin til málið**
Ynski er um nýggja sethúsaútstykking á Velbastað, og í tí sambandi er skitsa til útstykking á 11 grundstykkir oman fyri Ervaveg gjørd, sí skjal *Útstykking - skitsa*.

**Lýsing av málinum**
Enn er talan bert um skitsu av útstykkingini, men fyri at fáa málið í gongd, verður uppskot gjørt til at broyta byggisamtyktina fyri økið. Økið liggur í K-Landbúnaðarøki. Um sethús skulu byggjast á økinum, má økið broytast til B-sethúsaøki, sí skjal *Eftir broyting*.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri B-sethúsaøki í byggisamtyktini fyri Kirkjubø/Velbastað eru m.a.:

- Loyvt er einans at byggja sethús við upp til 2 íbúðum og – eftir serloyvi frá byggivaldinum – tvíhús, rað- og ketuhús o.t. til eitt húski. Í sambandi við bústaðirnar skal tó bera til at innrætta høli til handlar, onnur vinnuendamál og stovnar, treytað av at hesi virki ikki eru til ampa ella lýta dámin á økinum sum sethúsabýlingi.

Ásetingar fyri K-landbúnaðarøki í byggisamtyktini fyri Kirkjubø/Velbastað eru m.a.:

- Loyvt er bert at byggja hús, ið eru neyðug til tess at tryggja fullgóðan rakstur av virkjum við teim endamálum, sum nevnd eru í stk. 1. Tó er loyvt at gera slík teknisk virki og hús, ið neyðug eru til ravmagns- og vatnveitingar, til burturveiting av skarnvatni og til telefon- og telefgrafsamband og í sambandi við vegahald.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Talan er um festijørð, sum liggur uttanfyri planlagt byggilendi, og tískil skal málið til hoyringar hjá Búnaðarstovuni og hjá friðingarmyndugleikanum.

Viðmerking er komin frá kirkjubø- og velbastaðarnevndini j.nr. 21/01258-4 og 5.

**Skjøl**

- *Útstykking – skitsa,* journal nr. 21/01258-3.
- *Eftir broyting,* journal nr. 21/01258-3.
- Viðmerking frá kirkjubø- og velbastaðarnevndini j.nr. 21/01258-4 og 5

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>23. juni 2021 | Blað nr.: 792 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina sambært skjalinum *Eftir broyting*, treytað av loyvi frá avvarðandi myndugleikum, og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi—og býarskipanarnevndini við tí broytingaruppskoti frá Trónda Sigurðsson, at byggisamtyktin verður broytt sambært skjalinum «skitsa», sum liggur í málinum.

Einmælt samtykt.

Annfinn Brekkstein boðaði frá, at hann er ógegnigur og luttók ikki í viðgerðini av málinum.

# 201/21 Umsókn um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri matr. nr. 410a, 411d, 413a, 413b, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 136/21 | 21/02554-2 |
| 2 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 201/21 | 21/02554-2 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr. nr. 410a, 411d, 413a og 413b hevur søkt um at fáa gjørt serstaka byggisamtykt fyri økið, soleiðis at parkeringshús, við íbúðum ovast, kann loyvast, sí skjal *Parkering og íbúðarbygningur*. Í innsenda uppskotinum er pláss fyri 150 p-plássum, umframt 8 íbúðum á ovastu hædd.
Matr. nr. 410a, 411d, 413a og 413b liggja í miðbýnum í Tórshavn. Økið liggur millum Bøkjarabrekku sunnanfyri og Kongagøtu norðanfyri. Eystanfyri er Tinghúsvegurin og vestanfyri er Niels Finsens gøta.

**Lýsing av málinum**
Ferðslan í miðbýnum hevur í nógv ár verið merkt av manglandi parkeringsplássum, og fleiri ymiskir møguleikar hava seinastu árini verið umrøddir, fyri at loysa hendan trupulleikan. Ein teirra er parkeringshús á matr. nr. 410a, men eru hesar ætlanir ongantíð komnar á mál. Nú hevur eigarin gjørt eitt uppskot, sum tykist kunna loysa ein part av parkeringsavbjóðingunum í miðbýnum. Talan er um eitt parkeringshús í 3 hæddum (6 forskotnar hæddir), parkeringskjallara og 8 íbúðum á ovastu hædd. Innkoyring til bygningin er frá Kongagøtu, við inn- og útkoyring skipað á hvør sínum vegbana.

Økið liggur í 1. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu – økið til blandaða bústaða- og miðastaðabygging.
Byggingin, ið søkt verður um, hevur eitt byggistig á 0,825, nýtslustig á 3,759 og hæddin frá lendinum er 13 m (ovasta hædd er trekt inn frá framsíðuni). Økið liggur í 1. Grundumráði og ásetingarnar fyri økið eru m.a., at mest loyvda byggistig er 0,6, mest loyvda nýtslustig er 1,3 og mest loyvda hædd er 11 m til hægsta punkt við útvegg og 13 m til mønuna. Í serstakari byggisamtykt er tó møguligt at víkja frá ásetingum viðvíkjandi hædd, byggi- og nýtslustigi. Tó má nýtslustigið fyri hetta økið sum heild ikki fara upp um 3,0.

Almenna byggisamtyktin er í stóran mun menta á bústaðar- og vinnubygging, og í minni mun á eitt nú parkeringshús, og hetta sæst aftur nú søkt verður um loyvi at byggja eitt parkerinshús í miðbýnum. Um byggingin, sum søkt verður um, skal vera møgulig, er soleiðis neyðugt at gera serstaka byggisamtykt fyri økið. Í hesum føri er talan um eitt parkeringshús, sum stórur tørvur er á í býnum og sum hevur eina aðra ávirkan á býin, enn onnur bygging. T.d. hevur bygningurin ikki tørv á fríøki rundan um, og ein tílíkur bygningur setur ikki stórvegis krøv til tekniskar leiðingar. Tí verður mett, at tað í hesum føri er ráðiligt at gera serstaka byggisamtykt, ið loyvir bygging, ið er størri enn loyvt verður í almennu byggisamtyktini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri 1. grundumráði eru m.a.:

- 1. grundumráði verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Miðstaðabyggingin má einans vera hús, sum heilt ella lutvís verða innrættað til handlar, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhølir og tílíkt.
- Byggistigið má ikki fara upp um 0,6.
- Nýtslustigið má ikki fara upp um 1,3
- Hús mugu ikki verða bygd hægri enn 11 m til hægsta punkt við útvegg og 13 m til mønuna. Kjallarin verður roknaður sum húsahædd.
- Kortini er gjørligt at víkja frá ásetingunum í stk. 2, 3, 4 og 5 í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, nattúrliga avmarkað øki. Tó má nýtslustigið fyri hetta økið sum heild ikki fara upp um 3,0.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Parkeringviðurskiftini í miðbýnum hava leingi verið ein avbjóðing, m.a. orsakað av øktari bilferðslu og trupulleikum at útvega neyðug parkeringsøki til tað, ið verður bygt. Fyri at royna at bøta uppá hesi viðurskifti, verður mælt til at broyta ásetingarnar fyri 1. og 2. Grundumráði, soleiðis at byggi- og nýtslustig fyri parkeringshús verður hækkað.
Hetta er somuleiðis ein fortreyt fyri, at serstaka byggisamtyktin fyri parkeringshúsið, sum verður viðgjørt í hesum málinum, kann gerast.

Byggingin, ið søkt verður um, er treytað av at avtala fæst við eigararnar av matr. nr. 411f, 411a og 414a, av tí at byggingin fer inn á teirra ognir/liggur heilt upp at markinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska fyrisiting ger uppskotið til serstøku byggisamtyktina.

**Skjøl**
*Parkering og íbúðarbygningur,* journal nr. 21/02554-1.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At serstøk byggisamtykt, sum loyvir bygging av parkeringshúsi smb. skjalinum *parkering og íbúðarbygningur* verður gjørd, treytað av at avtala verður gjørd við eigararnar av matr. nr. 411f, 411a og 414a.
- Um eingin avtala fæst við eigararnar av matr. nr. 411f, 411a og 414a, at umsitingin tillagar uppskotið, soleiðis at parkeringshúsið rúmast á ognum umsøkjarans.
- At arbeiðið at broyta almennu byggisamtyktina, soleiðis at eitt hægri byggi- og nýtslustig verður loyvt fyri parkaringshús í 1. og 2. grundumráði, verður byrjað.
- At beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongai ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

## 202/21 Framflytingar fyri roknskaparárið 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 130/21 | 21/01845-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2021 | 135/21 | 21/01845-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 156/21 | 21/01845-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 202/21 | 21/01845-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært játtanarreglunum hjá Tórshavnar kommunu verða meir- og minninýtslur fluttar fram til komandi ár. Framflytingar skulu játtast sum eykajáttan í býráðnum.

Ársroknskapurin fyri 2020 er nú gjørdur upp, og gjørt er eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta fram til 2021.

Samlaða framflytingin íroknað Tórshavnar Havn er fyri rakstur 35,9 mió.kr netto og fyri íløgur 135,5 mió.kr, og er útgreinað soleiðis:

| | **Rakstur** | **Íløgur** |
|---|---|---|
| TK | 29,6 mió.kr | 88,5 mió.kr |
| TH | 6,26 mió.kr | 47,0 mió.kr |

Víst verður til uppskot til broytingar í framflytingum í skjal nr. 21/01845-4

Framflytingin á **§ 1 Kommunal fyrisiting** er íalt 1,4 mió.kr. Mælt verður til at flyta 615 tkr (550) av kontu 20910 Aðrar útreiðslur til kontu 1210 Val og valnevndir vísandi til, at valið bleiv dýrari m.a orsakað av korona og hægri útreiðslum annars. Eisini verður mælt til at flyta 200 tkr til kontu 1313 Tekniska fyrisiting ísv játtan til samtyktar lønir.

Á **§ 2 Almanna- og heilsumál** er ein samlað minninýtsla á 15,2 mió.kr, sum verður framflutt.

Heilsu- og umsorganarfyrisitingin mælir til, at fluttar verða 577 tkr av kontu 2101 Naina til kontu 2210 Kommunulæknatænastur.

Av kontu 2720 Heilsuhúsið verða fluttar 161 tkr av kontu 2720 Heilsuhúsið, 643 tkr av 2731 Gjøld fyri røktartænastur og 45 tkr av 2761 Leiga, íalt 849 tkr.

Á kontu 2730 Fyrisiting verða fluttar 228 tkr og á 2750 Ansingarsamsýning verða fluttar 621 tkr.

**§3 Børn og ung** hevur eina samlaða minninýtslu á 10,2 mió.kr í 2020.

Mælt verður til at flyta av hesum kontum hesar upphæddir:

3102 Felags kontu eind B 393 tkr
3103 Felags kontu eind A 63 tkr
3104 Felags konto Eind R 770 tkr
til konturnar:
3105 Felags konto Eind N 177 tkr
3215 Aðrar útreiðslur 200 tkr (til verkætlanina 'Spæl við')
3215 Aðrar útreiðslur 849 tkr (til børn við serligum tørvi)

Framflytingin á **§4 Undirvísing** er íalt 1,4 mió.kr.

**§5 Mentan og frítíð** hevur eina minninýtslu á 1,2 tkr. Mælt verður til at flyta 244 tkr av 5364 Stuðul til ítrótt til 5633 Stuðul annars.

Samlað er ein meirnýtsla á **§6 Teknisk mál** upp á 1,3 mió.kr. Mælt verður til at flyta pening av ávísum rakstrarkontum yvir á aðrar rakstrarkontur. Sí hjálagda yvirlit yvir hesar flytingar.

**§7 Kommunal virki** hevur eina minninýtlsu á 1 mió.kr. Mælt verður til at flyta pening av ávísum rakstrarkontum yvir á aðrar rakstrarkontur. Sí hjálagda yvirlit.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
-

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
-

**Umhvørvisárin**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Stjórnin og fíggjarleiðarin mæla til at játta framflyting á 35,9 mió.kr netto til rakstur og 135,5 mió.kr til íløgur. Eisini verður mælt til at gera broytingar í framflytingini sambært viðlagda skjali nr. 20/01845-4.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 26. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 203/21 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 34/21 | 21/00010-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 68/21 | 21/00010-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 68/21 | 21/00010-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 103/21 | 21/00010-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 96/21 | 21/00010-1 |
| 6 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 130/21 | 21/00010-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 131/21 | 21/00010-1 |
| 8 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 157/21 | 21/00010-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 166/21 | 21/00010-1 |
| 10 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 203/21 | 21/00010-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.
Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Býráðsfundur<br>23. juni 2021 | Blað nr.: 799<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. juni 2021 | Blað nr.: 800 |
| | Formansins merki: |

Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

## 204/21 Áheitan um yvirtøku av vegi matr. nr. 658d, yviri við Strond 53, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 145/21 | 21/00586-3 |
| 2 Tekniska nevnd | 22.06.2021 | 45/21 | 21/00586-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 172/21 | 21/00586-3 |
| 4 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 204/21 | 21/00586-3 |

**Upprunin til málið**
Áheitan frá sakførara at yvirtaka part av matr. nr. 658a til almennan veg sum atkomu til matr. nr. 658d, Tórshavn, umframt matr. nr. 658a og 658c, Tórshavn.

**Lýsing av málinum**
Sakførari umboðandi eigararnar av matr. nr. 658d, Tórshavn, heitir í skrivi dagfest 3. februar 2021 á Tórshavnar kommunu um at yvirtaka vegin, sum er lagdur á matr. nr. 658a, Tórshavn, og sum er vegatkoma til ognirnar matr.nr. 658a, 658c og 658d.

Sakførarin vísir á, at ferðsluviðurskiftini í økinum hava verið ótolandi í nógv ár, og eitt nú hava fleiri sakarmál verið um atkomuna eftir vegnum, ið liggur á matr. nr. 658a.

Sakførarin vísir á, at tað var í semju millum allar táverandi eigarar av nevndu ognum, at Tórshavnar kommuna seinast í áttatiárunum lat gera vegatkomu til tær tríggjar ognirnar eftir matr nr. 692a og á matr. nr. 658a.

Við dómi eru eigararnir av matr. nr. 658a dømdir at viðurkenna, at eigararnir av matr. nr. 658d hava vegatgongd eftir matr. nr. 658a og kunnu nýta parkeringsøkið á matr. nr. 658 c.

Sakførarin vísir á, at løgreglan sigur seg ikki kunna gera nakað við viðurskiftini á staðnum, tí ein partur av vegnum liggur inni á privatari ogn hjá matr. nr. 658a.

- Eg fari tí at biðja um, at sjálvur vegurin, sum gongur millum sethúsini á 658d og 658a og tann tríkanturin av 658c, sum er nýttur sum parkeringspláss, sum hjálagda mynd vísir, verður yvirtikin av kommununi sum partur av felags vegi, soleiðis at vegatkoman hjá klientum mínum sum eigarar av matr. nr. 658d verður tryggjað, skrivar sakførarin í áheitan síni á Tórshavnar kommunu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Lov om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 111 frá 13. desember 2006

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin hevur samskift við sakførara umboðandi eigararnar av matr. nr. 658a og lagt fram uppskot til loysn, sum inniber, at Tórshavnar kommuna yvirtekur lendið á matr. nr. 658a, sum liggur sum vegur í dag. Sakførarin hevur síðani boðað Tórshavnar kommunu á, at eigararnir ikki eru sinnaðir at taka undir við slíkari loysn.

Skal kommunan gerast eigari av lendinum, sum liggur sum vegur í dag, noyðist kommunan tískil at ognartaka lendið.

1881-lógin om forpligtelse til jords afgivelse til offentlige veje, havne og landingsstder samt til offentlige skoler på Færøerne heimilar kommunustýrinum at ognartaka lendi til nýggjan veg ella víðkan av eldri vegi ella broyttari vegaføring í tann mun, hetta er almannagagnligt.

Ognartøka kann bert fara fram mótvegis fullum endurgjaldi. Er ikki semja um endurgjaldið, verða tvey metingarfólk av Føroya rætti biðin um at áseta støddina á endurgjaldinum.

Avgerðir um heimildargrundarlagið undir ognartøkum kunnu kærast til kærunevndina í lendismálum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
21_00586 Vídd av yvirtøku.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjóri, býarverkfrøðingurin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla fíggjarnevndini til at taka støðu til, um kommunan skal fara undir eina tilgongd at ognartaka part av matr. nr. 658a, Tórshavn til vegatkomu til matr. nr. 658a, 658c og 658d og beina málið í teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Elsa Berg, tekur undir við at fara undir eina tilgongd at ognartaka part av matr. nr. 658a, Tórshavn til vegatkomu til matr. nr. 658a, 658c og 658d og beinir málið í teknisku nevnd.

Ein minniluti, Annika Olsen, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Vegaatkoman til matriklarnar 658a, 658d og 658c kann tryggjast við at ein 4 metur breiður geiri inni á matr. 658a, beint vestan fyri markið móti matr. 658d og 658c, sum gongur 6 metrar norður um markið millum 658c og 658d, verður gjørdur til veg.

Hetta gevur eina vídd á 75 m² sum krevst til vegin og umfatar ikki verandi stoypt undirlag, sum er á matr. 658a, men einans asfalterað / skervlagt øki.

Av tí at talan einans er um atkomu til í mesta lagi tríggjar matriklar er ikki tørvur á, at vendipláss verður gjørt.

Tørvur er á, at asfalterað verður innan alt ov langa tíð. Eisini er tørvur á, at avvanding verður skipað fyri alt vegastrekkið oman til vegin Yviri við Strond. Hetta eru átøk, sum innibera útreiðslur, sum kunnu haldast innan rakstrarjáttan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at umrødda økið verður umlagt til veg og at tekniskar ábøtur á vegin verða gjørdar og fíggjaðar yvir rakstur.

**Tekniska nevnd 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini at fara undir eina ognartøkutilgongd í málinum umframt tilmælið frá teknisku nevnd, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, tveimum ímóti og fýra blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Ruth Vang

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 21:15</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Elsa Berg | Jákup Dam |
| Gunvør Balle | Annika Olsen | Birgir Nielsen |
| | Ruth Vang | |